| | Blað nr.: 802 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 28. september 2023 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 194/23 – 234/23**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen
Jón Kragesteen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze
Bogi Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 194/23 | 23/04985-2 | Turið Horn berst frá at møta á býráðsfundi 28. september 2023 | 805 |
| 195/23 | 23/00153-1 | Mál beind í nevndir 2023 | 806 |
| 196/23 | 22/07311-10 | Afturkeyp av óbygdum grundstykki matr.nr. 255df, Kirkjubøur/Argir. | 808 |
| 197/23 | 23/04953-2 | Matr.nr. 159p, Nólsoy. Eigari vil læta óbygda grundstykkið innaftur. | 810 |
| 198/23 | 23/05592-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið til býráðsvalið 2024 fyri Tórshavn, Sund, Mjørkadal, Norðradal, Hest og Koltur | 812 |
| 199/23 | 23/05010-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið til býráðsvalið 2024 fyri Hoyvík | 813 |
| 200/23 | 23/01884-1 | Hestur sum valstað | 814 |
| 201/23 | 23/04056-2 | Tilmæli av limum í Leiklistaráðið 2023 til 2026 | 817 |
| 202/23 | 23/03905-5 | Endurnýggjan av sáttmálanum viðvíkjandi ensku krígsgravunum í TK | 818 |
| 203/23 | 15/03760-1 | Talgild plássávísingarskipan til dagstovnaøkið | 820 |
| 204/23 | 21/02924-1 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrium | 833 |
| 205/23 | 23/05067-2 | Róðrarfelagið Knørrur : Umsókn um fíggjarligan stuðul | 839 |
| 206/23 | 23/00098-1 | Vøllurin inni í Vika – nýggj ljósskipan v.m. | 841 |
| 207/23 | 23/03495-1 | Hegnskylda, skjótibreytin o.a. | 844 |
| 208/23 | 20/00622-1 | Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt | 847 |
| 209/23 | 21/03047-1 | Tórsvøllur Torg | 855 |
| 210/23 | 21/02314-2 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1083a, 1083ae og 1087b, Tórshavn. Frá 4. grundumráði til B3 øki | 863 |
| 211/23 | 18/03468-1 | Skipan av Stórutjørn | 866 |
| 212/23 | 23/02060-3 | Tinglýsing av gøtusambandi matr.nr. 1456a, 1456h og 1452c, Tórshavn | 878 |
| 213/23 | 17/03196-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 880 |
| 214/23 | 21/00676-7 | Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux matr. nr. 1083r, Tórshavn | 896 |
| 215/23 | 20/01519-2 | Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður. | 900 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 216/23 | 23/05194-3 | Umsókn um at leingja leigusáttmálan matr. nr. 230a, Kollafjørður, P/F Faroe Real Estate Ltd. | 904 |
| 217/23 | 16/03305-2 | Bátadráttur í Nólsoy | 906 |
| 218/23 | 22/07206-15 | Róðararfelagið Knørrur : Rokning fyri umprojektering av neysti í Álakeri | 908 |
| 219/23 | 23/03342-3 | Barðið : Umsókn um at leiga grundøki til frystugoymslu á Vestaru Bryggju | 911 |
| 220/23 | 21/00927-1 | Víðkan av sølutorginum í Vágsbotni | 914 |
| 221/23 | 17/01437-1 | Umsókn frá NAX um leigu av øki á Sundi til bygging av høll til útgerð til ferðavinnu á sjónum. | 920 |
| 222/23 | 23/00151-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023 | 925 |
| 223/23 | 23/05027-2 | Fíggjarætlan 2024, Tórshavnar kommuna | 927 |
| 224/23 | 20/04130-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum til fíggjarnevndina | 933 |
| 225/23 | 20/04131-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina | 935 |
| 226/23 | 20/04133-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í trivnaðarnevndina | 937 |
| 227/23 | 20/04136-1 | Val av 5 limum og tiltakslimum í náttúru- og umhvørvisnevndina | 939 |
| 228/23 | 20/04322-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í eldranevndina | 941 |
| 229/23 | 21/00354-1 | Val av 5 limum og 5 varalimum í vinnunevndina | 943 |
| 230/23 | 20/04134-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í vinnunevndina | 945 |
| 231/23 | 20/04138-1 | Val av limi í hvítanesnevndina | 948 |
| 232/23 | 20/04145-1 | Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini | 949 |
| 233/23 | 22/04631-1 | Eykajáttan til 8114 kavarudding | 954 |
| 234/23 | 23/05081-1 | Nýggj Atlagøta | 959 |

**Til viðgerðar**

## 194/23 Turið Horn berst frá at møta á býráðsfundi 28. september 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 194/23 | 23/04985-2 |

**Málslýsing**
Turið Horn hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jón Kragesteen, eru loknar.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 195/23 Mál beind í nevndir 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 2/23 | 23/00153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 29/23 | 23/00153-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 59/23 | 23/00153-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 87/23 | 23/00153-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 119/23 | 23/00153-1 |
| 6 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 136/23 | 23/00153-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 195/23 | 23/00153-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Tikið til eftirtektar.

# 196/23 Afturkeyp av óbygdum grundstykki matr.nr. 255df, Kirkjubøur/Argir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 242/23 | 22/07311-10 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 196/23 | 22/07311-10 |

**Upprunin til málið.** Kommunan hevur rykt um bygging av óbygdum grundstykki. Keypari av stykkinum hevur nú avgjørt at selja grundstykkið aftur til kommununa.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 255df, Kirkjubøur, Argir. Vídd 400$m^2$. Skeytið tinglýst 12.03.2020.
Keypsprísur kr. 682.000,00 minus regulering kr. 60.400,00 = netto keypsprísur kr. 621.600,00

Keypari hevur fingið byggiloyvi til eini sethús 23.09.2020, og hevur goldið íbindingargjald kr. 10.080,-

Keypari er ryktur uppá byggifreist, og er nú sinnaður til at lata grundstykkið innaftur, og hevur í hesum sambandi skrivað undir eitt afturkeyps skeyti, sum tó er treytað av býráðssamtykt.

Sambært ásetingum í skeytinum, verður Tórshavnar kommuna hildin skaðaleys fyri eini og hvørji útreiðslu í samband við afturskjeytan, og rindar verandi eigari tí útreiðslurnar til tinglýsing av afturkeyps skeytinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
- Kommunustýrislógin
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir.
- Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Blað nr.: 809<br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **x** | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | | Keyp og søla |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 621.600 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri søluprís kr. 621.600,- og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.
Keyparin fær harumframt afturgoldið kr. 10.080,- sum hann hevur rindað fyri íbindingargjald.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Blað nr.: 810 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 197/23 Matr.nr. 159p, Nólsoy. Eigari vil læta óbygda grundstykkið innaftur.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 243/23 | 23/04953-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 197/23 | 23/04953-2 |

**Upprunin til málið.** Teldubræv frá eigara.

**Lýsing av málinum.**

Verandi eigari keypti grundstykkið matr.nr. 159p, Nólsoy frá kommununi. Skeytið tinglýst 28.04.2023.
Keypsprísur kr. 165.000,00 + tinglýsingar kostnaður kr. 2.650,-
Grundstykkið er óplanerað. Vídd 503m².

Eigari upplýsir, at orsøkin til at hann letur stykkið innaftur er, at hann fær ikki fígging til bygging av sethúsum í Nólsoy.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6175 | | Keyp og søla. | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 165,000,00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri kr. 165.000,00 og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.

Seljari rindar tinglýsingar kostnað.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

# 198/23 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið til býráðsvalið 2024 fyri Tórshavn, Sund, Mjørkadal, Norðradal, Hest og Koltur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 198/23 | 23/05592-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Tórshavn, Sund, Mjørkadal, Norðradal, Hest og Koltur til býráðsvalið 2024, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

Víst verður til fundarskipan fyri Tórshavnar býráð § 16 Lutfalsval, ið er soljóðandi:

" **1 . petti.** Tá ið býráðið skal velja 2 ella fleiri limir í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir lutfalsvalháttinum.
**2. petti.** Við lutfalsvali verður sipað til ein valhátt, har býráðslimir frammanundan boða borgar-stjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.
**3. petti.** Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3, o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.
**4. petti.** Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgartjórin skipar fyri.
**5. petti.** Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.
**6. petti.** Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir pettunum 1-3 ."

Á býráðsfundur 25. august 2020 vórðu hesi vald: Magnus Dam, Kára á Dunga, Rókur Tummarsarsson og Petur Elias Petersen.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja Hjalgrim Samuelsen fyri Magnus Dam.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Valdur varð: Hjalgrím Samuelsen.

# 199/23 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið til býráðsvalið 2024 fyri Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 199/23 | 23/05010-1 |

**Upprunin til málið**
Løgmálaráðið hevur tann 27. juni 2023 góðkent, at Hoyvík verður nýtt valstað og tí skal býráðið velja valstýrið fyri Hoyvík til býráðsvalið 2024.

**Málslýsing**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Hoyvík til býráðsvalið 2024, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

Víst verður til fundarskipan fyri Tórshavnar býráð **§ 16 Lutfalsval,** ið er soljóðandi:

***"1. petti.*** *Tá ið býráðið skal velja 2 ella fleiri limir í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir lutfalsvalháttinum.*

***2. petti.*** *Við lutfalsvali verður sipað til ein valhátt, har býráðslimir frammanundan boða borgar-stjóranum frá, at teir ganga saman í valbólk, og at teir vilja atkvøða saman.*

***3. petti.*** *Limatalið í hvørjum bólki sær verður skift sundur við 1, 2, 3, o.s.fr. Býtingartalið, sum tá kemur fram, ásetir ta raðfylgju, ið hvør bólkur kann velja sítt umboð.*

***4. petti.*** *Eru tvey ella fleiri býtingartøl líka stór, verður raðfylgjan funnin við lutakasti, sum borgartjórin skipar fyri.*

***5. petti.*** *Tá ið avgjørt er, hvussu mong umboð hvør bólkur skal hava, eiga bólkarnir sum skjótast at boða borgarstjóranum frá, hvør umboðar hvønn bólkin.*

***6. petti.*** *Sigur ein bólkur frá sær rættin at seta eitt ella fleiri umboð, verða teir leysu sessirnir býttir ímillum hinar bólkarnar eftir pettunum 1-3."*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at velja Magnus Dam og Eyðfríð Jacobsen í valstýrið í Hoyvík saman við einum umboði, sum samgongan velur og einum umboði, sum andstøðan velur.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Vald vórðu: Irma Justinussen, Gunnar Djurhuus, Eyðfríð L. Jacobsen og Magnus Dam.

## 200/23 Hestur sum valstað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 115/23 | 23/01884-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 92/23 | 23/01884-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 200/23 | 23/01884-1 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningur frá fyrisitingini til staðbundnu nevndina fyri Hest 22. mars 2023.

**Lýsing av málinum**
Hestur er í dag valstað. Veljarar í Hesti og Koltri velja í Hesti. Til løgtingsvalið í 2022 høvdu 17 veljarar valrætt og 15 atkvøðu.

Til fundin í staðbundnu nevndini fyri Hest tann 22. mars 2023 heitti fyrisitingin á nevndina at umrøða hvørja støðu nevndin hevur til Hestur sum valstað.

Í málslýsingini verður víst á: Her verður hugsað um, um veljarar í Hesti velja loyniligt. Í mun til vegleiðingina hjá landinum er ikki nakar trupulleiki; har verður sagt, at minsta talið av veljarum er 10.

Ein annar møguleiki er at heita á landsstýrið um at niðurleggja Hest sum valstað og leggja saman við valstaðnum á Hálsi. Tey, sum ynskja, kunnu so velja á Hálsi.

Kommunan bindir seg til at koma út í Hest 1-2 ferðir frammanundan valinum og bjóða veljarum í Hesti at brævatkvøða.

Niðurstøðan frá nevndini var, at nevndin tekur undir við at brævatkvøtt verður í Hesti og kommunan bindir seg til at fara út í Hest tvær ferðir til brævatkvøðu.

Koltur er eisini partur av valstaðnum Hestur, men hava tey valt at brævatkvøða í Havn; tað er lættari enn at sigla út í Hest. Í løtuni er eingin skrásettur at búgva í Koltri.

Annars eru í Tórshavnar kommunu 7 valstøð (valið 8. Desember 2022):
Tórshavn við 13482
Argir við 1767 veljarum
Kollafjørður við 741 veljarum
Velbastaður við 240 veljarum
Nólsoy við 180 veljarum
Kaldbak við 176 veljarum
Hestur við 17 veljarum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 49 frá 20. Juli 1978 um val til Løgtingið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 137 frá 22. September 2020.

**VIII. Valstøð, valstýrir, valhøli v.m.**

**§ 20.** [3)] Atkvøðugreiðslan á hvørjum valstaði verður fyriskipað undir leiðslu av einum valstýri, sum sett er av kommunustýrinum. Hoyra bygdir úr ymsum kommunum til sama valstað, ger landsstýrismaðurin av,

hvussu nógvar limir avvarðandi kommunur skulu velja. Stýrið hevur í minsta lagi 3 og hægst 5 limir og skipar seg sjálvt. Valstýrið førir gerðabók, sum kommunustýrið lóggildir.

*Stk. 2.* [8] [3] Atkvøðugreiðsla fer fram í einum ella fleiri hølum, sum kommunustýrið ávísir, har atkvøðurúm í neyðugum tali eru sett upp. Atkvøðurúmini skulu vera soleiðis háttað, at ongin hevur møguleika fyri uttanífrá at síggja, hvussu avvarðandi hevur atkvøtt. Atkvøðurúmini skulu vera útgjørd við tí, sum er neyðugt fyri at atkvøða.

*Stk. 3.* [3] Kommunustýrið útvegar ein ella fleiri atkvøðukassar, ið skulu vera læstir, meðan atkvøðugreiðslan fer fram, og annars soleiðis háttaðir, at ongin atkvøðuseðil kann verða tikin upp úr, uttan kassin verður latin upp.

*Stk. 4.* [3] Í atkvøðuhølunum skulu yvirlit yvir valevnislistarnar vera uppsligin. Somuleiðis skal vera uppsligin ein vegleiðing fyri veljararnar, sum skal innihalda tær greinir í hesi lóg, sum mest týdning hava fyri sjálvt valið.

**§ 21.** [3] Val fer fram á teimum valstøðum, sum tilskilað eru á viðhefta skjali til hesa lóg. Landsstýrismaðurin kann í kunngerð broyta valstøðini. Onki valstað kann hava færri enn 10 veljarar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Hoyvík sum valstað j.nr. 23/00223. Býráðið samtykti á fundi 26. januar 2023 at heita á Løgmálaráðið at stovnseta Hoyvík sum valstað. Skriv varð sent til Løgmálaráðið 2. februar 2023.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Sí málslýsing um fund í staðbundnu nevndini fyri Hest og Koltur 22. mars 2023.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávísøkir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | **ja** | **ja** | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum umvegis fíggjarnevndina at heita á Løgmálaráðið um at niðurleggja Hestur og Koltur sum valstað og at veljarar í Hesti og Koltri velja í Tórshavn.
Samstundis bindir kommunan seg til at fara út í Hest 2 ferðir undan hvørjum vali og geva veljarum møguleika fyri at brævatkvøða.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Løgmálaráðið hevur 27. juni 2023 góðkent at strikað valstaðið í Hesti, soleiðis at Tórshavn verður nýtt valstað fyri veljarar í Hesti og Koltri.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Kunnað varð um málið.

# 201/23 Tilmæli av limum í Leiklistaráðið 2023 til 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 201/23 | 23/04056-2 |

**Málslýsing:**
Sbrt. §2. Í Ll. nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m. skal Tórshavnar kommuna tilnevna ein lim til leiklistaráðið. Landsstýrismaðurin í Almanna- og mentamálum setir nevndina, ið hevur 7 limir. Virksemi ráðsins er nærri lýst í §3 og 4 í lógini.

Víst verður til fundarskipan hjá Tórshavnar býráð MEIRILUTAVAL§ 15, ið er soljóðandi:

*"1. petti. Tá ið býráðið skal velja 1 umboð ella 1 lim í nevndir, stjórnir ella tílíkt, fer slíkt val fram eftir meirilutavalháttinum.*

*2. petti. Við meirilutavali verður sipað til ein valhátt, har tað valevni, ið fær meir enn helmingin av atkvøðunum, er valt. Fæst tílíkur meiriluti ikki við fyrstu atkvøðugreiðslu, verður atkvøtt umaftur. Fær heldur eingin meiriluta hesa ferð, verður bundið val ímillum tvey teirra, ið fingu flestar atkvøður. Stendur á jøvnum hjá fleiri enn tveimum valevnum, verður lutakast um, hvørji tey tvey skulu verða, sum endalig atkvøðugreiðsla tá verður um. Fær hvørgin teirra meiriluta hesa ferð, verður lutakast, sum borgarstjórin skipar fyri. Er borgarstjóri ikki valdur, skipar fyrst valdi limurin fyri hesum lutakasti."*

Kommunan er biðin um at tilnevna eina kvinnu og ein mann soleiðis, at landsstýrismaðurin hevur møguleika fyri at seta eina nevnd í tráð við javnstøðulógina.

**Tilmæli:**
Borgarstjórin skjýtur upp at tilnevna Eyðfríð L. Jacobsen og Heina Gaard.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Tilnevnd vórðu: Eyðfríð L. Jacobsen og Heini Gaard.

| Býráðsfundur<br>28. september 2023 | Blað nr.: 818 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# 202/23 Endurnýggjan av sáttmálanum viðvíkjandi ensku krígsgravunum í TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 246/23 | 23/03905-5 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 202/23 | 23/03905-5 |

**Upprunin til málið**
Umbøn frá bretska konsulinum í Føroyum.

**Lýsing av málinum**
Síðani seinna veraldarbardaga hava bretskir hermenn, ið lótu lív undir krígnum, ligið grivnir í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin. Ein serlig nevnd, Commonwealth War Graves Commission, hevur ábyrgdina av hesum grøvum, og hevur nevndin eisini ábyrgdina av bretskum hermannagravum kring allan heimin. Nevndin hevur sáttmála við Tórshavnar kommunu um, at bretsku hermenninir kunnu liggja grivnir í kirkjugarðinum í Havn, og sáttmálin, sum hevur verið í gildi hesum viðvíkjandi seinastu 40 árini gongur nú út. Í tí sambandi hevur bretski konsulin í Føroyum vent sær til Tórshavnar kommunu vegna Commonwealth War Graves Commission við eini umbøn um at endurnýggja sáttmálan fyri komandi 40 árini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Commonwealth War Graves Commission átekur sær sambært sáttmálanum allan kostnað av gravunum og av at halda hesar viðlíka.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Sáttmáli millum Tórshavnar kommunu og Commonwealth War Graves Commission, j.nr. 23/03905-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla til at endurnýggja sáttmálan millum Tórshavnar kommunu og Commonwealth War Graves Commission í eitt 40 ára sáttmálaskeið.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

# 203/23 Talgild plássávísingarskipan til dagstovnaøkið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 187/15 | 15/03760-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 18/16 | 15/03760-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 301/16 | 15/03760-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 401/16 | 15/03760-1 |
| 5 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 328/16 | 15/03760-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 195/17 | 15/03760-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 194/17 | 15/03760-1 |
| 8 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 207/17 | 15/03760-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 268/17 | 15/03760-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 184/18 | 15/03760-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 11.09.2019 | 240/19 | 15/03760-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 27.11.2019 | 311/19 | 15/03760-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 12.01.2022 | 1/22 | 15/03760-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 215/22 | 15/03760-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 51/23 | 15/03760-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 07.06.2023 | 125/23 | 15/03760-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 158/23 | 15/03760-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 13.09.2023 | 147/23 | 15/03760-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 218/23 | 15/03760-1 |
| 20 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 203/23 | 15/03760-1 |

**Málslýsing:**
Mentamálanevndin hevur á fundi 14. januar 2015 tikið undir við tilmæli um at fáa til vega nýggja KT-skipan til plássávísingina (mál 14/01148).

Í uppriti til tann fundin er greitt frá, at í dag finnast útlendskar KT-skipanir, har foreldur sjálvi bíleggja stovnspláss og taka av stovnsplássi alt um digitalan platform. Eisini ber til at skriva seg upp á ynskilista til eitt ávíst pláss, siga upp pláss, søkja um farloyvi v.m. Har ber altíð til at fáa dagført yvirlit yvir, um ella nær pláss er tøkt á stovnunum.

Skipanin kann eisini sjálv vísa foreldrum á tøk pláss í nærumhvørvinum og sjálvvirkandi geva foreldrum boð, um broytingar henda.

Ikki bert er hetta ein betri tænasta til foreldrini. Hetta er eisini gjøgnumskygt og lættir um hjá umsitingini. Uppgávan hjá kommununi verður at vegleiða foreldur í at nýta skipanina og tryggja at kommunan á skynsamasta hátt nøktar ansingartørvin í framtíðini. Eisini í mun til støðugt at hava nøktandi yvirlit yvir plásstørvin og veita foreldrum plásstrygd, kann skipanin verða gagnlig.

Tá varð eisini víst á, at neyðugt er at kanna, um til ber at tillaga longu kendar KT-skipanir til okkara viðurskifti, alternativt at menna eina skipan sjálvi.

Til tess er neyðugt at skipa eina verkætlanartilgongd at gera nágreiniliga tørvslýsing sum grundarlag fyri at bjóða út slíka skipan, hvørt tað er at menna eina av nýggjum, ella at keypa og tillaga eina virkandi skipan.

Partur av uppgávuni verður at eftirhyggja allar tær treytir, sum í dag eru í upptøkureglunum til tess at gera skipanina so smidliga sum til ber bæði fyri foreldrini, umsitingina og stovnarnar. Harumframt eisini, hvørjar skipanir og modul skulu ella kunnu knýtast uppí við fyrimuni, herundir fólkayvirlit, faktureringar, hagtøl v.m.

Skipast skal ein verkætlanarbólkur við umboðum fyri avvarðandi deildir (barna- og ungdómsdeildin, snarskivan, kt-deildin, evt. aðrar eftir tørvi), sum saman við verkætlanarleiðara ger uppskot til tørvslýsing at leggja fyri nevnd aftur. Partur av hesum arbeiði verður tí eisini at gera uppskot til broytingar í verandi upptøkureglum og møguliga øðrum mannagongdum, sum hava týdning í mun til ætlaðu endamálini við skipanini.

Mett verður neyðugt at keypa ráðgeving til tilgongd at fáa tørvslýsing og útboðstilfar tilvega. Mett verður, at hetta tekur 3-4 mðr at gera. Kostnaður fyri hetta arbeiðið er mett til kr. 200.000.

Fígging kr. 200.000 kann fáast til vega av ónýttari játtan á 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fáa til vega tørvslýsing og útboðstilfar til talgilda plássávísingarskipan og til tess at játta kr. 200.000 av kontu 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing ætlað ráðgeving v.m.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Verkætlanarleiðari er settur og arbeiðsbólkur við umboðum fyri snarskivuna, barna- og ungdómsdeildina, fíggjardeildina og dagstovnaleiðarar umboðandi hvørt upptøkuøkið er skipaður.

Ætlan er løgd fyri arbeiðinum, fundir við áhugapartar v.m. Yvirskipað er endamál við talgildu plássávísingarskipanini eitt størri frælsi og betri tænasta til borgaran, sum skjótt kann velja stovnspláss, minni umsiting og neyvari forsagnir um tørv á plássum.

Sambært tíðarætlanini skal tørvslýsing og útbjóðingartilfar verða liðugt 21. apríl 2016.

Umframt hetta er tørvur á einum stýrisbólki við politiskari umboðan at viðgera yvirskipaðar spurningar viðvíkjandi krøvunum til skipanina, herundir broytingar í upptøkureglunum.

Skotið verður upp, at trivnaðarstjórin og miðfyrisitingarstjórin eru umboðaði í stýrisbólkinum aftrat 2-3 politiskum umboðum úr mentamálanevndini. Mett verður, at talan verður um 3-4 fundir í hesum tíðarskeiðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildina mæla mentamálanevndini til at velja politisk umboð í stýrisbólkin.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016:** Vald vóru Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Jógvan Arge í stýrisbólkin.

**Ískoyti:**

Projektbólkurin hevur latið stýrisbólkinum kravfestingina til nýggja barnaansingarskipan.
Í stýrisbólkinum vóru Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Jógvan Arge, trivnarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og deildarleiðarin á kt-deildini.

Síðani eru 'Upptøkureglur til dagstovnar í Tórshavnar kommunu' endurskoðaðar, har trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og leiðarin fyri barna-og ungdómsdeildina umframt onnur hava luttkið í arbeiðinum. Í hesum sambandi er gjørt uppskot til meginreglur, har veitt verður plásstrygd, og sum í størri mun er fleksibul í mun til foreldratørv. Sí hjálagt skjal.

Við talgildari skipan kunnu foreldur bóka pláss talgilt og síggja beinanvegin á hvørjum stovni barnið fær pláss. Somuleiðis fáa foreldur svar frá Tórshavnar kommunu beinanvegin, tá ið plássið er bókað í mun til nú, har foreldur fáa svar frá kommununi, tá ið kommunan hevur útlutað plássini. Mett verður somuleiðis, at skipanin gevur gjøgnumskygni í sambandi við at fáa barnaansingarpláss - bæði fyri borgaran og Tórshavnar kommunu - og skynsamari rakstur hjá Tórshavnar kommunu.

Mett verður, at tekur mentamálanevndin undir við meginreglunum fyri plássávising, so er saman við kravspesifikatiónini klárt at bjóða talgildu plássávísingarskipanina út.

Gerast skal vart við, at játtan til endamálið er ikki sett av á fíggjarætlanini fyri 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á barna-og ungdómsdeildini mæla til at taka undir við uppskotinum til broytingar í 'Upptøkureglur til dagstovnar í Tórshavnar kommunu' og við støði í hesum og kravspesifikatiónini at bjóða út talgildu plássávísingarskipanina. Harumframt verður mælt til, at játtan verður fingin til vega.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við prinsippinum í uppskotinum til broytingar í «Upptøkureglur til dagstovnar í Tórshavnar kommunu» og at bjóða út talgildu plássansingarskipanina, og verður málið at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kommunan skipaði fyrr í ár fyri útboði av talgildu bíleggingarskipanini til dagstovnapláss. Inn komu fýra tilboð. Undir viðgerðini gjørdist greitt, at til bar ikki at sammeta tilboðini, tí talan var bæði um tilboð uppá standardskipan og menning av nýggjari skipan. Valt varð tí at avlýsa útbjóðingina.

Umsitingin hevur síðani kannað marknaðin við støði í møguligum útboði av standardskipan burturav. Tað sær ikki út til, at tað eru fleiri bíleggingarskipanir enn tann sonevnda NemPlads (Assemble), ið fleiri bæði størri og smærri danskar kommunur brúka. Skipanin verður harumframt brúkt í øðrum norðurlondum umframt Týsklandi, Frankaríki v.fl.

Tað eru fleiri fyrimunir at útvega eina standardskipan, sum longu er í rakstri og er væl roynd í fleiri londum. NemPlads verður reglugliga dagførd og víðari ment. At skipanin hevur nógvar kundar ger eisini, at skipanin verður støðugt dagførd og víðari ment út frá tørvinum hjá kundunum, og hetta er fevnt av lisenskostnaðinum. Eisini fær kommunan ein veitara við serkunnleika á økinum.

Fyrimunur við hesi skipanini er eisini, at hon skapar fult gjøgnumskygni fyri borgaran og tryggjar umsitingini hagtøl og yvirlit bæði um støðuna her og nú og um plásstørv mánaðir fram í tíðina. Alt hetta ger, at stýringin av plásskapasitetinum økinum kann gerast munandi neyvari. Hetta væntast eisini leysgeva starvsfólkaresursir í miðfyrisitingini.

Vansi kann vera, at veitarin er ikki í Føroyum. Mett verður, at í hesum føri er ikki neyðugt við lokalari support. KT-deildin umsitur fleiri skipanir, har support kemur um netið. Krav um lokalan support kann vera dýrkandi lið, sum haraftrat ikki hevur serkunnleikan til skipanina kortini. Fyri borgaran er tó alt á føroyskum.

Kommunan hevur biðið um óbindandi tilboð uppá at keypa NemPlads-skipanina. Sambært hesum er ein grundupphædd (útveganarkostnaður) uml. kr. 230.000. Árligi lisenskostnaður av skipanini, harundir dagføringar, víðarimenning v.m., er kr. 480.000. Fyrivarnin skal takast fyri hesum, tí talan er um kostnaðaruppskot áðrenn samráðing.

Til skipanina skulu gerast ymsar integratiónir til aðrar sentralar skipanir, fyrst og fremst fólkayvirlitið, kommunalu faktureringsskipanina, Mín boks og Mín lykil. Hetta verður samlað mett at kosta uml. kr. 600.000. Upplæring, kunning og verkseting annars verður mett at kosta kr. 85.000.

Verður skipanin keypt í ár, kann roknast við, at skipanin er klár at taka í nýtslu ætlandi til høvuðsupptøkuna 2018 (tvs. tíðliga um várið).

Miðfyrisitingin ber árligu lisenskostnaðirnar. Eftir at fíggja er sostatt útveganarkostnaðurin, integratión við aðrar skipanir og verkseting við upplæring, kunning v.m. – í alt kr. 915.000.

Mett verður, at til ber at fíggja útveganarkostnaðin uml. kr. 230.000 av verandi fíggjarætlan á grein 3 konta 3215 aðrar útreiðslur, og at restfíggingin til integratiónir og verkseting umleið kr. 685.000 verður at játta av fíggjarætlanini 2018 um so er, at játtan verður sett av til endamálið á fíggjarætlanini 2018. Í fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2018 er lagt upp fyri hesum á kontu 3215 aðrar útreiðslur.

Fyrisitingin metir skilabest beinanvegin at fara í samráðing um og at keypa NemPlads-bíleggingarskipanina, og eftirfylgjandi at fáa sett arbeiðini við integratión av øðrum skipanum í gongd og verkseting innanfyri ein karm uppá í mesta lagi kr. 915.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at fáa heimild at samráðast um og at keypa NemPlads-skipanina at rinda av kontu 3215 aðrar útreiðslur, og at fígging til tilhoyrandi integratiónir við aðrar skipanir umframt verkseting kr. 685.000 verður fingin til vega á fíggjarætlanini 2018 at játta til endamálið.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingar og verkseting av skipan, verður mett neyðugt at skipa eina projektorganisatión til endamálið við stýrisbólki, projektbólki og referansubólki. KT-deildin hevur projektleiðsluna um hendi.

Sum umboð i stýrisbólkin er ætlanin at velja tvey politisk umboð fyri mentamálanevndina. Aftrat politisku umboðunum er trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, KT-deildarleiðarin, barna- og ungdómsdeildarleiðarin og leiðarin á Snarskivuni.
Nøkur av hesum ganga aftur í projektbólkinum saman við starvsfólki á Snarskivuni og umboðum fyri dagstovnaøkið. Referansupersónar annars eru umboð frá dagstovnaøkinum, KT drift, fíggjardeildin, veitarar v.m.

Stýrisbólkurin hevur yvirskipaða ábyrgd av verkætlanini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á KT-deildini mæla mentamálanevndini til at velja tvey umboð úr nevndini í stýrisbólkin.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Samtykt at velja Hallu Samuelsen og Gunvør Balle í stýrisbólkin.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt í býráðnum 15. desember 2016 um upptøkureglur til stovnspláss. Í sambandi við fyrireikingarnar at seta talgildu plássbíleggingarskipanina í verk, er tørvur á at tillaga nakrar av ásetingunum, sí uppskot hjálagt. (Kemur mánadagin)

Ætlandi verður plássbíleggingarskipanin almannakunngjørd eftir summarfrítíðina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja uppskotið til upptøkureglur.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus hava biðið um at fáa málið á skrá (foreldragjaldið).

**Mentamálanevndin 11. september 2019:** Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus vilja, at foreldur, ið hava goldið vøggustovugjald eftir at børnini eru flutt í barnagarðsstovu, fáa munin endurgoldnan.

Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at kanna, hvussu nógv foreldur eru komin í hesa støðu at leggja aftur fyri nevndina.

**Ískoyti:**
BARN skipanin varð sett í verk 1. oktober 2018. Íverksetanin hevur havt útreiðslu við sær eins og flest aðrar íverksetanir av skipanum.

BARN skipanin er uppbygd soleiðis, at tá barnið er yngri enn 3 ár fáa dagstovnarnar vøggustovugjald og sama mðr. tá barnið fyllir 3 ár fáa dagstovnarnar barnagarðsgjald. Tað vil siga, at í tí mánaðinum barnið fyllir 3 ár broytist inntøkan til barnagarðsgjald, óansæð um barnið hevur fingið pláss í barnagarð ella ikki.

Áðrenn BARN skipanina flutti meginpartin av vøggustovubørnum yvir í barnagarð eftir 1. august og gjaldið broyttist ikki fyrr enn tey vóru flutt í barnagarð. Tó kundi onkur hissini flyting koma fyri, at okkurt barn flutti áðrenn 1. august, t.d. um so var, at eitt barnagarðsbarn varð útskrivað ella fór í farloyvið. Eisini kundi avtala gerast við foreldrini um, at rinda vøggustovugjald longri fyri barnið um so var, at námsfrøðilig atlit talaði fyri, at barnið hevði betri av at verða verandi í vøggustovu nakrar mðr. aftrat og foreldrini vórðu samd. Onkursvegna var skipanin, áðrenn BARN skipanina smidligari, hvat hesum viðvíkur.

**Foreldur**
Foreldur hava vent sær til umsitingina og víst á, at tað er ikki rímiligt, at tey rinda vøggustovugjald, hóast barn teirra gongur í barnagarðsstovu. Foreldur rinda vøggustovugjald til barnið fyllur 3 ár óansæð um barnið gongur í vøggustovu ella barnagarðsstovu. Børn verða flutt í barnagarð, áðrenn tey fylla 3 ár um námsfrøðilig atlit tala fyri og um foreldrini eru samd. Hetta verður eisini gjørt fyri at minka um bíðilistan hjá Tórshavnar kommunu og fyri at syrgja fyri, at stovnarnar hava fult barnatal fyri at kunna veita ein góða tænastu.

Víst verður eisini til avgerð hjá Mentamálaráðnum frá 05-02-2013 viðvíkjandi kæru um ansingargjald, har m.a. stendur soljóðandi: "Stovnurin kann ikki framhaldandi krevja vøggustovugjald, tá barnið ikki longur gongur í vøggustovu".

| Foreldragjaldið fyri 2019: | Vøggustova | Barnagarð | Munur |
|---|---|---|---|
| | Kr. 2.942 | Kr. 1.817 | Kr. 1.125 |

Frá 1. januar 2019 til 1. oktober 2019 hava foreldur rindað vøggustovugjald, hóast barnið hevur gingið í barnagarð í 115 mðr.

116 x kr. 1.125 = 130.500 kr. hava foreldur rindað ov nógv í foreldragjaldið til Tórshavnar kommunu.

| Foreldragjaldið fyri 2018: | Vøggustova | Barnagarð | Munur |
|---|---|---|---|
| | Kr. 2.650 | Kr. 1.640 | Kr. 1.010 |

**Dagstovnar:**
Dagstovnarnar hava eisini vent sær til umsitingina og víst á, at teir eisini hava verið fyri inntøkumissi eftir BARN skipanin er sett í verk.

Dagstovnarnar vísa á, at um pláss ikki er í barnagarðsstovu, so má barnið verða verandi í vøggustovu til pláss verður í barnagarðsstovuni. Børnini taka sostatt vøggustovupláss og gjalda fyri barnagarðspláss. Tað vil siga, at barnagarðsbørn í vøggustovum fáa ov høga normering og hægri tænastu, meðan inngjaldið er lægri. Hetta viðførir inntøkumiss fyri stovnarnar og sveiggj í normeringunum. Hesa umstøður ávirka figgjarstøðuna hjá stovnunum. Ein onnur avleiðing av BARN skipanini er, at fleiri tøk pláss eru á stovnunum, men hesi vísa seg ikki í talgildu skipanini. Orsøkin er, at um so er, at borgarin bókar sær pláss til vøggustovubarn, sum eisini hevur tørv á barnagarðsplássi á sama stovni, so kann onki pláss vísa seg, tí frammi í tíð er ikki pláss í barnagarðsstovunum, hóast pláss er í vøggustovuni her og nú. Tað vil siga, at pláss eru tøk á stovnunum her og nú, sum ikki vísa seg í skipanini, tí pláss er ikki uppá sikt.

Hetta merkir eisini inntøkumiss fyri stovnarnar, ið ikki kunnu fylla stovnarnar og hetta ger eisini, at bíðilistin verður longri og tænastan verri til borgaran.

**Samanumtikið**
Royndirnar við BARN-skipanini í mun til omanfyri nevndu viðurskifti verða eftirmettar, harundir eisini tørv á broytingum í upptøkureglugerðini. Arbeiðið at gera nýggjan fíggjarleist fyri dagstovnaøkið kann eisini

loysa nakað av hesum upp serliga um farið verður frá, at pengarnir fylgja barninum til at pengarnir fylgja plássunum. T.d. er pláss fyri 12 vøggustovubørnum, so fær stovnurin fyri 12 vøggustovupláss. Ein onnur loysn kundi verði at ásett sama gjald fyri vøggustovu og barnagarð eftir einum miðaltali av kostnaðinum fyri ávikavist vøggustovu- og barnagarðsgjald.

Endamál er at sleppa burturúr hesi støðu, so at foreldrum bert verða áløgd tey gjøld, tey av røttum skulu gjalda, eins og at stovnarnir fáa tær inntøkur, teir skulu hava. Fíggjarligu avleiðingarnar hjá stovnunum higartil væntast loystar í sambandi við regulering.

Tey foreldur, sum hava goldið ov nógv í foreldragjaldið vegna omanfyri nevndu viðurskifti, fáa upphæddina afturgoldna.

**Tilmæli**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 27. november 2019:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Annfinn Brekkstein, nevndarformaður, setir málið á skrá við uppskoti um at gera nakrar tillagingar í BARN-skipanini. Hesar tillagingar fevna um tvey viðurskifti: 1) at stovnar framyvir skulu taka børn inn tvær ferðir um árið og bert oftari, tá stovnsleiðarin tekur avgerð um tað, og 2) at skipanin skal gerast tænastuvinarligari soleiðis, at skipanin sjálv bjóðar foreldrum tøk vøggustovu- og barnagarðspláss.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Uppskotnu tillagingarnar í skipanini eru fyrst og fremst viðkomandi fyri vøggustovu- og barnagarðsstovuplássini. Skipanin verður eisini brúkt til innskriving til skúla og frítíðarskúla.

Ad 1) sum meginregla tvær upptøkur um árið
Tá skipanin varð sett í verk, vórðu upptøkureglurnar broyttar soleiðis, at børn kundu takast upp – tvs. byrja á stovni alt árið. Áður vóru tvær upptøkur árliga – á sumri og á vetri.

Grundarlagið undir broytingini var, at tað skuldi vera upp til foreldrini, nær barnið byrjaði á stovni soleiðis, at tey kundu fáa samsvar millum, nær barnsburðarfarloyvið endaði og nær barnið byrjaði.

Broytingin hevði ávirkan á virksemið á stovnunum, serliga fyri vøggustovurnar, sum kendu seg vera í innkoyring alla tíðina. Innkoyring krevur størri starvsfólkaorku í eina tíð, men nú var hetta varandi støða, ið gekk út yvir annað námsfrøðilgt virksemi á stovunum og starvsfólkatrivnaðin.

Endamálið við at broyta upptøkuna til tað, sum hon upprunaliga var – tvs. sum meginregla tvær upptøkur ávikavist á sumri og á vetri, men har stovnsleiðarin nú kann avgera, um barn skal takast upp uttanfyri hesi tíðarskeið, er at geva stovnunum betri umstøður at skipa námsfrøðiliga virksemið.

Formliga skal upptøkureglugerðin broytast og góðkennast av býráðnum og Uttanríkis- og mentamálaráðnum sambært Dagstovnalógini. Arbeitt verður við uppskoti til nýggja upptøkureglugerð, har hetta er tikið við.

Ad 2) skipanin skal sjálv bjóða foreldrum tøk vøggustovu- og barnagarðsstovupláss
Tá skipanin varð sett í verk, var støðan tann sama sum nú, at kommunan hevur ov fá dagstovnapláss. Skipanin er sett upp soleiðis, at foreldur sjálvi leita sær tøk pláss, sum tey vilja hava.

Tá plásstørvurin er so lutfalsliga stórur, so er tess truplari og meira tíðarkrevjandi hjá foreldrum at finna nakað tøkt pláss, har møguleikin at velja stovn eftir egnari raðfesting eisini er nógv avmarkaður. Hetta hevur við sær ónøgdsemi um skipanina.

Uppskotið snýr seg um at venda hesum við, tvs., at tað frameftir er skipanin, sum vísir/bjóðar foreldrunum tey pláss, sum eru tøk og viðkomandi fyri teirra barn (aldur/tíðarskeið), og sum foreldur so kunnu bóka.

Endamálið við hesum er sostatt at gera tænastuna betri soleiðis, at skipanin ger arbeiðið, ikki foreldrini.

Hetta krevur at tillaga skipanina, tvs. at programmera slíka funktión. Hetta verður at taka upp við veitaran, harundir kostnað.

Plásskapasiteturin
Í næstum koma 49 nýggj varandi pláss á Miðstovninum. Hesi verða bjóðað út í skipanini skjótast. Onnur nýggj varandi pláss væntast ikki í ár, men til ber at skipa fleiri fyribilspláss í Lonunum í Hoydølum. Í báðum førum er neyðugt við fígging, tí lagt er ikki upp fyri nýggjum plássum í fíggjarætlanini 2022. Haraftrat skal lýsast eftir starvsfólki.

Barnatalið hevur sum kunnugt verið vaksandi síðstu árini. Við nýggju varandi plássunum á Miðstovninum, og har tað verður lagt upp fyri við 0 árgangi uppá 300 børn og 1,5% tilflyting hvørt árið, at talið av forskúlabørnum verður uml. 130, og at 10% av børnunum ikki er á stovni, so koma at vanta í miðal eini 65-70 vøggustovupláss og 80-85

barnagarðspláss. Haraftrat eigur at verða ávísur yvirkapasitetur, lutvíst so at foreldur fáa møguleika at velja stovn, og til at hava sum buffara.

Ein avbjóðing í løtuni er, at nærum triðingurin av teim 3 ára gomlu eru í vøggustovu. Vóru hesi í barnagarðsstovu sum ætlað, høvdu fleiri vøggustovupláss verið til tey, sum nú bíða upp til hálvt ár at fáa vøggustovupláss. Til tess krevst at stovna fleiri barnagarðsstovur, har tað næstu trý árini er serliga stórur undirkapasitetur.

Tørvur er alla tíðina at hava dagførd yvirlit stovn fyri stovn og sentralt stýra plásskapasitetinum í sjálvari skipanini saman við stovnsleiðarunum. Neyðugt er at seta umsitingarliga orku av til tað burturav.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til, at

- umsitingin ger uppskot til nýggja upptøkureglugerð og setur BARN-skipanina upp soleiðis, at upptøka av børnum sum meginregla er tvær ferð um árið, á sumri og á vetri, og bert oftari, tá stovnsleiðarin tekur avgerð um tað
- umsitingin fær BARN-skipanina tillagaða soleiðis, at skipanin sjálv bjóðar foreldrunum tey pláss, sum eru tøk og viðkomandi fyri teirra barn, hetta at skilja soleiðis, at foreldur skulu ikki sjálvi leita fram tøk pláss.

**Mentamálanevndin 12. januar 2022:** Samtykt, at umsitingin fær BARN-skipanina tillagaða soleiðis, at skipanin sjálv bjóðar foreldrunum tey pláss, sum eru tøk og viðkomandi fyri teirra barn, hetta at skilja soleiðis, at foreldur skulu ikki sjálvi leita fram tøk pláss, og at umsitingin arbeiðir víðari við møguligum tillagingum í upptøkureglugerðini.

**Ískoyti:**
Nevndarformaðurin skjýtur upp, at farið verður frá verandi plássbókingarskipan til eina plássávísingarskipan, so sum flestu donsku kommunurnar nú hava, og har tað er skipanin, sum boðar frá tøkum plássi, ið mett er brúkaravinarligari enn verandi BARN skipan.

Viðmerkingar frá umsitingini:
Tað eru 7 ár síðani, at kommunan tók mál upp um at útvega talgilda skipan viðvíkjandi dagstovnaplássum, og tað eru meira enn fýra ár síðani, at BARN skipanin lat upp.
Útgangsstøðið tá var í ávísan mun tær skipanir, og her serliga NemPlads, sum tá vóru komnar á marknaðin í Danmark. Tá ynskti man at geva foreldrunum rættin til frítt at velja og bóka sær eitt ansingarpláss til barnið, og hetta er eisini meginreglan undir BARN skipanini.

Har danskar kommunur tá fingu sær hesar skipanir hvør sær, hava donsku kommunurnar í nýggjari talgildingarstrategi funnið saman at menna felags talgilda loysn hesum viðvíkjandi gjøgnum KMD, ið serliga leggur seg eftir talgildum loysnum til almennar myndugleikar.

Man er í hesum sambandi í ávísan mun eisini farin frá rættinum hjá foreldrum til frítt at velja pláss og er farin aftur til eina bíðilistaskipan.

So vítt umsitingin hevur fingið upplýst, so virkar bíðilistaskipanin yvirskipað soleiðis:

- Foreldur kunnu um NemId skriva sítt barn á bíðilista til tveir stovnar – raðfesting 1 og 2.
- Skipanin bjóðar plássini út sjálvvirkandi eftir aldri og tørvsdato í MínBoks og foreldur hava tríggjar dagar at taka av plássinum.
- Fáa foreldur boðið raðfesting 2 og taka av, kann man vera standandi á raðfesting 1.
- Finnur skipanin hvørki raðfesting 1 ella 2, so fáa foreldur boðið tað pláss, sum er – tekur man av tí, verða tey standandi á bæði raðfesting 1 og 2. Taka foreldrini ikki av, so verður bjóðað pláss aftur í seinasta lagi innan 3 mðr eftir tørvsdato, men tað er ongin trygd fyri, at tað verður raðfesting 1 ella 2.
- Systkin og børn við serligum tørvi hava framíhjárætt til pláss.

- Foreldur síggja, hvar tey eru stødd á bíðilistanum, men tað forðar ikki fyri, at ein kann standa sum nr. 1 leingi uttan at fáa pláss, um ein ikki hevur systkin ella rætta aldur.

Skipanin er talgild og sjálvt grundarlagið er ikki ólíkt BARN skipanini. Talið av vøggustovu- og barnagarðsplássum er fastlagt á hvørjum stovni, og tað er fastlagt, at børn skulu flyta í barnagarð, tá barnið er 3 ár.

Sum dømi: tá eitt tøkt pláss er í vøggustovuni t.d 1. januar 2024, so hyggur skipanin ígjøgnum listan og finnur fyrsta barnið:

1. Sum ynskir pláss 1. januar 2024 á hesum stovni.
2. Sum møguliga hevur systkin ella serligan tørv.
3. Sum pláss er fyri í barnagarðsstovu, tá barnið fyllir 3 ár.

Tvs., at um 5 tey fremstu børnini á listanum eru 1 ár tann 1. januar 2024, men onki pláss er í barnagarðsstovu 1. januar 2026, tá tey fylla 3 ár, so fáa tey ikki plássið. Men um barn nummar 6 á listanum er 1½ ár 1. januar 2024 og tískil skal í barnagarðsstovu 1. juli 2026, og tað tá er pláss í barnagarðinum, so fær nr. 6 plássið.

Yvirskipaði munurin millum BARN skipanina og nýggju ávísingarskipanina (ella bíðilistaskipanina), sum flestu danskar kommunur nú brúka, er, at foreldur hava bara tvey val – raðfesting 1 og raðfesting 2. Tað er ábyrgd hjá foreldrunum at skriva barnið upp via NemId, og so finnur skipanin pláss og boðar frá. Í BARN skipanini er tað foreldrini, ið skriva barnið upp og skulu finna plássið.

Í verandi støðu, har kommunan manglar stórt tal av plássum í mun til tørvin, so broytist bíðitíðin ikki við at skifta talgilda skipan. Munurin er tá, at skipanin fer at boða foreldrum frá, tá pláss er tøkt, og at foreldur tá skulu fylgja við í MínBoks.

Tilgongd:
Verður gjørt av at fara frá BARN bókingarskipanini til eina nýggja ávísingarskipan, eru fleiri viðurskifti at taka hædd fyri. Tað er fyri tað fyrsta týdningarmikið, at BARN skipanin ikki verður løgd niður fyrr enn ein onnur talgild skipan er útvegað og sett í verk samstundis.

Haraftrat eru knýtt ymisk modul og fyrisitingarligir hentleikar at BARN skipanini, eitt nú samskiftismodulið Foreldragluggin. Viðvíkjandi sáttmála er eisini ein uppsagnartíð.

Tað eru helst tveir yvirskipaðir hættir at fáa til vega nýggja skipan:

1) at knýta seg uppí donsku skipanina hjá KMD, eftirsum hon er serliga ment til kommunur og dagstovnaøkið, sum grundleggjandi kunnu samanberast við Tórshavnar kommunu, og tillaga hana til føroyskt mál og føroysk viðurskifti, harundir Talgilda samleikan og føroysku Dátuverndarlógina.

   Spurningur er eisini, um talan einans er um eina ávísingarskipan, ella um hon eisini hevur onnur modul so sum samskiftismodul, kekk inn-kekk út, framrokningar, hagtalsgreiningar v.m., sum BARN skipanin hevur, og um ikki, um til ber at menna hetta serskilt.

2) at bjóða út eina nýggja plássávísingarskipan og øðrum atknýttum modulum millum føroyskar og útlendskar veitarar samsvarandi kravfesting, ið kommunan ger.

Verður valt at arbeiða víðari við hátti 1), skal samskifti takast upp við KMD um sjálva skipanina og teir hentleikar/modulir, ið har eru, og um nøktandi eisini viðvíkjandi kostnaði samráðing um at gera sáttmála um skipanina og tænastur henni viðvíkjandi, umframt at tillaga hana til okkara viðurskifti.

Verður háttur 2) valdur, skal útbjóðingartilfar við støði í kravfesting sum tað fyrsta gerast.

Uttan mun til tilgongd, skal roknast við, at hetta tekur nakað av tíð.

Haraftrat er spurningur um kostnaðin bæði í mun til útveganarkostnað og lisensir um árið, sum ongar upplýsingar eru um.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir nevndini til at taka støðu til málið.

**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen og Tróndur Sigurðson, samtykkir at fara frá BARN bókingarskipanini og heimila umsitingini at fara undir tilgongd at finna nýggja og betri skipan.

Ein minniluti, Gunvør Balle, mælir til at leggja orku í at útvega fleiri dagstovnapláss og at gera BARN skipanina meira brúkaravinarliga.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur við støði í samtyktini 30. november 2022 skipað innanhýsis verkætlanarbólk at lýsa møguligar loysnir at fara frá núverandi bókingarskipan til eina kø-skipan (bíðilista).

Hetta arbeiðið er ikki liðugt tá um kostnaðir, tíðarætlan, fyrimunir og vansar ræður, men í stuttum eru alternativini eru hesi:

1. Leggja eina forsíðu á verandi skipanina soleiðis, at foreldur einans skulu velja hvørjar dagstovnar tey ynskja at standa á bíðilista til. Síðani fáa tey einans boð, tá ið eitt pláss er tøkt.
   Fyribils niðurstøða: Í mun til onnur alternativ verður mett, at henda loysnin ikki loysir seg vegna stóra manuella arbeiðsorku, tíð og kostnaða. Mett verður, at neyðugt er at hava í minsta lagi 3 ársverk knýtt at skipanini. Meginavbjóðingin er, at verandi skipan ikki hevur bíðilistar innbygda, og skipanin er tá framvegis ein bókingarskipan, men sum krevur nógv størri arbeiðsorku. Avbjóðing er eisini við gjøgnumskygni, m.a. ber ikki til at logga á og fylgja við bíðilistanum.

2. Tillaging av núverandi skipan soleiðis, at hon broytist frá einari bókingarskipan til eina kø-skipan og við nýggjari forsíðu.
   Fyribils niðurstøða: Í mun til alternativ 1, so verður skipanin í hesum alternativi broytt til eina bíðilistaskipan. Hetta sær út sum tann mest upplagda og praktiska loysnin, sum eisini krevur minni manuella arbeiðsorku enn alternativ 1, umframt at foreldur sjálvi kunnu fylgja við bíðilistanum og harvið betur tryggja gjøgnumskygni.

3. Kø-skipan frá KMD, ið verður brúkt av ymsum kommunum í Danmark.
   Fyribils niðurstøða: Hóast vit ikki kenna funkurnar av hesi skipan enn, so kunnu vit ikki vænta hesa loysn verksetta fyrr enn í 2026, um so er at mann ynskir hesa loysn.

4. Byggja heilt nýggja kø-skipan.
   Fyribils niðurstøða: Verður ikki mett sum ein góð loysn, vegna tíð og stóran kostnað av nýmenning.

Umsitingin metir, at arbeiðast eigur víðari við alternativi 2 sum tann besta og haldføra loysnin. Metingin er, at arbeiðið at broyta verandi skipan til bíðilista tekur nakrar fáar mánaðir test íroknað, og tí væntast kostnaðurin heldur ikki at verða stórur.

Sum støðan er í løtuni, so verður miðað eftir, at verkætlanarlýsingini er liðug í hesum mánaðinum. Tengt at hesum er, hvussu skjótt kommunan kann senda kravfesting til veitaran, sum lýsir rímiliga neyvt kriteriuni fyri, hvussu bíðilistaskipanin skal virka, og nær veitarin er klárur við kostnaði og tíðarætlan.

Annað atlit er, hvussu skal bíðilistaskipanin skal setast upp og virka. Yvirskipað er ein spurningur, um kommunan er eitt ella fleiri upptøkuøki?

Annar spurningur er, um innkoyring av børnum er hvønn mánað, ella avmarkað til t.d. fýra ferð um árið?

Eitt triðja er, um foreldur kunnu skriva seg á bíðilista, hóast barnið hevur pláss? Um ja, skulu foreldur, sum hava pláss, men ynskja at flyta stovn, koma framum tey, ið onki pláss hava? Um nei, hvørji útlit eru tá fyri at kunna flyta pláss, tá støði verður tikið í verandi støðu við plásstørvi.

Hesir spurningar eru neyðugir at viðgera bæði viðvíkjandi kravfestingini og upptøkureglugerðini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og KT-leiðarin mæla til at arbeiða víðari við alternativi 2, herímillum at fáa til vega kostaðarmeting og tíðarætlan.

Harumframt verður mælt til, at nevndin umrøður spurningarnar omanfyri, sum eru partar av kravfestingini og upptøkureglugerðini.

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kravfestingin um at broyta bókingarskipanina til at vera ein bíðilistaskipan, er send veitaranum, men enn er óvist, nær hon er liðug.

Fyritøkan Intra hevur víst fram eina app til foreldrasamskifti til stovnar at brúka – sum alternativ til Foreldragluggan, og hevur i hesum sambandi bjóðað seg til eisini at menna eina bíleggingarskipan og tær skipanir, sum verandi skipan annars hevur.

Nevndarformaðurin skjýtur upp, at umsitingin ger eina kravspesifikatión fyri nýggjari skipan, sum inniheldur bíðilistaskipan, foreldraglugga og tær skipanir, sum í dag eru knýttar at verandi skipan, eitt nú fakturering, hagtalsmodul, rættindaskipan v.m., umframt upptøkureglugerð sbrt. dagstovnalógini sum part av krøvunum til bíðilistan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 07. juni 2023:** Samtykt at umsitingin ger kravspesifikatión fyri nýggjari skipan sum omanfyri lýst, og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Ein samd nevnd mælir til at halda fast við avgerðina frá 8. mars 2023 fyri at vita, um skipanin riggar sum ætlað og síðani eftirmeta, um tørvur er á øðrum broytingum.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen, mælir til at venda aftur til skipanina, sum varð brúkt, áðrenn skipanin Barn varð sett í verk, skuldi tað víst seg, at nýggja skipanin ikki riggar sum ætlað.

**Ískoyti:**

Bíðilistaskipanin er í løtuni til royndarkoyringar, ætlanin er, at hon verður almenn at brúka hjá foreldrum mánarðskiftið oktober.

Í hesum sambandi eru upptøkureglurnar tillagaðar nýggju bíðilistaskipanini. Ásett er m.a., at Tórshavnar kommuna er eitt upptøkuøkið, og at foreldur/verjar hava ábyrgd av at seta barn sítt á bíðilista til dagstovn í Tórshavnar kommunu. Til ber at skriva barn sítt á bíðilista upp til 4 ymiskar dagstovnar í kommununi, ið skulu raðfestast sum ávikavist ynski nummar 1, 2, 3 og 4 í talgildu skipanini.

Upptøka til dagstovnarnar í kommununi fer fram fýra ferðir um árið – 1. september, 1. november, 1. februar og 1. mai. Foreldur/verjar skulu taka av tilboðnum um dagstovnapláss innan 5 dagar. Mint verður á at svara tilboðnum um dagstovnapláss tvær ferðir, og er einki svar komið eftir 5 dagar, verður tilboðið og bíðilistaplássið strikað.

Tøk dagstovnapláss verða boðin til tann, sum hevur ynskt pláss til viðkomandi dagfesting ella áðrenn, og sum hevur rætta aldurin eftir fylgjandi fortreytum:

1) Børn, sum hava bíðað á bíðilistanum longst, og sum hava systkin á ynskta stovninum
2) Børn, sum hava bíðað á bíðilistanum longst, og sum longu hava bókað pláss á viðkomandi stovni longri frammi í tíð
3) Børn, sum hava bíðað á bíðilistanum longst, og einki dagstovnapláss hava í kommununi
4) Børn, sum hava bíðað á bíðilistanum longst, men sum longu hava annað dagstovnapláss

Skipanin bjóðar plássið til tann, ið kann byrja sum skjótast, og sum hevur rætta aldurin. Rætti aldurin merkir, at skipanin tekur hædd fyri, at tað skal vera pláss í vøggustovu og barnagarðsstovu fram til barnið verður 7 ár, áðrenn plássið verður boðið út til barnið á bíðilistanum. Tískil er nummarið á bíðilistanum bert vegleiðandi, og ikki ein vissa fyri, at eitt barn, sum stendur longri afturi á bíðilistanum, ikki fær boðið pláss áðrenn.

Foreldur/verjar, ið vitja kommununa í styttri tíðarskeið, kunnu søkja um fyribils dagstovnapláss. Fyribils pláss kann ikki vera minni enn 2 mánaðir og ikki meira enn 6 mánaðir.

Upptøkureglugerðin, sí hjálagt, skal samtykkjast í býráðnum og endaliga góðkennast av Barna- og útbúgvingarmálaráðnum sbrt. §4, stk. 2 í dagstovnalógini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja upptøkureglugerðina fyri dagstovnar í Tórshavnar kommunu undir skúlaaldur.

**Mentamálanevndin 13. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

# 204/23 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrium

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.07.2021 | 196/21 | 21/02924-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 11.05.2022 | 111/22 | 21/02924-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 25.10.2022 | 207/22 | 21/02924-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 26.10.2022 | 272/22 | 21/02924-1 |
| 5 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 234/22 | 21/02924-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 21.03.2023 | 69/23 | 21/02924-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 95/23 | 21/02924-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 66/23 | 21/02924-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.09.2023 | 148/23 | 21/02924-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 219/23 | 21/02924-1 |
| 11 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 204/23 | 21/02924-1 |

**Upprunin til málið**
Økja plásskapasitetin á dagstovnaøkinum sum heild

**Lýsing av málinum**
Í 2019 var útboð um útbygging av tveimum dagstovnum – Dagstovninum á Hamrinum við tveimum stovum og Býlingshúsinum vesturi á Flat við fýra stovum. Býráðið samtykti í tí umfarinum bert at byggja út Býlingshúsið vesturi á Flat.

Stór útstykkingarætlan er í umbúna oman fyri Argjahamar. Í uppskoti hevur verið at byggja nýggjan stovn við síðuna av Dagstovninum á Hamrinum, men annar møguleiki er at taka uppaftur verkætlanina og tilboðið, sum Búsetur vann, um at byggja út Dagstovnin á Hamrinum tó broytt til fimm stovur, ið økir plásskapasitetin við 76 plássum (36 vøggustovupláss og 40 barnagarðsstovupláss).

<u>Lýsing av plásstørvi</u>
Gjørd er nýggj greining av plásstørvinum í Tórshavnar kommunu her og nú og komandi árini, sí skjal. Tilflyting og høg burðatøl seinastu árini gera, at átrokandi tørvur er á fleiri vøggu- og barnagarðsstovuplássum í kommununi bæði her og nú og komandi árini.

Í juni 2021 eru umleið 1.780 stovnspláss í Tórshavnar kommunu 0-6 ár. Talan er um umleið 560 vøggustovupláss og 1.220 barnagarðsstovupláss.

Sbrt. greiningini er tørvurin her og nú á 100-120 fleiri vøggustovuplássum og 90-100 fleiri barnagarðsstovuplássum. Tá er talt við, at á fleiri stovnum eru ov nógv børn inni enn stovnurin er bygdur til, at nógv børn eru 1,5-2 ár, áðrenn tey byrja á stovni (hava bíðað eftir plássi), og aftur onnur, sum eru á ynskilista uttan yvirhøvur at bílagt pláss í skipanini.

Verða hesi stovnsplássini útvegað afturat, hevði plásskapasiteturin verið 660-680 vøggustovupláss (560 í dag) og 1.310-1.320 barnagarðsstovupláss (1.220 í dag).

Um burðatølini árini 2022-2027 vera sum undanfarnu árini uml. 300 um árið og við somu tilflyting uml. 1,5% um árið, so veksur plásstørvurin eitt vet aftrat.

Aftrat avbjóðingini við plásstroti er starvsfólkatrot.

Útbyggja plásskapasitetin
Við Miðstovninum koma nýggj pláss aftrat væntandi um ársskiftið ella stutt eftir. Eftir summarfrítíðina lata nakrar stovur upp í Hoydølum, sum tó er tíðaravmarkað loysn.

Umframt verkætlanina á Hamrinum og seinni Dagstovninum á Argjum, eru aðrir dagstovnar, sum kunnu tillagast og byggjast út til tess at økja plásskapasitin. Hetta verður lýst nærri eftir summarfrítíðina eisini í hvønn mun tað loysir seg í mun til íløguna.

Stóri vøksturin í Hoyvík ger tað tó eisini alneyðugt at byggja nýggjan og helst ríkiliga stóran dagstovn har komandi árini.

Viðvíkjandi útbyggingarætlanini Dagstovnurin á Hamrinum er uppskot um at fáa í lag samráðing um heildararbeiðstøkusáttmála við Búsetur um broytta útbyggingarætlan við støði í tilboðnum frá 2019, sí kostnaðarmeting (skjal).

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Útstykkingarætlanin oman fyri Argjahamar
Vegatkoma frá rundkoyringini Glyvursvegur/Hamarin
Dagstovnurin á Argjum
Útbygging av Dagstovninum á Hamrinum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Upprit um tørvin á dagstovnaplássum nú og framyvir
Kostnaðarmeting/tilboð útbygging á Hamrinum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla nevndini til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um heildararbeiðstøkusáttmála við Búsetur um broytta ætlan at byggja út Dagstovnin á Hamrinum við støði í tilboðnum frá 2019 at leggja aftur fyri nevndina.

**Mentamálanevndin 05. juli 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 11. mai 2022:** Tikið av skrá.

**Ìskoyti:**
Umsitingin hevur tikið upp samráðing um heildararbeiðstøkusáttmála við P/F Búsetur um broytta ætlan at byggja út Dagstovnin á Hamrinum við støði í tilboðnum frá 2019.

Tillagingar eru gjørdar í verkætlanini. Dagstovnurin á Hamrinum er broyttur til 3 barnagarðsstovur og 3 vøggustovur, felagsøki og køk, starvsfólkarúm í miðjuni í bygninginum. Støddin er uml. 1.297m2, 6 stovur tilsamans.

P/F Búsetur boðar frá, at teir klára at byggja dagstovnin fyri uppruna m2 kostnaðin við index regulering. Tá er byggingin í samsvari við byggiskrá frá 13-03-2019.

Avbjóðingar hava verið við atkomuvegi og parkeringsøki rundanum nýggja tilbygningin á Dagstovnin á Hamrinum, tí stórur hæddarmunur er á lendinum og trongt er at útbyggja verandi parkeringspláss.

Avtalað er við Búsetur at gera arbeiðsvegin niðan til komandi Dagstovnin á Hamrinum. Parkeringspláss og atkomuvegur er ikki við í hesum prosjekti, men ein heildarætlan er gjørd fyri økið, har ið hetta arbeiðið verður gjørt liðugt seinni.

Parkeringsviðurskiftini til núverandi Dagstovnin á Hamrinum eru sum nú er í minna lagi. Umsitingin mælir til, at parkerings- og trafikkviðurskiftini skulu vera nøktandi og loyst, áðrenn verkætlanin er liðug. Talan er um tvífaldan tørv av parkeringsplássum, sum fáast skulu til vega.

Uml. kr. 450.000 kr eru settar av í tilboðnum hjá P/F Búsetur til spælipláss. Hetta er ikki nøktandi til at gera eitt fullgjørt og nútíðarhóskandi spælipláss. Meiri peningur má tí setast av til hetta seinni.

Tilboð frá P/F Búsetur við indexregulering og við øllum er kr. 54.038.606,00 v/ kommunalum mvg.

Innanfyri ein samlaðan karm uppá kr. 57 mió mvg íroknað er fíggjað arbeiðsvegur, tryggingar, listprýði, íbindingar v.m.

Tó er atkomuvegur, parkeringspláss og liðugtgerð av spæliplássi ikki íroknað.

Í sambandi við útbyggingina er neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri økið.

**Fígging**

Tøkur peningur er kr. 31.000.000 á íløgujáttan innan grein 3 Børn og ung. Møguleiki er at fíggja kr. 10.000.000 í fíggjarætlanini fyri 2023, og at játta restupphæddina uppá kr. 16.000.000 í fíggjarætlanini fyri 2024.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til, at:

- Samtykt verður at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum eftir omanfyristandandi leisti.
- Umsitingin fær heimild at taka av tilboðnum og at gera heildararbeiðstøkusáttmála við P/F Búsetur um at byggja út Dagstovnum á Hamrinum.
- Játta samlaða kostnaðin á kr. 57.000.000, fíggjað soleiðis:
    - kr. 30.000.000 verða fluttar av stovnsnummar 3175, LK31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum,
    - 1.000.000 verða fluttar av stovnsnummar 3175, LK31013 Nýggjur dagstovnur á Argjum,
    - kr. 10.000.000 verða játtaðar í fíggjarætlanini fyri 2023,
    - restupphæddin kr. 16.000.000 verður játtað í fíggjarætlanini fyri 2024, og at
    - fíggingin verður flutt til nýggja verkætlan 3175, L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.
- Heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting av byggisamtyktini fyri økið.

At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið. Koma broytingar fyri skal málið fyri nevnd aftur.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Enmælt samtykt.

**Ískoyti**
Avbjóðingar hava verið við at gera atkomu og byggipláss inn til Dagstovnin á Hamrinum. Atkoma og byggipláss liggja inni á arbeiðstøkumarkinum at gera útstykkingina oman fyri Argjahamar (ÚOA) hjá MT Højgaard Føroyar (hereftir MTH) við undirarbeiðstakaranum RTS Bygging. Atkoman og byggiplássið kunnu eftirfylgjandi gerast partur av atkomu og parkeringsøki til tann útbygda dagstovnin á Hamrinum.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við MTH um at gera hetta arbeiðið sum eykaarbeiði við somu eindarprísum sum í verkætlanini ÚOA. Hetta er játtað og endaliga tilboðið frá MTH er kr. 1.940.252,50 við mvg.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til, at:

- Samtykt verður at fylgja omanfyristandandi leisti.
- Umsitingin fær heimild at taka av omanfyristandandi tilboði hjá MTH.
- Játta samlaða kostnaðin á kr. 1.940.252,50 kr við mvg. fíggjað soleiðis:

- Verkætlan L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar leggur út fyri omanfyri lýsta jørðarbeiðið í 2023.
- Kr. 1.940.252,50 við mvg verða játtaðar í fíggjarætlanini fyri 2024.

- Fíggingin verður flutt til verkætlan 3175, L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum.
- L31011 Útbygging Dagstovnurin á Hamrinum endurrindar í 2024 verkætlanini L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar fyri goldin útlegg. Verkætlanarleiðarin fyri L64019 hevur ábyrgd av at gera eina uppgerð innan 1. mars 2024 og at senda uppgerðina til fíggjardeildina.

-At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

Arbeiðið hjá undirarbeiðstakaranum RTS Bygging á útgrevstur, spreinging og planering fyri atkomu og byggipláss til Dagstovnin á Harminum er liðugt. Klárt er nú hjá P/F Búsetur at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum.

Sáttmáli at útbyggja Dagstovnin á Hamrinum varð undirskrivaður 23.11.2022 millum Tórshavnar kommunu og P/F Búsetur.

Í sambandi við, at avbjóðingar hava verið við at gera atkomu og byggipláss inn til Dagstovnin á Hamrinum, krevja P/F Búsetur endurgjald fyri ampa, mistan vinning og beinleiðis útreiðslur, sum Búsetur hevur havt av, at arbeiðið ikki kundi setast í gongd sambært sáttmála um útbygging av Dagstovninum á Hamrinum, dagfestur 23.11.2022. Somuleiðis hevur tíðarætlanin forskotið seg, soleiðis at arbeiðið hjá P/F Búsetur nú verður meiri tarnað av vetrartíðini enn áður ætlað.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við Búsetur um krav á endurgjald fyri ampa, mistan vinning og beinleiðis útreiðslur, sum Búsetur hevur havt av, at arbeiðið ikki kundi setast í gongd.

Umsitingin hevur biðið P/F Búsetur gera nýggja tíðarætlan, sum skal leggjast við í eina endurgjaldsavtalu. Semjan er treytað av, at alt yvirskotsgrót frá verkætlanini Dagstovninum á Hamrinum kann koyrast út á økið innanfyri 1 km, sum báðir partar eru samdir um. Somuleiðis er semjan treytað av, at býráðið góðkennir endurgjaldsavtaluna.

Endurgjaldsavtalan er áljóðandi 900.000 kr u/mvg, sum svarar til ein samlaðan kostnað á 956.250 kr í mvg (6,25%).

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja endurgjaldsavtalu millum P/F Búsetur og Tórshavnar kommunu og í tí sambandi at játta kr. 956.250 íroknað mvg av fíggjarætlanini 2025 til kontu 3175 Barnaansing, L31011 Útbygging, Dagstovnurin á Hamrinum. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

# 205/23 Róðrarfelagið Knørrur : Umsókn um fíggjarligan stuðul

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.09.2023 | 152/23 | 23/05067-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 221/23 | 23/05067-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 205/23 | 23/05067-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn.

**Lýsing av málinum**
Róðrarfelagið Knørrur søkir um stuðul kr. 1 mió í sambandi við nýtt róðrarneyst í Álakeri.

Felagið hevur projekterað bygning, sum skuldi vera 750 m2, men broytingar í ætlanini viðvíkjandi sjálvum Álakeri gjørdi, at felagið mátti minkað ætlanina niður í 600 m2.

Felagið hevur eyka og óvæmtaðar útreiðslur av hesum, tí at partar av prosjekteringini mátti gerast umaftur og broytast. Hetta ávirkar teirra gjaldføri, nú felagið ger prosjekteringina lidna. Felagið ynskir tí at fáa játta kr 1 mió stuðli, sum felagið hevur fingið upplýst er markað til teirra byggiverkætlan.

Talan er um játtan, sum er tøk á kontu 5370 Stuðul til íløgur, ið felagið ynskir at fáa goldnað frávik frá leiðreglunum §5.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Leiðreglur um stuðul til íløgur
§3, stk. 3: Stuðulin er í mesta lagi 30% av metta byggikostnaðinum.
§5, stk. 1: Um serligar umstøður tala fyri tí, kann býráðið
víkja frá ásetingunum í hesi reglugerð.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Blað nr.: 840<br><br>Formansins merki: |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjóri og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndin itil at játta kr. 1 mió í stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur sum frávik frá leiðreglunum. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>28. september 2023 | Blað nr.: 841<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 206/23 Vøllurin inni í Vika – nýggj ljósskipan v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 17.01.2023 | 19/23 | 23/00098-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.01.2023 | 6/23 | 23/00098-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 16/23 | 23/00098-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 13.09.2023 | 162/23 | 23/00098-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 223/23 | 23/00098-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 206/23 | 23/00098-1 |

**Upprunin til málið**
Nýggj ljós til vøllin inni í Vika, sbrt. krøvum frá FSF.

**Lýsing av málinum**
Sbrt. vallarreglugerðini hjá FSF er kravið til stadion-ljós styrki uppá í minsta lagi 250 EV(lx). Kravið hevur verið galdandi í nøkur ár, og verandi ljósskipan lýkur ikki hesar treytirnar. Sostatt hevur leikvøllurin inni í Vika verið góðkendur upp á undantak seinastu árini. Verandi ljósskipan er heldur ikki nøktandi til vanligar venjingar.

Sbrt. mál 22/06615 (eykajáttan av meirinntøkum 2022) samtykti býráðið at seta kr. 3 mió. av til m.a. nýggja ljósskipan við vøllin inni í Vika.

Neyðugt er at gera ávísar kanningar av verandi mastrafundamentum og sjálvum mastrunum. Eisini skal kannast, hvør ljósskipan er best hóskandi fyri at uppfylla treytirnar í Vallareglugerðini hjá FSF, harafrtat skal hædd takast fyri ljósdálking. Royndirnar frá nýggju ljósskipanini á Ovara vølli verða eisini tiknar við.

Tíðarætlanin er, at øll ráðgeving viðv. mastrarfundamentum, mastrum og ljósskipan, harundir eisini møguliga atknýtt el-arbeiðir, er liðug um miðjan mars, so at útboð kunnu fara fram til várs, og at ljósskipanin er liðug at taka í nýtslu fram móti heystinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Vallarreglugerð FSF

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Ljósskipanin á Ovara vølli
Ljósskipanin til Tórsvøll

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Blað nr.: 842 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57039 | Fótbóltsvallir | 5775 | L57043 | Ljósskipan inni á Vika | Ja | 3.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 3.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at fáa til vega ráðgeving viðv. tekniskum installatiónum í sambandi við at fáa nýggja ljósskipan, og at umsitingin fær heimild til at bjóða út nýggja ljósskipan at leggja fyri nevnd til støðutakan.

Harumframt verður mælt til at játta kr. 3.000.000 av løgukarmi LK570390 til nýggja løgujáttan Ljósskipan inni á Vika. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við LBF innheintað tvey undirhondsboð upp á nýggja ljósskipan við mastrum og við tilhoyrandi útgerð. Samráðst hevur verið við báðar, ið bodnir vórðu at koma við undirhondsboði.

Undirhondsboðið frá Musco varð endaliga tað lægra, og uppfyllir tey flestu av krøvunum, ið vórðu sett báðum teimum bjóðandi.

Úrslit av undirhondsboðunum:

- Musco kann veita ljósskipan við rundum lukkaðum mastrum fyri 1,18 mió kr. u/mvg.
- Innstall kann veita ljósskipan við gittarmastrum fyri 1,48 mió kr. u/mvg.

Mælt verður til at taka av lægra undirhondsboðnum.

Onnur arbeiðir og veitingar í sambandi við verkætlanina
Undirhondsboðini fevna ikki um leiðingar í lendi fram til fundament, niðurtøkuarbeiði, grevstur og stoyping av nýggjum fundamentum. Fyri hesi arbeiði og veitingar er gjørd kostnaðarmeting, har roknað er við einum samlaðum kostnaði – ljós og fundament v.m., uppá kr. 3,12 mió mvg og ókent íroknað. Tøka játtanin á L57041 Vøllurin inni í Vika er kr. 3 mió. Tær kr. 120.000 kunnu fíggjast av løgukarmi LK57039 Fótbóltsvallir.

Ætlanin er, at vøllurin inni í Vika hevur nýggja ljósskipan, svarandi til krøvini hjá FSF til leikvøllir í meistaradeildini, tíðliga í 2024.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gera sáttmála við Musco um ljósskipan við mastrum og tilhoyrandi útgerð fyri kr. 1,18 mió u/mvg av kontu 5775 Ítróttaanlegg L57041 Vøllurin inni í Vika.

Vísandi til samlaðu kostnaðarmetingina verður mælt til at játta kr. 120.000 av løgukarmi LK57039 til løgukontu L57041 Vøllurin inni í Vika. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælnum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

# 207/23 Hegnskylda, skjótibreytin o.a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.06.2023 | 142/23 | 23/03495-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 05.07.2023 | 211/23 | 23/03495-1 |
| 3 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 185/23 | 23/03495-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 207/23 | 23/03495-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna hevur hegnskyldu á skjótibreytini í Sandvíkum. Onki hegn er sett upp og nógvur seyður sleppur inn á skjótibreytina.

Seyðurin sleppur eisini víðari frá skjótibreytini og niðan á landsvegin. Borgarar sostatt hava klaga um leysgangandi seyð á landvegnum, tí vandi kann standast av hesum.

**Lýsing av málinum**
Støðan á skjótibreytini í Sandvíkum er tann, at tað sleppur nógvur seyður inn á breytina. Skjótifelagið hevur gjørt vart við, at støðan er til miklan ampa fyri teirra dagliga virksemi, og so gongur tað eisini út yvir grasvøksturin á breytini (serliga á vollanum).

Aktingarmaðurin hevur verið á ástaðisfundi við Hegnsýnisnevndini og bóndanum. Á fundinum er staðfest, at seyðurin hevur frítt at ganga inn á økið hjá Byrsumúla, og sleppur so harífrá beinleiðis niðan á landsvegin. Borgarar hava klagað um leysgangandi seyð á landsvegnum.

Hegnssýnisnevndin hevur sostatt í skrivi heitt á kommuna um at fáa hesi viðurskiftini í rættlag beinavegin.

Ein niðurstøða á hesum ástaðisfundinum var, at frægasta loysn er at hegna á ella framvið øllum vollanum. Umsitingin metir, at tað eru tveir møguleikar at hegna framvið vollanum.

Fyrsti møguleikin at gera hegn niðanfyri vollanum, tvs. móti fjøruni. Hetta kann gerast eitt sindur drúgt, alt eftir hvussu nógv fólk gera arbeiðið, tí har er stórt grót, lendið er óslætt, bæði aftur og fram, og upp og niður. Ein tílík verkætlan kann eisini blíva dýr, og av tí at fjøran/hellan er ber niðan í vollan (av brimi), so er møguleikin stórur fyri, at bæði hegn og stólpar verða oyðiløgd, tá veðrið fer at leika í.

Annar møguleikin er at hegna uppi á vollanum. Har er meira slætt, og tað gevur nógv minni avbjóðingar. Tó so, so skulu pelarnir borast niður í gróti á vollanum. Tilboð er komið inn frá fyritøku um at seta seta hegnið upp á vollan, har teir gera sær ómak við, at ovasti partur av hegninum er javnur. Hæddin á stólpunum verða eitt sindur ymiskir. Tilboðið liggur sum eitt notat í skjal 23/03495-2 í hesum málinum.

Ongin faklig meting er gjørd, um hvussu hegnið fer at síggja út reint estetiskt, um tað verður sett upp á vollan. Harafturat er skjótifelagið ikki samt um, hvar frægast er at hegna.

Ein annar møguleiki er, at kommunan fær fund í lag við bóndan um eina alternativa loysn, sum er at hegna soleiðis, at seyðurin ikki sleppur at ganga niðri í fjøruni/niðanfyri vollanum. Tá krevst at hegnað verður út á sjógv. Vansi við hesum er, at so má hegn og stólpar áhaldandi setast upp aftur eftir tørvi, tá brim hevur verið.

Málið hevur skund viðvíkjandi at kravboðini um at fáa hegnað økið av.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Hegnskylda.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á løgukarmi 5775 Ítróttaanlegg LK57033 Byrsumúli, skjótibreyt, eru kr. 370.000 tøkar til endamálið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
15/03761 Nevndarsamtyktir, Veiðifelagið Byrsumúli: Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Tilboð upp á at seta hegn upp á vollanum, liggur sum eitt notat í skjal 23/03495-2 í hesum málinum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at hegna á vollan og í hesum sambandi flyta kr. 370.000 av kontu 5775 Ítróttaanlegg LK57033 Byrsumúli, skjótibreyt at flyta til kontu 5717 Ítróttaanlegg. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. juli 2023:** Samtykt at játta kr. 370.000 kr. til hegn av kontu 5775 Ítróttaanlegg LK57033 Byrsumúli, skjótibreyt á kontu 5717 Ítróttaanlegg og at beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð at játta kr. 370.000 kr. til hegn av konto 5775 Ítróttaranlegg LK57033 Byrsumúli, skjótibreyt á konto 5717 Ítróttarannlegg.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 208/23 Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 13/20 | 20/00622-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 61/20 | 20/00622-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 31/20 | 20/00622-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 128/20 | 20/00622-1 |
| 5 Ferðslunevndin | 24.06.2020 | 16/20 | 20/00622-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 42/21 | 20/00622-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 08.03.2021 | 18/21 | 20/00622-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 57/21 | 20/00622-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 89/21 | 20/00622-1 |
| 10 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 120/21 | 20/00622-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 19/22 | 20/00622-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 75/22 | 20/00622-1 |
| 13 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 62/22 | 20/00622-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 132/23 | 20/00622-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 228/23 | 20/00622-1 |
| 16 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 208/23 | 20/00622-1 |

**Upprunin til málið:**
Bygging á Karlamagnusarbreyt er komin væl ávegis, og eru flestu økini bygd ella er bygging í gongd. Sum økið við Karlamagnusarbreyt nærkast at verða liðugt, vísir tað seg at nógvar avbjóðingar eru í økinum. Økið er sera tætt bygt, og er týdningarmikið at tær ymisku avbjóðingarnar verða loystar í einari heildarætlan.

Tí er avgjørt at umsitingin fer undir eina tilgongd saman við borgarunum og áhugaðum í økinum fyri at gera eina tillagaða heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin er farin undir eina tilgongd, har endamálið er, at ein tillagað heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt verður gjørd.

Økið við Karlamagnusarbreyt hevur í verandi støðu fleiri avbjóðingar. Avbjóðingarnar kunnu í høvðusheitum deilast upp í trý evni: ógreið parkeringsviðurskifti, ringar umstøður til gongu- og súkkluferðslu og manglandi fríøki til borgararnar.

Heildarætlanin skal bæði vísa á loysnir uppá tær nágreiniligu avbjóðingarnar í økinum, men hon skal eisini koma við einum boði uppá hvussu økið kann fríðkast og Karlamagnusarbreyt kann gerast ein grøn og vøkur býargøta við trivnaði í hásæti.

Umsitingin hevur í eina tíð arbeitt uppá at greina tær veruligu avbjóðingarnar í økinum og hevur eitt boð uppá møguleikar fyri at loysa hesar avbjóðingarnar.
Í hesum sambandi verður farið undir eina tilgongd saman við borgarunum í økinum og teimum sum hava sína dagligu gongd í økinum. Tey eru boðin inn til verkstovur, har tey fáa møguleikan at vísa á teirra fatan av hvørjar avbjóðingar og hvørjir møguleikar eru fyri loysnum.

Aftaná at verkstovurnar hava verið, samlar umsitingin heildarætlanina fyri Karlamagnusarbreyt, við støði í loysnum sum hava verið viðgjørdar á verkstovunum við borgarar í økinum.
Heildarætlanin verður í framtíðini grundarlag fyri menning av økinum við Karlamagnusarbreyt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
20/00040 Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
20/00622-5 Viðmerkingar frá borgarum
20/00040-1 Skipan av økinum kring Hoyvískvøll
20/00622-7 Parkeringstørvur
20/00622-8 Kostnaðaryvirlit – ikki endaligt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Orsakað av koronasmittu, vórðu allar borgaraverkstovurnar avlýstar og ístaðin varð skipað fyri einari talgildari borgaraluttøku, har borgarar fingu møguleikar at siga teirra meining um Karlamagnusarbeyt og koma við ynskjum til betringar. Talgilda luttøkan lá opin í 3 vikur, og komu svar frá 233 borgarum.
70 frá íbúgvum á Karlamagnusarbreyt, 127 frá íbúgvum í búgva í grannalagnum og 36 frá fólki aðrastaðni í kommununi.

Nógvar viðmerkingar vóru afturvendandi. Allar viðmerkingarnar eru skrásettar og flokkaðar (sí skjal 'viðmerkingar frá borgarum'). Út frá hesum og vitan, sum kommunan longu hevur um øki, eru serliga fýra evnir, ið ganga aftur.
Hesi evnini eru við til at skapa grundarlagið í uppskoti til endurskoðan av Karlamagnusarbreyt 20/00622-7 Plantekning 05.06.20

- **Parkering**
  Tá alt er bygt liðugt á Karlamagnusarbreyt er tørvur á uml. 600 p-plássum. Verandi øki, ið eru avsett til parkeringspláss rúma uml. 580 pláss (sí skjal 20/00622-7 parkeringstørvur. Parallell- og lodrættparkering er teknað inn á øll øki har, sum pláss er fyri at venda einum bili. Millum bygningarnar,

har parkering ikki rúmast, er grøn fríøki teknað inn. Í uppskotinum hava øll parkeringspláss grønar eindir, so sum gróðurseting við innkoyringarnar og summi hava grasarmering.
Sum nú er, eru øki til rusk ikki skipað á økinum. Ruskinnsavningin hevur gjørt vart við, at ruskbilurin hevur avbjóðingar við at sleppa til felags ruskøkini. Tískil eru felags ruskstøðir teknaðar inn á tvey tey fyrstu p-plássini á 12 parkerings økjum javnt býtt niðaneftir Karlamagnusarbreyt. Hugskotið er, at allar ruskstøðirnar skulu vera eins og vera eitt estetiskt íkast til økið.

- **Gøtu og gonguleiðir**

Gonguteigar eru gjørdir millum allar bygningarnar og fram við allari Karlamagnusarbreyt. Harafturat eru snargøtur ætlaðar fyri at binda ymsu økini saman, skapa trygd frá bilum og fyri at skapa styttri leiðir til t.d. bussin.

- **Vegurin Karlamagnusarbreyt**

Allur vegurin skal skipast av nýggjum. Ætlanin er at skipa vegin við einvegis ferðslu, soleiðis at tað einans verður loyvt at koyra niðaneftir. Ferðsluforðingar, sum eru gróðursettar á vegnum, verða gjørdar fyri at raðfesta trygdina hjá fólki, ið ikki eru í bili. Neyðugt verður við parkering fram við vegnum í støðum. Og av tí at ferðslan er einvegis verður hetta ikki ein trupulleiki, tí vegurin er nóg breiður.

- **Fríðkan og umskapan av økinum í mun til trivna**

Fyri at skapa litir og ein øðrvísi dám í økinum, er ætlanin at gróðurseta við innkoyringina millum allar bygningarnar, á vegunum sum ferðsluforðingar og í skráum við Bertrugøtu, Maritugøtu og millum Ingibjargargøtu/Torkilsgøtu.
Harafturat verður tað gróðursett millum øll øki har, sum tað hóskar.
Uppskot til skipan av Hoyvíksvølli er gjørt, og sent til hoyringar hjá avvarðandi feløgum og felagsskapum. Økið við Hoyvíksvøll er m.a. skipað við inngongd til vøllin, einari sititrappu til áskoðarar, einum felagshúsi/skýli og parkeringsøki (sí skjal 20/00040 plantekning - Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll).
Ynskiligt er at skipa økið framman fyri Hoyvíkar Kirkju sum eitt alment torg, sum borgarar kunnu brúka til uppihald og felagsátøk.

**Skjøl:**
20/00622-5 viðmerkingar frá borgarum
20/00622-7 parkeringstørvur
20/00622-7 Plantekning 05.06.20
20/00040-2 plantekning – skipan av økinum kring Hoyvíkvøll

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla teknisku nevnd og býarskipanarnevndini til:
1. at umrøða uppskot til heildarætlanina
2. at koyra uppskotið til heildarætlan út til almenna hoyring
3. at tillagaða heildarætlanin skal leggjast fyri aftur til politiska støðutakan, tá hon er tillagað í mun til innkomnar viðmerkingar.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ferðslunevndin 24. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Heildarætlanin varð framløgd á borgarafundi á skúlanum við Løgmannabreyt í okt. 2020. Nógv fólk var til borgarafundin, og nógvar viðkomandi viðmerkingar vóru til ætlanina.

Heitt varð á íbúgvararnar í økinum um at skipa seg í eigarafeløg fyri tey 6 økini, sum Karlamagnusarbreyt er skipað eftir, soleiðis at samskifti millum kommunu og borgararnar í økinum er umboðandi áhugan í økinum. Skriv er eisini sent út til umboð fyri økini, um at royna at skipa seg í eigarafelag, ella at velja umboð fyri hvørt øki, at hava samskifti við kommununa um ymisku felags viðurskiftini.
Á borgarafundinum varð serliga gjørt vart við manglandi parkeringsplássini í økinum. Tikið varð ikki undir við loysnini at gera parkering og gjøgnumkoyring við Hoyvíkar skúla. Heldur varð heitt á Býráðið um at taka nøkur stykkir innaftur, soleiðis at parkeringstørvurin minkar, og at parkeringin kann skipast á innafturtiknu stykkjunum. Gjørt varð eisini vart við tørvin á felagsøkjum og fríðkan í økinum, at gera tryggari skúlaleiðir. Tikið varð ikki undir við at einsrætta Karlamagnusarbreyt, víst varð á trupulleikarnar við hesi loysn.
Borgarar í økinum hava síðani heitt á kommununa um at fyrireika økið, so at løðistøðir til el-bilar lættliga kunnu fremjast, tá ið eigarafeløgini ynskja tað.
Somuleiðis hava borgarar víst á at ruskinnsavningin er óskipað, og somuleiðis hevur ruskinnsavningin gjørt vart við, at tørvur er á at fáa skynsama loysn til bingjur í økinum, til burturkast, glas og papp.

Aftaná fundin varð farið undir átøk at betra um skúlaleiðir hjá børnum og at fríðka um økið.
- Gøta javnfjar millum Karlamagnusarbreyt og Bertugøtu er framd.
- Gróðurseting við Myllutjørn er framd.
- Gróðurseting við parkeringsøki er framd

Harumframt eru fleiri reinsiverk gjørd, at betra um kloakkskipanina í økinum.

Ferðsluserfrøðingar gjørdu í desember ferðslukanningar og gjørdu uppskot til hvørjar ferðsluloysnir hóska best til økið. *Sí skjal J. Nr. 20/00622-24 Ferðsluplanlegging útgáva 22.01.21.pdf*

Umsitingin hevur tillagað heildarætlanina, við støði í viðmerkingum á borgarafundinum, sí skjal *20/00622-30 KMB samlað* og *20/00622-30 Framløga politiska viðgerð 2021* og mælir til hesi átøk:

- Aftaná borgarafundin hevur Býráðið keypt 2 stykkir aftur, sum parkering kann skipast á. Á hetta økið fáast uml 85 parkeringspláss, og eigur hetta at vera sett í verk beinanveg. Møguligt er at fáa fleiri parkeringspláss á økið, umframt at økið kann innrættast til eitt felagsøki, men hetta krevur at økið verður raðfest sum ein verkætlan.
- Innkoyringin til Skúlan á Løgmannabreyt verður umskipað, soleiðis at sýnið verður betri, og parkeringin verður eisini umskipað.
- Vegurin verður 30 km/t vegur, og verður skipaður, soleiðis at gongubreyt er á báðum síðum, gøtuljós verða sett í gongubreytarkantin, súkklur og bilar deilast um vegbanan, 2 minus 1, og við vegamót verða 'rumlur' við chaussesteinum ella líknandi, so mint verður á at halda lága ferð, umframt at plantað og fríðkað verður á økinum.
- Vegurin verður ikki einsrættaður, men innkoyring bannað frá vegamótinum Skúlin á Løgmannabreyt omaneftir. Hetta fyri at fáa ovaru økini í Hoyvík at koyra omaneftir Løgmannabreyt heldur enn gjøgnum Karlamagnusarbreyt. (hetta er eitt ynski frá borgarum í økinum).
- Dragirør verða løgd til øll parkeringsøki, so nøktandi ljós kann tryggjast í økinum.
- Spæli- og trivnaðarøki verða gjørd.
- Farleiðir og gøtur verða gjørdar at bøta um skúlaleiðirnar.
- Fleiri øki, serliga tey, ið ikki kunnu rúma parkering, verða løgd við grasarmering heldur enn asfalt, fyri at fríðka um.
- Uppskot er gjørt til standardleist, at skipa ruskøki við øll parkeringsøki, sum eigarar eiga í felag. Vatn og frárenningar skulu leggjast til hesi øki, ið eisini kunnu fyrireikast til postkassar og framtíðar talvur til el løðistøðir.
- Støða skal takast til, um hendan loysnin skal góðkennast av eigarafeløgunum, hvussu hetta kann skipast og hvør skal gjalda fyri felags skipanina.
- Ynskir Tórshavnar kommuna at gjalda fyri hesa loysnina fyri eigarafeløgini, um tey taka undir við teimum.
- Dragirør verða løgd í tey økini sum ikki eru asfalterað, soleiðis at billøðistøðir lættliga kunnu setast, tá ið eigarafeløgini ynskja tað.

Parkeringin:
Við hesum uppskotinum fáast 503 parkeringspláss afturat teimum 91, sum hoyra til Skúlan við Løgmannabreyt.
Sambært givnum byggiloyvum higartil, er tørvur á 464 parkeringsplássum.
Tá ið alt økið er fult útbygt, verður tørvur á 525 parkeringsplássum at nøkta krøv sambært byggisamtyktini. Hesin tørvur kann røkkast, um afturkeyptu matriklarnir verða innrættaðir við einum parkeringshúsi ella við einum parkeringsdekki.

Fleiri av omanfyri nevndu átøkunum kunnu metast sum Skjótt Syftir Seiðir, og kunnu setast í gongd skjótt.

Størri átøk ella Tyngri Tøk eru eisini neyðug í sambandi við liðugtgerð av Karlamagnusarbreyt, og skulu loysast og prosjekterast sum serstakar verkætlanir.

Av hesum kunnu nevnast:
- Torg til Hoyvíkar kirkju.
- Parkeringshús/borgarahús/felagshús á afturkeyptu stykkjunum.
- Trivnaðarøki við Atlagøtu.
- Farleið gjøgnum grøna geiran millum fótbóltsvøllin og Atlagøtu.

Av omanfyrinevndu átøkunum verður mælt til beinanvegin at fara undir tey átøkini, sum eru serliga átrokandi og kunnu lýsast sum Skjótt Syftir Seiðir.

Hesi eru:
- Umskipan av innkoyring við Skúlan við Løgmannabreyt, og skipan av parkering og fríðkan á økinum.
- Inn- og útkoyring frá Atlagøtu til Bónus
- Skipa parkering á afturkeyptu stykkjunum, planta og fríðka
- Gongubreytir frá Atlagøtu til Skúlan við Løgmannabreyt, (vegur 2 og 3)
- Dragirør og fyrireikingar til framtíðarloysnir í sambandi við asfaltering.

Heildarætlanin er ikki prosjekterað, og kostnaðarmeting er ikki gjørd av arbeiðinum. Mælt verður til at 8 mió. verða settar av til arbeiðið í 2021.

Skjøl:
20/00622-24 Ferðsluplanlegging útgáva 22.01.21.pdf
20/00622-30 KMB Samlað
20/00622-30 framløga politiska viðgerð 2021

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at
1) tikið verður undir við heildarætlanini fyri Karlamagnusarbreyt,
2) seta átøkini nevnd sum "Skjótt Syftir Seiðir" í verk,
3) játta kr. 8 mió. til verkætlanina, skipað og fíggjað soleiðis:
   a) Øll verkætlanin verður skipað undir konto 6475, L64015, Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a.
   b) Kr. 3.000.000 verða fluttar av konto 6275, L62043, Karlamagnusarbreyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss, á konto 6475, L64015, Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a.
   c) Kr. 900.000 verða fluttar av konto 8175, L00002, framfluttur løgukarmur
   d) Kr. 4.150.000 verða fluttar av konto 8175, L00001, løgukarmur fyri árið
4) Beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Tekniska nevnd 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.
**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við fyrstu viðgerð við tíggju atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Ruth Vang og Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Gunvør Balle.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið sambært býráðssamtykt í 2021. Við árslok 2021 eru kr. 874.382 eftir á játtanini til arbeiðið á kr. 9.950.000 og við útistandandi arbeiðum er játtanin uppi pr. februar 2022. Arbeitt hevur verið við at røkka átøkunum «Skjótt syftir seiðir» og hevur arbeiðið verið skipað við tveimum verkætlanarleiðarum: einum fyri økið niðan fyri Atlagøtu og einum omanfyri.

Í sambandi við arbeiðini oman fyri Atlagøtu er gjørdur sáttmáli við J og K Contractors at gera:

- Nýggja innkomu til skúlan við Løgmannabreyt
- Nýtt parkeringsøki millum verandi parkeringsøkið við skúlan við Løgmannabreyt
- Umskipan av parkeringsøkinum við skúlan við Løgmannabreyt
- Gongubreytir fram við vegnum millum Rólantsgøtu og Atlagøtu sambært heildarætlanini
- Skipa gøtuljós sambært heildarætlanini á sama strekki
- Skipa leiðingar o.l. til framtíðarloysnir inni á túnum og parkeringsøkjum millum bygningarnar

Sáttmálin fyri hesi arbeiðir er á uml. 5,25 mió. kr. v/mvg. Í 2021 er arbeitt fyri uml. 3 mió. kr. og resta tí arbeiðir fyri uml. 2,25 mió. at blíva gjørd her. Hetta umfatar liðuggerð av øllum punktum omanfyri. Um hesi arbeiðir ikki verða gjørd liðug, kann ferðsla í økinum ikki henda á tryggum grundarlagi, umframt at hetta við vissu vil viðføra sera stóra ónøgd millum borgarar í økinum. Eisini skal roknast við, at endurgjaldskrav kann koma frá arbeiðstakaranum fyri brotnan sáttmála. Tí er arbeiðið ikki steðgað enn, vegna sera lágt virksemi orsakað kavan í januar og februar. Men verður játtanin ikki økt, verður arbeiðið steðgað.

Umframt hesi arbeiðir, eru økini millum bygningarnar blivin liðugtgjørd undir arbeiðstøku av RJ Brockie, so hvørt, sum tey hava verið klár frá byggiharranna síðu.

Hetta hevur inniborið:

- Eftirlit og møguliga umvæling av avvandingarskipanum
- Fínplanering
- Uppsetan av gøtuljósum
- Uppsetan av kantsteinum at tryggja brunaleiðir

Í sambandi við arbeiðini niðan fyri Atlagøtu, hevur RJ Brockie staðið fyri at:

- Skipa parkering á afturkeyptu stykkjunum, planta og fríðka
- Liðugtgera økini millum bygningarnar, so hvørt sum økini hava verið klár frá byggiharranna síðu, herundir:
    - Eftirlit og møguliga umvæling av avvandingarskipanum
    - Fínplanering
    - Uppsetan av gøtuljósum
    - Uppsetan av kantsteinum at tryggja brunaleiðir

RJ Brockie hevur framt hesi arbeiðir upp á rokning. Í 2021 eru brúktar 5,47 mió. kr. til hesi arbeiðir. Verkætlanarleiðarin upplýsir, at arbeiðir fyri uml. 5,5 mió. kr. resta í fyri at hesi arbeiðir verða liðug. Henda arbeiðstøkan er steðgað.

Viðmerkjast skal, at nýtslan av játtanini í stóran mun er nýtt til at liðuggera økini millum bygningarnar, sum annars ikki eru partur av játtanini frá 25. mars 2021. Til hetta arbeiðið eru kr. 2.400.000 játtaðar í februar 2020. Men hetta er als ikki nøktandi í mun til tey økir, sum eru blivin liðugtgjørd.

Samanlagt resta tí uml. 7,75 mió. kr. í fyri at gera arbeiðini liðug, umframt 650 tkr. til at asfaltera Karlamagnusarbreyt millum Atlagøtu og Rólantsgøtu, tá arbeiðini eru liðug.

Umsitingin metir, at tað er neyðugt at umraðfesta innan íløgukarmin, fyri at fáa til vega hesar upphæddir, fyri at arbeiðini ikki steðga upp við teimum avleiðingum, sum tað kemur at hava við sær.

Skjal:
20/00622-60 220223_Frágreiðing av KMB Status.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 8.400.000 til liðuggerð av umrøddu arbeiðum. Mælt verður til at kr. 3.000.000 verða fluttar av løgukarminum LK81998 Parkering, undir konto 8175 Vegir (Íløgur) og kr. 5.400.000 av verkætlan L61024 undir konto 6175 Umsiting og røkt fastari ogn (íløgur) til verkætlanina L64015 Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a., undir konto 6475 Byggibúning bústaðir (íløgur), og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at játtaðar verða kr. 8.400.000 til liðuggerð av umrøddu arbeiðum. Mælt verður til at kr. 8.400.000 verða fluttar av konto 8175 Vegir (íløgur), kr. 3.000.000 av LK81998 Parkering og kr. 5.400.000 av LK81037 Innkomuvegur.

Upphædin skal flytast á nýggja verkætlanarkonto á 8175 Vegir.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Játtanin til kontu L62043 Karlamagnusarbreyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss varð flutt á kontu L64015 Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a. í mars í 2021. Av misgáum er prosjektløn ísv. heildarætlanina í 2020 ikki goldin, áðrenn játtanin varð flutt, og eigur prosjektløn 2020 tí at verða goldin av kontu L64015 Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a., og konta L62043 Karlamagnusarbreyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss at verða lokað nú.

Heildarætlanin, sum varð fíggjað av L62043 er liðug, og restupphæddin er áljóðandi kr. -105.400.

**Skjal:** 20/00622-65 Prosjektløn 2020

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Blað nr.: 854<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | | Játtast á: | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | | **Upphædd** |
| 6275 | L62043 | Karlamagnusar breyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss | | 6475 | L64015 | Karlamagnusar breyt, asfaltering, parkering o.a. | | | -105.400 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | -105.400 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L62043, Karlamagnusarbreyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss, at trotið á kr. 105.400 verður flutt/goldið av L64015 Karlamagnussarbreyt, asfaltering, parkering o.a., og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

## 209/23 Tórsvøllur Torg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.12.2020 | 335/20 | 21/03047-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 335/20 | 21/03047-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.12.2020 | 249/20 | 21/03047-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 308/20 | 21/03047-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 66/21 | 21/03047-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 27/21 | 21/03047-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 94/21 | 21/03047-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 88/21 | 21/03047-1 |
| 9 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 119/21 | 21/03047-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.02.2023 | 20/23 | 21/03047-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 48/23 | 21/03047-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 73/23 | 21/03047-1 |
| 13 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 75/23 | 21/03047-1 |
| 14 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 95/23 | 21/03047-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 134/23 | 21/03047-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 229/23 | 21/03047-1 |
| 17 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 209/23 | 21/03047-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórsvøllur sum altjóða stadion.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2010 settu Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya seg fyri at fáa Tórsvøll góðkendan sum altjóða leikvøll. Verkætlanarstigini hesi ár hava verið:

- Masterplan fyri Tórsvøll 2010-2011
- Ljósanlegg sett upp 2011
- Grasvøllur skiftur við graslíkisvøll 2012
- Suðurtribuna tikin niður, nýtt FSF høvuðssæti og áskoðarapláss undir tak, eysturskýli undir tak 2013-15
- Vesturskýli við umklæðingarrúmum, teknisku hølum, áskoðarapláss undir tak v.m. 2016-21

Síðsta verkætlanarstigið í teirri ætlan, sum løgd varð upprunaliga, og sum eisini er partur av kravdum umstøðum til altjóða stadion, er torgið uttanfyri sjálvt stadion. Talan er um alt økið frammanfyri FSF høvuðssætið og Niðara vølli frá økinum millum Dansifrøi og Gundadalshøllina og framvið Gundadalsvegnum til og við Brigdehúsið.

Torgið fevnir um røð av funktionalitetum, sum hava við altjóða dystarstøðu at gera. Torgið skal harumframt liva upp til býarskipanarlig krøv samsvarandi heildarætlanini fyri Gundadal, har hetta økið er høvuðsportalur til Gundadal frá miðbýnum.
Yvirskipað er torgið skipað sum eitt uppihaldstorg við spæliplássi til allar aldursbólkar umframt parkering, vegir og gøtur. Tá landsdystir eru, verður torgið umskipað, so tað kann møta øllum krøvum, sum UEFA setur til kategori 4 stadion.

Torgið fevnir um:

- Skipað atkomu til áskoðarar, liðbussar, catering, neyðsendarakfør v.m.
- 1.000 m2 P-øki til sjónvarpsvognar, sum ásett fyri kategori 4 stadion, men sum í dagligdegnum antin kann brúkast til "street ítrótt" , ella parkering (33 stk.), tá dystir eru í Gundadali
- Farleið hjá gongufólki og súkklandi gjøgnum Gundadal sum lýst í "Heildarætlanini fyri Gundadal"
- Uppihaldstrappa frammanfyri FSF høvuðssætinum og Kafé #12
- Nýtt urbant spælipláss til allar aldursbólkar
- P-øki við Gundadalshøllina til 72 bilar
- Planting fram við Gundadalsvegnum og á torginum
- Allur belegningur á økinum (asfalt, betong og flísar)
- Innbygt "uttara hegn" og "turnstiles"[1]
- Info- og atgongumerkja kiosk
- Goymsla til "turnstiles"[1]
- Ljósseting sum lýst í "Heildarætlanini fyri Gundadal"
- Av- og áseting til torgið
- Busslummar til býbussar
- Benkur og annað býarinventar
- Spæliplássútgerð

1) "Turnstiles" er teljingartól til áskoðarar

Barakkirnar framvið Gundadalsvegnum, sum eru fýra samanbygdar bygningar, skulu takast niður. Kommunan eigur tveir av bygningunum, hinir standa á leigaðum lendi hjá kommununi. Tilgongd at yvirtaka báðar bygningarnar, sum ávikavist FC Hoyvík og Brigdefeløgini eiga, er í gongd.

Harumframt verður Gundadalshøllin eftir ætlan yvirtikin, har kommunan eftir hetta hevur fult ræðið á økinum millum Gundadalshøllina og Dansifrøi, sum ætlað er til P-øki.

Arbeiðið verður eftir ætlan gjørt í stigum, so hvørt økið verður tøkt. Fyrsta stig er at byggja saman stadion og torg við uppihaldstrappuni og farleið frá Gundadalsvegnum til stadion. Trappan er eisini liður í at javna hæddarmun.

Ætlanin er at skipa verkætlanina sum samstarv millum kommununa og FSF eftir sama leisti sum undanfarnu byggistig. Uppskot til samstarvsavtalu er gjørt. Sambært uppskotinum hevur samlaða verkætlanin eitt útreiðslukarm uppá kr. 30 mió, og at kommunan rindar 65% og FSF 35%. Arbeiðið er sett at byrja í 2021 og enda í 2023.

Í samstarvsavtaluni er eisini ásett, at niðurtøka av barakkunum er partur av verkætlanarkostnaðinum, men at kommunan serskilt ber kostnaðin at yvirtaka ognirnar hjá ávikavist FC Hoyvík og Brigdefeløgunum.

Í íløguætlanini eru kr. 5 mió settar av til endamálið 2021. Íløgujáttan fyri alla byggingina verður at játta árini 2022 og 2023.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Samráðing um yvirtøku av bygningum er í sjálvstøðugum málum.

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | x | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um íløguverkætlan í samstarvi millum kommununa og FSF eisini um fíggjarliga kostnaðin. Loft er lagt á kostnaðin. Umsitingin og FSF eru í gongd við at skipa felags avtalu um rakstur og viðlíkahald av øllum Tórsvølli, harímillum eisini torginum.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Dkk | Dkk 19.500.000 |
| Kostnaður í hesum árinum | Dkk | Dkk 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Dato | Dato 2021-2023 |
| Avleiðingar á rakstur | | Dkk |

**Játtan:**

| Upphædd íalt | Á | | | Av | | | Lokað | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | verkætlan | |
| Dkk | 5775 | Nýggj projektkonta | | 5775 | L00001 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja samstarvsavtaluna við Fótbóltssamband Føroya og í hesum sambandi at játta kr. 5 mió av løgukontu 5775 Ítróttaranlegg L0001 løgukarmur í 2021 til nýggja projektkontu Tórsvøllur torg. Harumframt verður mælt til at játta kr. 7,25 mió á íløguætlanini í 2022 og kr. 7,25 mió á íløguætlanini í 2023.

**Mentamálanevndin 07. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til, at arbeiðið við vestursíðuni á Tórsvølli verður gjørt liðugt, áðrenn endalig støða verður tikin til fyriliggjandi samstarvsavtalu við FSF og arbeiðið at gera torg frammanfyri Tórsvølli.

**Ískoyti:**
Talan er um verkætlan skipað sum eitt samstarv millum Fótbóltssamband Føroya og Tórshavnar kommunu, og skal uttanum økið til stadion til tíðir fevna um dystarstøður, men meginpartin av árinum er talan um alment øki, sum skal virka í gerandisdegnum.

Økið er áleið 7000-8000 $m^2$ til støddar, og eru greið altjóða krøv til dystarstøður, sum skulu samantvinnast við býarskipanarlig viðurskifti. Skitsuuppskotið tekur atlit til altjóða krøvini, og eru býarskipanarligu viðurskiftini partvís lýst í uppskotinum og í skjalinum *Viðmerkingar til spælipláss.*

Ein tørvslýsing hevði verið fyrsta stigið í eini skilagóðari tilgongd, har umsitingin beinanvegin varð tikin við uppá ráð. Vantandi tørvslýsingin hevði verið við til at tryggja ein samanhang millum tørv, krøv og ynskir til nýggja økið, umframt at verkætlanin varð sett inn í eina yvirskipaða hugsan í tráð við heildarætlanina fyri Gundadal og ítøkiligu verkætlanina um vestara skýlið á Tórsvølli.

Talan er um eitt stórt býartorg í Havnini, og tí er hóskandi at vera framsíggin í mun til, hvørji ynskir og krøv verða sett til verkætlanina. Verkætlanin verður mett at kosta 19 mió. kr., sum er eitt boð frá ráðgeva. Upphæddin er ikki grundað á eina kostnaðarmeting við støði í eini tørvslýsing, tí taka nógv ivamál seg upp í mun til verkætlanina. Mælt verður tí til at arbeiða víðari við at nágreinað verkætlanina við eini tørvslýsing í eini neyðugari tilgongd, sum skal vera grundarlagið undir verkætlanini. Hetta seinasta kundi verið skilmarkað í samstarvsavtaluna undir *Útinnan av arbeiðinum grein 4,* har tað stendur: *"...byggingin av torgi v.m. verður bygt eftir prosjekti, uppsett av MAP arkitektum"*.

**Skjøl:**
*Viðmerkingar til spælipláss*, journal nr. 20/04581-7

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja samstarvsavtaluna við Fótbóltssamband Føroya treytað av, at verkætlanin verður nágreinað í neyðugari tilgongd og ráðgevarasáttmáli verður gjørdur við ráðgeva og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. desember 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til, at arbeiðið við vestursíðuni á Tórsvølli verður gjørt liðugt, áðrenn endalig støða verður tikin til fyriliggjandi samstarvsavtalu við FSF og arbeiðið at gera torg frammanfyri Tórsvølli.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 1 blankari at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Borgi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**

Byggiskrá er evnað til verkætlanina at skipa nýtt býartorg í Gundadali. Byggiskráin er býtt í seks partar við yvirskriftunum:

- 1.0 Inngangur
- 2.0 Fortreytir
- 3.0 Krøv og ynski til byggimálið
- 4.0 Krøv og ynski til býarbúnaðin
- 5.0 Tøkni og veitingar
- 6.0 Skipan av verkætlan

Ynskið er at skapa eitt ítrótta- og trivnaðarpláss í Gundadali, sum bæði lýkur altjóða krøv til virksemið hjá Fótbóltssambandi Føroya (FSF), eins og økið gerst eitt virkið býarrúm. Pláss skal vera til spæl og uppihald, ið vendir sær til øll uttan mun til aldur ella tilknýti til eitt av mongu ítróttafeløgunum í økinum. Yvirskipað verður býartorgið býtt í 6 høvuðsfunktiónir, og skal býartorgið rúma:

- einum túni til eina størri fólkamongd, umleið 1500-2000 fólk.
- einum 1000 $m^2$ stórum parkeringsøki til sjónvarpsvognar.
- einari uppihaldstrappu.

einum spæliøki til allar aldursbólkar.

- einari min. 500 $m^2$ stórari skoytubreyt.
- 150 parkeringsplássum til VIP og vitjandi.

Byggiskráin leggur upp til, at uppgávan at skipa býartorgið í Gundadali fevnir um at finna fram til bestu loysnina at skipa nýtt býartorg á økinum, umframt at finna fram til bestu loysnina at sameina góða býarplanlegging og byggilist við altjóða krøv til virksemið hjá FSF, soleiðis at Tórsvøllur endaliga kann gerast tjóðarleikvøllur føroyinga. Talan er sostatt um eina skipan á økinum, sum leggur upp fyri verandi virksemi bæði byggilistarliga og byggitøkniliga, umframt at býartorgið hevur til endamáls at víðka karmarnar, sum lúka altjóða krøv og nútímans býarumstøður. Sí nágreinað krøv til býartorgið í byggiskránni.

**Skjøl:**
Byggiskráin Býartorgið í Gundadali, journal nr. 20/04581-11

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at samtykkja byggiskránna fyri verkætlanina at skipa nýtt býartorg í Gundadali, at heimila umsitingini at gera ráðgevarasáttmála við MAP Arkitektar og at beina málið í býráðið umvegis, teknisku nevnd, mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Annika Olsen varð ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfnn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Síðani seinastu viðgerð av verkætlanini Tórsvøllur Torg hevur verkætlanin ligið still. Ynskiligt er, at verkætlanin verður tikin uppaftur, soleiðis at økið verður fríðkað og at umstøðurnar til Tórsvøll verða raðfestar.

Byggiskráin er skrivað og samtykt, og ynskiligt er nú at fáa gjørt eitt skipanaruppskot av økinum út frá byggiskránni. Og eftirfylgjandi, tá skipanin av økinum er liðug, so er ætlanin at fara undir at prosjektera, bjóða verkætlanina út og seta arbeiðið at fremja torgið í gongd.

Upprunaliga vórðu kr. 5 mió. játtaðar til L57035, Tórsvøllur Torg. Írestandi upphædd er áljóðandi kr. 3.591.000, sum er ynskilig at savna á nýggja prosjektkonto undir kt. 6275.
Á íløgukarminum LK62055, Torg framman fyri FSF, eru settar av kr. 2 mió. til verkætlanina.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | L57035 | Tórsvøllur Torg | 6275 | L62055 | Torg frammanfyri FSF | x | 3.591.000 |
| 6275 | LK62055 | Torg frammanfyri FSF | 6275 | L62055 | Torg frammanfyri FSF | x | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 5.591.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 100.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir skipan av økinum, prosjektering, útbjóðing av verkætlanini, og at seta arbeiðið í verk.
- at írestandi upphædd á kr. 3.591.000 á L57035, Tórsvøllur Torg, verður flutt á nýggja prosjektkonto undir kt. 6275
- at játta kr. 2 mió. av LK62055, Torg frammanfyri FSF, á nýggja prosjektkonto undir kt. 6275
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjanevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið og samtykt omanfyri.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við samtyktini í byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at írestandi upphæddin, ið skal flytast av konto 5775 L57035 yvir á nýggja projektkonto undir konto 6275 er kr. 2.975.688.

**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum liður í upprunaligu verkætlanini frá 2010 at gera Tórsvøll til altjóða leikvøll er nú skipanaruppskot gjørt fyri seinasta verkætlanarstigið í verkætlanini, sum fevnir um skipan og gerð av nýggjum býartorgi í Gundadali. Skipanaruppskotið er tilevnað sambært krøvum og ynskjum, nágreinaði í eini byggiskrá fyri verkætlanina, og fevnir uppskotið um alt økið framman fyri høvuðssætið hjá FSF og niðara vøll. Økið frammanfyri Tórsvøll er partur av kravdum umstøðum til altjóða leikvøllir, men skal nýggja býartorgið somuleiðis gerast til eitt alment býarrúm sum ein liður í býarmenningini í Gundadali.

Skipanaruppskotið samantvinnar væl virksemið hjá FSF við ynsktu almennu nýtsluni, og er hetta væl lýst í skipanini av økinum, har ymsu funktiónirnar renna saman heldur enn at verða sundurskildar, og gerst talan tí um eina væl samanhangandi heildarmynd og uppskot fyri økið. Sí skipanina av økinum í skjalinum Býartorg í Gundadali_Alternativ A (flatmynd), sum er eitt tillagað skipanaruppskot sambært viðmerkingum frá brúkarum. Skipanaruppskotið lýsir harafturat, hvussu trygdarøki, spæliøki, kantar, girðing, vøkstur o.a. kundu verið gjørd.

Kannað varð eisini, hvussu skipanin av økinum hevði sæð út, um kravið frá UEFA til parkering varð skipað inni á sjálvum økinum, sí skjalið Býartorg í Gundadali_Alternativ B (flatmynd). Uppskotið hevur við sær, at økið innan fyri trygdargeiran gerst munandi minni enn ynskið frá FSF, eins og torgið gerst lítið attraktivt og nýtiligt.

FSF hevur umrøtt tillagaðu uppskotini, og hevur FSF staðfest, at tikið verður undir við Alternativi A sum uppskot og skipan fyri økið, ið somuleiðis nøktar tørvin til uttanumøkið kring Tórsvøll.

Ein partur av skipanaruppskotinum fevnir um at skipa eina trægeil lutvíst á báðum síðum fram við Gundadalsvegnum á strekkinum millum bygdaskýlið og Gundadalshøllina. Sí skjalið Trægeil, journal nr. 21/03047-26. Í hesum sambandi varð lendisarbeiðið at gróðurseta eina trægeil boðið út til tveir arbeiðstakarar, men kom einans eitt tilboð inn frá Hjálpirót:

| | |
|---|---|
| Tilboð: | kr. 1.231.099,26 u/mvg |
| Alternativt tilboð | kr. 784.415,89 u/mvg |

Lendisarbeiðið fevnir um allar tilfars- og arbeiðsveitingar í sambandi við at seta 28 trø (5,5-6,5 m í hædd og áleið 8-10 metrar ímillum trøini) og runnar niður eins og at hampa um ávís øki, sí skjalið Trægeil.

Munurin á tilboðunum er at finna í, hvussu grivið verður fyri trøunum. Tilboðið fevnir um at grava eina langa grøv, meðan alternativa tilboðið fevnir um at grava 2 fermetrar rundan um hvørt træið.

**Skjøl:**
Býartorg í Gundadali_Skipanaruppskot 12.06.2023, journal nr. 21/03047-25
Býartorg í Gundadali_Alternativ A (flatmynd) 30.08.2023, journal nr. 21/03047-25
Býartorg í Gundadali_Alternativ B (flatmynd) 30.08.2023, journal nr. 21/03047-25
Trægeil, journal nr. 21/03047-26

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62055 | Torg frammanfyri FSF | | | | | 833.441,88 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 833.441,88 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 25.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og býararkitekturin mæla til:

- at samtykkja skipanaruppskot Alternativ A fyri økið í Gundadali,
- at umsitingin í samstarvi við FSF arbeiðir víðari við uppskotinum og setir ymsu arbeiðstøkurnar í verk innanfyri verandi játtan á L62055, Torg frammanfyri FSF.
- at taka av alternativa tilboðnum at gróðurseta eina trægeil í Gundadali og játta kr. 833.441,88 (íroknað mvg) til at seta arbeiðið í gongd at gróðurseta eina trægeil í Gundadali av L62055, Torg frammanfyri FSF,
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Tróndi Sigurðsson: Mælt verður til at taka undir við uppskotinum treytað av, at hædd verður tikin fyri eini framtíðar um/útbygging av Gundadalshøllini norðureftir.

Broytingaruppskotið varð einmælt samtykt.

# 210/23 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1083a, 1083ae og 1087b, Tórshavn. Frá 4. grundumráði til B3 øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 134/21 | 21/02314-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 198/21 | 21/02314-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 153/21 | 21/02314-2 |
| 4 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 210/23 | 21/02314-2 |

**Upprunin til málið**
Ætlanir eru um at leggja partar av matr. nr. 1083a, 1083ae og 1087b, Tórshavn, saman við matr. nr. 1083ad, 1083p og 1083q, Tórshavn. Matr. nr. 1083a, 1083ae og 1087b, Tórshavn liggja í 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og um hesir skulu leggjast saman við matriklum, sum liggja í byggiøki, mugu teir somuleiðis broytast til at liggja í byggiøki.

**Lýsing av málinum**
Matr. nr. 1083ad, 1083p og 1083q liggja í B3 vinnuøki, og eru partur av vinnuøkinum í Vika. Um hesir skulu leggjast saman við matr. nr. 1083a, 1083aw g 1087b, mugu hesir somuleiðis broytast til at liggja í B3 øki smb. kortskjali *Eftir broyting*. Hetta er harumframt við til at geva vinnuøkinum eitt greiðari skap og mark út móti 4. Grundumráði.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B3 vinnuøki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- Loyvi er einans at byggja hús til smá vinnuvirki, verkstaðir og tílíkt og tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi. Tó er loyvt á hvørjum grundstykki at gera bústað til eigara ella fyristøðufólk virkisins.

Ásetingar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:
- 4. Grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Áðrenn broyting j.nr. 21/02314-3
Eftir broyting j.nr. 21/02314-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina sambært skjalinum *Eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at uppskotið til broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 1083a, 1083ae og 1087b í Vika hevur ligið til almenna hoyring, eru tvær viðmerkingar innkomnar.

- Annað mótmælið er frá einum granna, sum býr í einum sethúsum, sí skjal *Hoyringssvar*. Hann vísir á, at tað á matr. nr. 1083ad hevur verið dálkandi virksemi uttan umhvørvisgóðkenning, og hann spyr, um kommunan ætlar at geva eigaranum eina premiu, fyri at hava dálkað økið í 16 ár. Hann vísir somuleiðis á, at um byggisamtyktin verður broytt, verður kommununnar umhvørvis reglugerð fyri virkir, hvat viðvíkur frástøðu til íbúðir, brotin.

  Mótmælarin mælir ístaðin til, at matr. nr. 1087b kundi verið gjørt til eitt parkeringspláss til persónbilar, til fólk sum fara burtur í haga.

- Í hinum mótmælinum verður víst á søgugongdina viðvíkjandi sølu, virksemi og loyvum á matr. nr. 1083ad, og er hendan undirbygd við fleiri skjølum úr málum í journalskipanini hjá Tórshavnar kommunu, sí skjøl *HOYRINGSSVAR.pdf* og skjøl 1-34. Søgugongdin, sum er lýst í mótmælinum, vísir, hvussu SG Asfalt, eigari av matr. nr. 1083ad, í sera lítlan mun hevur livað upp til treytirnar, sum vóru til keypið í 2000. Hóast kommunan hevur víst stórt tol og vælvild, hevur eigarin ikki megnað at liva upp til treytirnar, og tað hevur verið sera trupult at fáa hann at virða grundleggjandi reglur, sum t.d. at ikki má arbeiðast, fyrrenn loyvir eru komin uppá pláss. Umfatandi dálking hevur verið á økinum við asfaltleivdum, óruddi og bilvrakum, og ikki so frætt sum ein girðing er gjørd um økið nú 16 ár seinni.

  Sambært skjølunum, hevur kommunan ferð eftir ferð víst á, at býráðið átti at tikið grundøkið innaftur, men er hetta ikki gjørt – hinvegin verður uppskot samtykt, ið gevur eigaranum av matr. nr. 1083ad møguleika at selja ognina á fría marknaðinum.

  Tí stendur ein spyrjandi, nú Tórshavnar kommuna ætlar at broyta byggisamtyktina, soleiðis at eigarin av matr. nr. 1083ad kann keypa eitt stykki á áleið 900 $m^2$ at leggja afturat stykkinum. Hetta uttan at gera eina meting av, hvat árin virksemið á matr. nr. 1083ad hevur havt á umhvørvið.

  Ístaðin verður tað í mótmælinum mælt til, at økið verður nýtt til frítíðarøki, møguliga í sambandi við ferðavinnuna. Gøtan framvið er ein tann mest brúkta í Føroyum í sambandi við gongutúrar, og er í einum standi so hon als ikki eigur at verða brúkt til ídnaðar ferðslu.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu ásannar, at virksemið á matr. nr. 1083ad ikki altíð hevur verið í trá við ásetingarnar, og at táverandi eigari ikki altíð hevur hildið avtalur. Viðvíkjandi søluni av lendinum hevur Tórshavnar kommuna á býráðsfundi hin 22. juni 2021 samtykt at selja umsøkjaranum lendið, við ávísum treytum, m.a. at:

- kommunan hevur ikki ætlanir um at gera íløgur í vegin til matr. nr. 1083ad, og tí er tað ikki hóskandi at økja um virksemið til 1083ad. Hinvegin er vegurin ein nógv brúkt farleið hjá fólki, ið fara gongutúrar út í náttúruna.
- Økið skal skipast, soleiðis at ein innkoyring er á stykkið, betonggarður við girðing skal gerast móti vegnum við Sandá, og fer Tórshavnar kommuna at planta og fríðka geiran millum vegin við Sandá og girðingina.
- Økið má skipast væl, og óruddið má burtur ella skermast betur.
- Lendið er soleiðis háttað, at neyðugt er at gera betong garðar millum matriklarnar, fyri at upptaka hæddarmunirnar millum stykkini. Tí er ein av treytunum fyri sølu, at matriklarnir alt fyri eitt verða sundurskildir við betong gørðum, soleiðis at hvør keypari fær skipað virksemið á egnum øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at halda fast í uppskotinum til broyting av byggisamtyktini sum samtykt í býráðnum 23. juni 2021, vísandi til treytirnar, sum lýstar verða omanfyri, sum verða settar í smb. Við søluna, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

## 211/23 Skipan av Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 206/18 | 18/03468-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 285/18 | 18/03468-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 250/18 | 18/03468-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 276/18 | 18/03468-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 150/19 | 18/03468-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 244/19 | 18/03468-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 280/19 | 18/03468-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 181/19 | 18/03468-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 292/19 | 18/03468-1 |
| 10 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 259/19 | 18/03468-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 315/19 | 18/03468-1 |
| 12 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 276/19 | 18/03468-1 |
| 13 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 309/19 | 18/03468-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 110/20 | 18/03468-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 106/20 | 18/03468-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 15/21 | 18/03468-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 26/21 | 18/03468-1 |
| 18 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 61/21 | 18/03468-1 |
| 19 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 99/21 | 18/03468-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.01.2022 | 4/22 | 18/03468-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 16/22 | 18/03468-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 15/22 | 18/03468-1 |
| 23 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 74/22 | 18/03468-1 |
| 24 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 23/22 | 18/03468-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 83/22 | 18/03468-1 |
| 26 Fíggjarnevndin | 23.03.2022 | 92/22 | 18/03468-1 |
| 27 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 72/22 | 18/03468-1 |
| 28 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 89/22 | 18/03468-1 |
| 29 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 127/23 | 18/03468-1 |
| 30 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 211/23 | 18/03468-1 |

**Upprunin til málið:**

Tórshavnar kommuna er í menning, og stóri fólkavøksturin merkist serliga í høvuðsstaðarøkinum. Tørvur er á at víðka um býin, og í hesum sambandi verður farið undir arbeiðið at skipa Stórutjørn, matr. nr. 135ed og 1æf, Hoyvík – økið norðanfyri Klingruna og vestanfyri býlingin Inni á Gøtu, sum er uml. 525 ha til støddar, sí skjal *Stóratjørn*.

Geografiskt liggur økið væl fyri, millum bústaðarøkið í Hoyvík, vinnuøkið á Hjalla og nýggja innkomuvegin, sum verður gjørdur í sambandi við Eysturoyartunnilin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í kommunuætlanini hjá Tórshavnar kommunu er Stóratjørn eitt av teimum økjunum, ið mett veður at hóska seg væl til býarvøkstur. Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur økið í A3 øki, sum er ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, D2 øki, ætlað ítrótti og øðrum, sum kann virka saman við ítróttinum og D1 øki, sum er økið nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík liggur í.

Sum ein liður í at útvega nýtt byggilendi í kommununi, tað verði seg til bústaðir, vinnu, ítrótt, mentan o.a., er ætlanin í fyrsta umfari at bjóða arbeiðið at skipa økið við Stórutjørn út til uttanhýsis ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:

- *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
- *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
- *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

Ásetingar fyri D1 øki:

- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*
- *Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri D2 øki eru m.a.:

- *Umráðisparturin verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*
- *Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í 2007 varð ætlan um at skipa eina serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn. Økið varð lagt av til vinnuøki, bústaðarbygging, ítróttar- og frítíðarvirksemi og almenn fríøki, sí kortskjal *Serstøk byggisamtykt – kort.*

Bygging og skipan eftir serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn varð tó aldrin til veruleika og ongar ætlanir eru at skipa økið eftir serstøku byggisamtyktini, sum eftir hondini er vorðin ótíðarhóskandi. Tí verður arbeitt við uppskoti um at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn, so arbeitt kann verða við víðari menning og býarvøkstri í økinum.

Í 2015 varð samtykt at geva SEV rættin til optión at keypa eitt uml. 20.000-30.000 $m^2$ stórt byggilendi við Stórutjørn, partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík. Hendan optiónin var galdandi í 1 ár, og av tí at Tórshavnar kommuna ikki hevur hoyrt meira frá umsøkjaranum, er avtalan ikki galdandi meir.

Magn stendur á bíðilista hjá kommununi um so er, at kommunan ger eina útstykking til vinnustykkir. Men Magn hevur einans ynski um eitt grundstykki, sum skal liggja við innkomuvegin, og hevur man í síni tíð tikið atlit til hetta ynski í Stórutjørn verkætlanini, har man vildi avseta eitt øki til eina bensinstøð í Hoyvíkshaganum. Har fyriliggur tó ikki ein føst avtala, so um kommunan ikki avsetur eitt øki til bensinstøð

í Hoyvíkshaganum, so er einki grundstykki tøkt at tilluta Magn. Somuleiðis er tað ein avbjóðing, at ein einstakur keypari verður valdur at keypa eitt grundstykki við bestu plasering út til møguligan innkomuveg.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Serstøk byggisamtkyt Stóratjørn – broyting av byggisamtykt,* journal nr. 2006-1204.
*Selmar Nielsen: Umsókn vegna SEV um rættin til optión at keypa byggilendi við Stórutjørn partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík,* journal nr. 15/02686.
*Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn,* journal nr. 17/03802.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin

**Umhvørvisárin**
Í sambandi við at serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri Stórutjørn í 2008, gjørdi Føroya Náttúrugripasavn, eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu, árinskanning av bygging í økinum, sí skjal *árinskanning 1-34.pdf*.

Árinskanningin vísti m.a. at:
- 47 plantusløg vóru skrásett í økinum, ongar av hesum plantum vóru sjáldsamar.
- 13 fuglasløg eiga í økinum. Fýra teirra eru á føroyska reyðlistanum og fevnd av Bonn-sáttmálanum (grágás, spógvi, lógv og vípa).
- Talið av sordýrum er skiftandi úr einum stað í annað. Funnu klukkurnar eru millum vanligu klukkurnar í Føroyum.

Í niðurstøðuni av árinskanningini verður mælt til, at lyngurin í økinum verður vardur bæði í sambandi við grøn øki á byggiøkinum og á økinum uttanum. Somuleiðis verður mælt til at geva fuglinum frið til at byggja á økjunum nærindis (t.d. við at virksemi sum spreinging, ið órógvar fuglin, ikki verður framt, tá ið fuglurin reiðrast).

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Stóratjørn,* journal nr. 18/03468-2.
*Stóratjørn – byggisamtykt,* journal nr. 18/03468-2.
*Innkomuvegur,* journal nr. 18/03468-2.
*SEV optión,* journal nr. 18/03468-2.
*Árinskanning 1-34.pdf.* journal nr. 18/03468-4.
*Serstøk byggisamtykt – kort,* journal 18/03468-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 200.000 av konto L62032 Gøta kring Havnina og fiskastykki, til at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva um at skipa økið við Stórutjørn og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 200.000 av konto L62032 á konto 7315 kommunuætlanin, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Síðani málið varð samtykt á býráðsfundi 29. november 2018, hevur umsitingin arbeitt við at framleiða tilfar, ið skal nýtast í sambandi við at skipan av økinum skal bjóðast út sum almenn hugskotskapping.

Í kappingartilfarinum verður ført fram, at ynski er at skipa økið til blandaða búðstaða- og miðstaðabygging, stórhøll og lætta vinnu. Atlit skulu takast til verandi lendið, flora og fauna og søguna í økinum, sum gamlir torvheiðar.

Lagt verður upp til at bústaðarbyggingin, sum verður í økinum, er blandað, og at dentur verður lagdur á trivnaðin í økinum, bæði tá hugsað verður um støddarlutfallið, og í skipanini av útiøkjunum.

Í sambandi við kommunuætlanina, eru nøkur økir vald út, sum hóska seg til býarvøkstur, harímillum er Stóratjørn eitt av teimum best egnaðu, sí øki 1, skjal *Vakstrarøkir í Hoyvík*. Øki 1, 2 og 3 liggja uppat hvørjum øðrum, og tí eru tey viðgjørd sum eitt øki, tá tað viðvíkur kloakk og vegum.
Økini 1, 2 og 3 kunnu viðgerast undir einum, tá tey liggja upp at hvørjum øðrum. Økini liggja í Hoyvíkshaganum og liggja norðan fyri verandi býlingar og ringveg.

**Viðmerkingar frá teknisku deild:**
Tekniska deild hevði hesar viðmerkingarnar til hesi økini:

Talan er um øki, ið skulu gerast heilt av nýggjum, hvat viðvíkur kloakk og vegagerð.

Ongin kloakk er í økinum sum kann brúkast, og tí er neyðugt at gera eina nýggja kloakkleiðing, sum skal leggjast oman til Hvítanes.

Viðvíkjandi vegíbinding, er økið væl egnað og lætt at fara undir, tá vegurin Klingran gongur tætt framvið og kemur Ytri Ringvegurin eisini at liggja í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til
- at økið verður boðið út sum ein arkitektakapping til skipan av økinum.
- At játtaðar verða 600.000 kr. av konto L62032 til kappingarvinnarar og til uttanhýsis ráðgeving í sambandi við kappingina.
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at boðið verður út millum føroyskar fyritøkur.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í viðgerðini av fyribils kappingarskránni til hugskotskappingina, er umsitingin gjørd varug við, at neyðugt verður við størri játtan enn upprunaliga mett fyri at seta kappingina í verk.

Dómsnevndin dømir um innkomnu uppskotini, og um talan verður um tvær ella tríggjar virðislønir, umframt møguligt keyp av góðum hugskotum. Harafturat skal dómsnevndin lønast og hava ferðaútreiðslur goldnar.

Mett er, at neyðugt verður at játta 1,0 mió. til endamálið.

Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
1. at játta kr. 1.000.000,00 av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan "Stóratjørn" undir konto 6275
2. at heimila umsitingini at bjóða ætlanina út í kapping
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Útsett.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Tikið av skrá**.**

**Nýtt tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
1. at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum.
2. at játta kr. 1.000.000,00 til nýggja verkætlan "Stóratjørn" undir konto 6275.
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum, og at heita á figgjarnevndina at finna fígging.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtanin á kr. 1.000.000 skal játtast av konto 20910 «aðrar útreiðslur» og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Hugskotskappingin "skipan av Stórutjørn" er liðug.
Innkomnu uppskotini og dómsnevndarúrskurður verður kunngjørdur á fundinum.
Úrslitið verður almannakunngjørt 18.05.2020.

Skjal nr. 18/03468-39, dómsnevndarúrskurður, verður lagt í málið aftaná almennakunngerðingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at staðfesta dómsnevndarúrskurðin, og at arbeiða víðari við skipan av Stórutjørn í tráð við ætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til at tilfarið kom á fundinum og at vit ikki hava fingið høvi til at nærlisið tilfarið, áðrenn endalig støða skal takast.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Vitandi um, at kommunan hevur tørv á størri byggilendi, er tað avgerandi fyri býarmenningina, at planleggingin av kommununi er framtíðartryggjað og í tráð við tær ætlanir og avbjóðingar, sum kommunan stendur upp ímóti.

Í vár varð arkitektakapping skipað um skipan av Stórutjørn, sum sambært Kommunuætlanini er fremst raðfest til býarvakstrarøki í kommununi. Tvær fyritøkur vunnu rættin at verða knýtt at prosjekteringsarbeiðinum sum ráðgevi at gera forprosjekt til fremstu raðfestingina av ætlanini.

Fyri at kunna fara inn á økið við teimum framtíðarætlanum, sum fyriliggja, er tað tí av stórum týdningi at endaliga skipanin av Stórutjørn verður raðfest.

Umsitingin ynskir at fara í samstarv við vinnandi fyritøkurnar fyri at nágreina skipanina av økinum, og gera raðfestingar, soleiðis at farast kann undir partar av útstykkingini.

Stóratjørn er ogn hjá landinum, og fyri at kommunan kann fara undir at vaksa um býin verður neyðugt at fara í samráðingar við landið og Búnaðarstovuna um keypið av lendinum.
Kappingin fevndi um økið matr. nr. 135ed og matr. nr. 1æf. Víddin á matriklunum er:

- matr. 135ed er 108175 $m^2$ til støddar (kortvídd)
- matr. 1æf er 117.184 $m^2$ til støddar (kortvídd)

Talan er sostatt um eitt stórt øki, sum ætlanin er at yvirtaka í stigum, soleiðis at Stóratjørn verkætlanin kann gerast veruleiki í stigum.

Somuleiðis er at upplýsa, at arbeitt verður við avtaluni millum Landsverk og kommununa um innkomuvegin, sum endaliga kemur at hava stóra ávirkan á virkið í Stórutjørn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at játta 2 mió. kr. av konto 6475, Byggibúning bústaðir, L64011, Útstykking Stórabrekka, á konto 6275, Fríðkan av kommununi (íløgur), L62039, Stóratjørn til framhaldandi skipan av økinum.
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við landið og Búnaðarstovuna um keyp av lendinum í stigum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið skal viðgerast tvær ferðir.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg um at broyta játtan 2 mió. kr. til ikki at taka av konto 6475 men av tøkum peningi.

Broytingaruppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta ímót og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, ongari ímóti og fimm blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Uppskotið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við átta atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen og Gunvør Balle.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur seinastu tíðina samskift við teir báðar vinnararnar av kappingini um ráðgevarasáttmála í.s.v. gerð av heildarætlan fyri Stórutjørn, sí viðhefta uppskot til ráðgevarasáttmála *Stóratjørn__Ráðgevarasátmáli_FYRIBILS_2021.12.07*. Smb. sáttmálanum skulu ráðgevarnir gera eina yvirskipaða heildarætlan fyri økið, ið skal lýsa fortreytirnar fyri bygging, eitt uppbýti av økjum sum tilsamans skapar ein fjøltáttaðan býarpart. Ætlanin skal vísa eina skipan ella staðseting av vegaføring, parkering, bussleið, bústaðar-, stovns-, vinnu- og ítróttarbýlingum.

Harumframt eru frágreiðingar viðv. hugsjón og virðum, fortreytum, burðardygd, økisbýti, náttúru, tilhaldi, býlingum, vegakervi, gøtukervi, høvuðsleiðingum, endurnýtslu og byggibúning.

Sambært tíðarætlanini tekur arbeiðið at gera heildarætlanina tríggjar mánaðir og ráðgevingin kostar 2.000.000,- kr. u.mvg.

Á býráðsfundinum 25. mars 2021 varð samtykt at játta 2.000.000,- kr. til framhaldandi skipanina av økinum. Av hesum eru 1.970.000,- kr. eftir. Soleiðis íresta 530.000,- kr. til ráðgevarnar, umframt 100.000,- kr. til aðrar útreiðslur í smb. við gerð av heildarætlanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At taka undir við uppskotinum til ráðgevarasáttmála í.s.v. gerð av heildarætlan fyri Stórutjørn.
- At játta 630.000,- kr. av konto 6275, LK62999, Fríðkan av býnum (løgukarmur fyri árið 2022), á konto 6275, Fríðkan av býnum, L62039, Stóratjørn, til samsýning til ráðgevarnar.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2022:** Samtykt at játta kr 330.000 av kt. 6275, LK62999, Fríðkan av býnum, á konto 6275, Fríðkan av býnum, L62039, Stóratjørn. Nevndin ynskir, at hædd verður tikin til veðurviðuskiftini og handilsviðurskiftini í tilgongdini, umframt at nevndin ynskir at verða kunnað leypandi.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini við tí broytingaruppskoti frá Elsu Berg, at náttúruviðurskifti verður lagt afturat orðingini hjá Byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð einmælt samtykt**.**

**Ískoyti:**
25. mars 2021 samtykti býráðið at heimila umsitingini at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum til menning av Stórutjørn-verkætlanini.

Seinasta árið hevur verið arbeitt við innkomuvegnum, og er arbeiðið við vegnum nú komið so væl áleiðis, at arbeiðsvegurin eftir ætlan verður boðin út fyrsta dagin.

Í samb. við at menna økið, verður mett, at tað er av stórum týdningi, at lendið, sum liggur eystan fyri innkomuvegin, verður lagt afturat Stjórutjørn verkætlanini, soleiðis at alt økið kann síggjast sum ein heild í samb. við skipan av økinum.

Stóratjørn og lendið norð til innkomuvegin er ogn hjá landinum, og fyri at kommunan kann fara undir at vaksa um býin, verður neyðugt at fara í samráðingar við festaran og Búnaðarstovuna um keypið av lendinum. Sigast skal, at bæði festarin og Búnaðarstovan er kunnaði um ætlanirnar.

Talan er sostatt um eitt stórt øki, sum ætlanin er at menna til framtíðar bý. Heilt ítøkiliga er støddin um 960.000 fermetrar, og av tí at lendið er so stórt, og býarmenningin ikki kemur at verða framd í einum, so er ætlanin at gera eina avtalu við Búnaðarstovuna um at yvirtaka lendið í stigum, soleiðis at Stóratjørn verkætlanin og ein møgulig vinnuútstykking kann gerast veruleiki, uttan at tørvur er á at ogna sær alt økið í einum.

Sí skjal, “Arealnýtsla”, sum sýnir økið, sum ætlanin er at gera eina avtalu við landið, Búnaðarstovuna og festaran um.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnardeildini, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar og gera avtalu við landið, Búnaðarstovuna og festaran um keyp av lendinum í stigum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Samlaða lendisvíddin, ið skal nýtast til innkomuvegin, vinnuútstykking og framtíðar sethúsa- og aðrar útstykkingar í Hoyvíkshaganum er umleið 1 mió. fermetrar. Talan er um partar av matr. nr. 135ed, 1æf, 139a og 135a allir í Hoyvík. Partur av hesum lendi liggur í Hoyvíkshaganum norðara parti (matr. nr. 139a og matr. nr. 1æf), og situr festari við hesum festinum, meðan partur av lendinum er partur av Hoyvíkshaganum sunnara parti (matr. nr. 139ed og 135a), sum eingin festari situr við, men sum festarin í Hoyvíkshaganum norðara parti brúkar sum bit v.m.
Til innkomuvegin og framtíðar vinnuútstykking er neyðugt at ogna sær uml. 341.000 fermetrar burtur av matr. nr. 135ed, 1æf og 139a. Sí kortskjal “*Keyp av lendi Hoyvíkshagin_Norðari partur*”. Samstundis skal avtala gerast við Búnaðarstovuna og festaran, sum tryggjar Hoyvíksgarðinum nøktandi viðurskifti og víðkanarmøguleikar í framtíðini, og hetta ber millum annað í sær, at byggisamtyktin skal endurskoðast og

broytast, so eingin býarvøkstur fer fram uttanfyri komandi innkomuvegin. Innkomuvegurin verður sostatt mark millum býin og landbúnaðarvirksemið í Hoyvíkshaganum. Miðjað verður ímóti at gera avtalu við festaran um at leggja avlopstilfar inn á økið, ið festarin situr við, so hetta kann bøta um møguleikarnar fyri landbúnaðarviksemi á festinum.

Kostnaðurin fyri lendi í Hoyvíkshaganum er 89 kr./m², og afturat hesum skal rindast fyri avloysing av biti (70 oyru/m²), frábýtingarútreiðslur, tinglýsingarkostnaður og sakargjald til Búnaðarstovuna. Saman við útreiðslunum til skipan og projektering av vinnuútstykkingini í økinum og atknýttum vegum, er samlaði fíggjartørvurin mettur til umleið 34 mió. kr.

Viðv. útstykkingum burtur av matr. nr. 139ed og matr. nr. 1æf (írestandi partinum av hesum matr.) er ætlanin at keypa lendi frá Búnaðarstovuni í stigum og rinda so hvørt, sum tørvur verður á lendi at útstykkja. Ilt er at siga í løtuni, hvussu stórari vídd, tørvur verður á, tí økið er ikki endaliga skipað enn. Ætlanin er tískil í fyrsta umfari at fáa heimild til at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi burtur av matr. nr. 1æf og allan matr. nr. 139ed til framtíðar býarmenning, og at rindað verður fyri lendið so hvørt, sum tørvur er á tí í mun til býarvøksturin.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til
- at játta kr. 34.023.170,00 til keyp av lendi og aðrar útreiðslur í hesum sambandi til innkomuvegin og framtíðar útstykkingar á matr. nr. 135ed, 1æf og 139a, Hoyvík. Peningurin verður játtaður av játtanini til innkomuvegin við 7.880.792,50 kr. av konto 8175 Vegir (løgur), L L81037, Innkomuvegur, og 26.142.377,50 kr. av konto 6975, Byggibúning ídnaðarøki, ið verður afturgoldin Tórshavnar kommunu í sambandi við sølu av vinnustykkjum í útstykkingini.
- at heimila umsitingini at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum til framtíðar útstykkingar burtur av matr. nr. 1æf og 139ed. So hvørt, sum tørvur er á fígging, verður málið lagt fyri aftur avvarðandi nevndir til støðutakan.
- at heimila umsitingini at samráðast við og gera avtalu við festaran um avlopstilfar og um at framtíðartryggja møguleikarnar at reka landbúnaðarvirksemi á festinum. Avtalan verður at liggja fyri aftur og góðkenna av avvarðandi nevndum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:** Í mun til ískoytið til fíggjarnevndarfundin 16. mars 2022 eru smærri tillagingar gjørdar í lendisnýtsluni v.m. í sambandi við, at málið verður lagt fyri aftur fíggjarnevnd og býráð til støðutakan.

Samlaða lendisvíddin, ið skal nýtast til innkomuvegin, vinnuútstykking og framtíðar sethúsa- og aðrar útstykkingar í Hoyvíkshaganum er umleið 1 mió. fermetrar. Talan er um partar av matr. nr. 135ed, 1æf, 139a og 135a allir í Hoyvík. Partur av hesum lendi liggur í Hoyvíkshaganum norðara parti (matr. nr. 139a og matr. nr. 1æf), og situr festari við hesum festinum, meðan partur av lendinum er partur av Hoyvíkshaganum sunnara parti (matr. nr. 139ed og 135a), sum eingin festari situr við, men sum festarin í Hoyvíkshaganum norðara parti brúkar sum bit v.m.

Til innkomuvegin, íbindingarvegir og framtíðar vinnuútstykking skal kommunan ogna sær uml. 319.000 fermetrar burtur av matr. nr. 135ed, 1æf, 139a og 135a, Hoyvík. Sí kortskjal "*Keyp av lendi Hoyvíkshagin_Norðari partur - greinað*".

Samstundis skal avtala gerast við Búnaðarstovuna og festaran, sum tryggjar festaranum á Vatnaskørðum nøktandi viðurskifti og víðkanarmøguleikar í framtíðini, og hetta ber millum annað í sær, at byggisamtyktin skal endurskoðast og broytast, so eingin býarvøkstur fer fram uttanfyri komandi innkomuvegin. Innkomuvegurin verður sostatt mark millum býin og landbúnaðarvirksemið í Hoyvíkshaganum. Miðjað verður ímóti at gera avtalu við festaran um at leggja avlopstilfar inn á økið, ið festarin situr við, so hetta kann bøta um møguleikarnar fyri landbúnaðarviksemi á festinum.

Kostnaðurin fyri lendi í Hoyvíkshaganum er 89 kr./m², og afturat hesum skal rindast fyri avloysing av biti (70 oyru/m²), frábýtingarútreiðslur, tinglýsingarkostnaður og sakargjald til Búnaðarstovuna. Saman við útreiðslunum til skipan og projektering av vinnuútstykkingini í økinum og atknýttum vegum, er samlaði fíggjartørvurin mettur til umleið 32 mió. kr.

Viðv. útstykkingum burtur av matr. nr. 139ed og matr. nr. 1æf (írestandi partinum av hesum matr.) er ætlanin at keypa lendi frá Búnaðarstovuni í stigum og rinda so hvørt, sum tørvur verður á lendi at útstykkja. Ilt er at siga í løtuni, hvussu stórari vídd, tørvur verður á, tí økið er ikki endaliga skipað enn. Ætlanin er tískil í fyrsta umfari at fáa heimild til at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi burtur av matr. nr. 1æf og allan matr. nr. 139ed til framtíðar býarmenning, og at rindað verður fyri lendið so hvørt, sum tørvur er á tí í mun til býarvøksturin.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at játta kr. 31.987.030,00 til keyp av lendi og aðrar útreiðslur í hesum sambandi til innkomuvegin, íbindingarvegir og framtíðar útstykkingar á matr. nr. 135ed, 1æf, 139a, og 135a Hoyvík.

Mælt verður til at játta peningin soleiðis:

- Kr. 4.600.000,00 av konto 8175 Vegir (løgur), LK81037, Innkomuvegur

- Kr. 1.297.406,00 av konto 8175 Vegir (løgur), L81037, Innkomuvegur

- Kr. 26.089.624,00 kr. av konto 6975, Byggibúning ídnaðarøki, ið verður afturgoldin Tórshavnar kommunu í sambandi við sølu av vinnustykkjum í útstykkingini.

Harumframt mælt til:

- at heimila umsitingini at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum til framtíðar útstykkingar burtur av matr. nr. 1æf og 139ed. So hvørt, sum tørvur er á fígging, verður málið lagt fyri aftur avvarðandi nevndir til støðutakan.
- at heimila umsitingini at samráðast við og gera avtalu við festaran um avlopstilfar og um at framtíðartryggja møguleikarnar at reka landbúnaðarvirksemi á festinum. Avtalan verður at liggja fyri aftur og góðkenna av avvarðandi nevndum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Viðvíkjandi játtanini á kr. 26.089.624,00 er talan um eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

**Fíggjarnevndin 23. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022: Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá** Heðini Mortensen, borgarstjóri, ið er soljóðandi:

Mælt verður til at taka undir við uppskotinum við broyting í fíggingini. 4,6 mió. kr. verða ikki fíggjaðar av løgukonto innkomuvegur; men verður fíggjað av mettum meirinntøkum í 2022. Um metingarnar ikki halda, verður fíggingin løgd fyri aftur, møguliga sum lántøka.

Broytingaruppskotið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup DAM, Gunvør Balle, Rói B. Poulsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Jan Christiansen.

Uppskotið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Ráðgevar hava nú latið kommununi endaligu heildarætlanina fyri Stórutjørn, sí skjal *Stóratjørn heildarætlan 1sept2023 opnur*.

Innrættingin av býlingunum er skipað soleiðis, at menniskju og djór kunnu liva síð um síð. Bústaðirnir liggja tætt at náttúruni og tó við hóskandi frástøðu fyri at skapa umstøður hjá fuglinum, so hann framhaldandi kann reiðrast í økinum. Grønu geirarnir í økinum eru bindiliðið millum Stórutjørn og býin. Geirarnir skapa eina áhugaverda grøna ferðaleið hjá øllum, sum búgva í stórbýnum og sum ynskja at leita sær niðan í hagan. Stóratjørn liggur uppi í hæddunum, og býlingarnir eru tí harðbalnir. Sum verja ímóti útsynningsættini verða gjørdir vallgarðar, sum veita býlinginum lívd.

Stóratjørn er ein "rættur" býur, við øllum hentleikum og innrættingum, sum skulu til fyri lívsins uppihald. Tað tekur tó nógv ár at gerast ein býur, og meðan býurin veksur, skal hann virka saman við grannalagnum og geva íbúgvunum neyðugu samleikakensluna, sum hoyrir býlinginum ella bygdini til.

Í miðstaðnum er eitt stórt torg, sum skilur seg út frá vanligum býartorgum. Her sæst náttúran aftur við eini tjørn, grasfløtum, trøðum og runnum. Her er eitt pláss, har bussar steðga, skrivstovur, handlar, kaféir og matstovur.

6 býlingar eru, og hvør býlingur er ein sálvirkandi eind, sum inniheldur ymiskar bygningseindir, raðhús, sethús, býarhús við íbúðum, eitt felagsøki við felagshúsi og ein stovnsbygning. Býlingurin er skipaður við ymiskum bústaðarstøddum, bústaðarsløgum og ognarleistum, sum ger, at tú fær fjølbroytni í samansetingini av íbúgvum og soleiðis tryggjar, at býlingurin verður sosialt burðardyggur, sum samstundis er útgangsstøði í felagsskapinum.
Heildarætlanin fevnir um eitt stórt øki, sum smb. ætlanini fer at rúma 800-900 bústøðum, umframt stovnum, miðstaðarbygging og øðrum. Tílík stór øki taka tíð at menna, og tørvurin kann broytast, so hvørt økini verða ment.

Heildarætlanin skal virka sum vegleiðandi grundarlag undir víðari menningini av Stórutjørn, ið til ber at tillaga, so hvørt sum økini verða ment, og sum nýggir tørvir vísa seg. T.d. fer tíðin at vísa, um tað er skynsamt at skipa býling 5 og 6, soleiðis sum heildarætlanin leggur upp til, tá hugsað verður um avmarkaða íbúðartalið man fær, í mun til kostnaðin av at gera lutfalsliga langa vegin til býlingarnar. Eisini kann tað vísa seg, at tørvur verður á at tætta enn meira um byggingina, enn heildarætlanin leggur upp til.

**Skjøl**
- *Stóratjørn heildarætlan 1sept2023 opnur,* journal nr. 18/03468-89.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitetkurin mæla nevndini til at samtykkja heildarætlanina fyri Stórutjørn sum vegleiðandi amboð fyri víðari menningina av økinum og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

# 212/23 Tinglýsing av gøtusambandi matr.nr. 1456a, 1456h og 1452c, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 116/23 | 23/02060-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 230/23 | 23/02060-3 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 212/23 | 23/02060-3 |

**Upprunin til málið**
Samtyktar lendisgøtur á privatum ognum.

**Lýsing av málinum**
Býráðið samtykti í mars at seta pening av til gerð av seks lendisgøtum- og strekkjum fyri árið 2023.

1. Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
2. Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
3. Gøta í Viðarlundini í Gundadali
4. Gøta oman á Sandagerði argjamegin
5. Gøta niðan á Ingibjargargøtu frá Torkilsgøtu
6. Gøta í økinum við Stórutjørn

Hesar seks lendisgøtur – og strekkir – verða í størstan mun gjørdar á kommunalum ognum, har Tórshavnar kommuna hevur ræðisrætt í.

Í sambandi við gerð og sambinding av gøtukervinum í Sortudíki verður gøtustrekki gjørt á matr.nr. 1456a og 1452c, Tórshavn eftir avtalu við eigara, sum víst á kortskjali »*23/02060-4 Gøtur í Sortudíki*«

Matr.nr. 1456a er útlagt, sum fríøki í útstykkingarætlanini.

Mælt verður til, at tinglýsa ein servitutt við einum gøturætti á matr.nr. 1456a og 1452c, Tórshavn, so almenningurin til eina og hvørja tíð kann nýta gøtuna, og har Tórshavnar kommuna somuleiðis fær átikið sær ábyrgdina av viðlíkahaldi av gøtustrekkinum.

Víst verður til deklaratión »*23/02060-5 Servituttur matr.nr. 1456a, 1456h og 1452c. Servituttur um gøturætt*«

Tórshavnar kommuna ognar sær ikki undirlendi, men rættin til at nýta og viðlíkahalda gøtuna, ið kommunan ger.

Kostnaðurin fyri at tinglýsa ein servitutt á ognina er 1000 kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**
*Løgtingslóg nr. 76 frá 17. mai 1994 um tinglýsingargjøld v.m*

§ 1. Fyri tinglýsing verður rindað eitt gjald, sum er 1000 kr.
§ 2. Gjaldið verður rindað fyri eitthvørt skjal, ið verður fráboðað til tinglýsing.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Stjórnarskrivstovan hevur gjørt ein servitutt, ið verður lýstur á ognina. Víst verður til »*23/02060-5 Servituttur matr.nr. 1456a, 1456h og 1452c. Servituttur um gøturætt*«

| | Býráðsfundur<br>28. september 2023 | Blað nr.: 879 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/00992 Lendisgøtur

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/02060-4 Gøtur í Sortudíki
23/02060-5 Servituttur matr.nr. 1456a, 1456h og 1452c. Servituttur um gøturætt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at tinglýsa deklaratión »*23/02060-5 Servituttur matr.nr. 1456a, 1456h og 1452c. Servituttur um gøturætt*« á matr.nr. 1456a og 1452c, Tórshavn, og at biða Umhvørvisstovuna um at lýsa gongurættin á matrikulkortinum, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Súsanna Olsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Blað nr.: 880<br><br>Formansins merki: |

## 213/23 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 20/17 | 17/03196-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 227/17 | 17/03196-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 240/17 | 17/03196-1 |
| 4 Eldranevndin | 21.08.2018 | 4/18 | 17/03196-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 232/18 | 17/03196-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 3/19 | 17/03196-1 |
| 7 Eldranevndin | 14.02.2019 | 20/19 | 17/03196-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 50/19 | 17/03196-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 35/19 | 17/03196-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 110/19 | 17/03196-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 165/19 | 17/03196-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 232/19 | 17/03196-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 35/20 | 17/03196-1 |
| 14 Eldranevndin | 06.02.2020 | 31/20 | 17/03196-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 181/20 | 17/03196-1 |
| 16 Eldranevndin | 10.09.2020 | 12/20 | 17/03196-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 213/20 | 17/03196-1 |
| 18 Eldranevndin | 15.09.2020 | 15/20 | 17/03196-1 |
| 19 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 188/20 | 17/03196-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 146/21 | 17/03196-1 |
| 21 Heilsu- og eldranevndin | 14.09.2021 | 24/21 | 17/03196-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 217/21 | 17/03196-1 |
| 23 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 225/21 | 17/03196-1 |
| 24 Heilsu- og eldranevndin | 08.02.2022 | 3/22 | 17/03196-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 41/22 | 17/03196-1 |
| 26 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 37/22 | 17/03196-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 156/22 | 17/03196-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 180/22 | 17/03196-1 |
| 29 Heilsu- og eldranevndin | 15.11.2022 | 17/22 | 17/03196-1 |
| 30 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 279/22 | 17/03196-1 |
| 31 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 263/22 | 17/03196-1 |
| 32 Heilsu- og eldranevndin | 27.04.2023 | 10/23 | 17/03196-1 |
| 33 Fíggjarnevndin | 27.04.2023 | 135/23 | 17/03196-1 |
| 34 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 117/23 | 17/03196-1 |
| 35 Heilsu- og eldranevndin | 12.09.2023 | 21/23 | 17/03196-1 |
| 36 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 225/23 | 17/03196-1 |
| 37 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 213/23 | 17/03196-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýtt røktarheim umfrant atknýttar røktaríbúðum í høvuðsstaðarøkinum. Tilmælið verður nærri útgreinað niðanfyri.

Í lógini um heimatænastu, eldraøkt v.m. frá 2014 er í grein 13 ásett, at kommunur kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar eftir hesi lóg. Bústaðir kunnu sbrt. stk. 2 fevna um 1) røktarheim, 2) eldrasambýli, 3) eldraíbúðir, 4) umlættingarpláss og 5) samdøgursendurvenjingarpláss.

Viðmerkingarnar til lógina útgreina ikki hesar bústaðarloysnir nærri, ella hvussu tær skulu koma til vega. Ásetingin er ásannandi breiða politiska ynskið um, at bústaðarmarknaðurin eisini til eldri verður meira fjøltáttaður. Eftir stendur tó, at kommunur hava heimild og initiativ til at fáa til vega aðrar bústaðarloysnir enn røktarheim.

Tórshavnar kommuna hevur í dag 203 røktarbúpláss, harav eru 145 búpláss til røktarkrevjandi og 58 búpláss til fólk við demenssjúku. Harafturat eru 11 umlættingarpláss og 5 samdøgurs-rehabiliteringspláss.

Umleið 50 av teimum 145 búplássunum eru Ellisheim/sambýlispláss, sum eru roknað til lættari røktarkrevjandi umframt til onnur, sum eitt nú ikki kunnu búgva einsamøll.

Heilsu- og umsorganartænastan stendur fyri hesum búplássum, men hevur ikki onnur bústaðarsløg at bjóða.

Tá um hesi bústaðarsløg ræður, eins og í mun til onnur nýggj sløg, sum kommunan og heilsu- og umsorganartænastan í dag ikki kunnu bjóða, er týdningarmikið at hava greitt, hvat meint verður við, og til hvønn tørv hjá teimum eldru, ið loysnin er ætlað til. Hetta verður lýst nærri niðanfyri.

Búpláss:

- Búpláss til røktarkrevjandi á røktarheimi er ætlað eldri fólki, sum eru illa fyri, vanliga tí tey eru sjúk og tí hava tørv á at búgva á búplássi við røktarstarvsfólki um tey alt samdøgrið. Fast búpláss er síðsta loysnin, ið brúkt verður, sum fólk gerast verri fyri. Røktarheimini hýsa borgarum, sum krevja røkt og hjáveru alt samdøgrið.

- Ellisheimið og sambýlini hýsa borgarum, sum eru lættari røktarkrevjandi og/ella sum ikki kunnu búgva einsamøll. Tvs., at húsfólk á Ellisheiminum og sambýlinum eru betur fyri, tá tey flyta inn enn tey, sum flyta inn á røktarheim at búgva.

- Eisini demensbúpláss eru røktarbúpláss, har røktarstarvsfólk eru til staðar alt samdøgrið, men hesi búpláss eru á stovnum ella deildum, sum einans eru ætlað eldri fólki við demenssjúku. Fólk við demenssjúku hava aðrar avbjóðingar enn eldri fólk við øðrum røktarkrevjandi sjúkum, og tí tørvar teimum at sleppa á búpláss, sum serliga eru ætlað fólki við demenssjúku.

Íbúðir:
Við støði í lógarásetingini, sum nevnd er omanfyri, so eru eldraíbúðir eisini bústaðarloysn, ið kommunur kunnu stovna. Ymiskt kann leggjast í fatan av, hvat ein eldaríbúð er, tí talan er um felagsheiti fyri ymsar bústaðarloysnir.

Niðanfyri verður felagsheitið eldraíbúð brotið upp í tvær ymiskar bústaðarloysnir – røktaríbúð og eldravinarliga íbúðir. Hesar kunnu aftur býtast sundur alt eftir, hvørt talan eru leiguíbúð ella eigaraíbúð.

Felags fyri allar eldraíbúðir er tó, at tær skulu vera innrættaðar hóskandi við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og rúmligum baðirúmi, so tað er pláss fyri koyristóli og hjálparfólki. Íbúðirnar skulu ikki hava trappu til høvuðsinngond, og um íbúðin er ikki í veghædd, skal lyft vera til íbúðina.

Eitt annað, ið eisini er øðrvísi við eldraíbúðum í mun til búpláss á røktarheimi er, at í íbúðunum kunnu búgva hjún/sambúgvandi.

- Røktaríbúð vil vanliga vera næstsíðsti bústaðurin, áðrenn upptøku til fast røktarheimspláss. Hetta vilja vera borgarar, sum heimatænastan hevur veitt tænastur til, men har mett verður, at borgarin og evt. saman við makanum høvdu fingið betri umstøður við at flyta í røktaríbúð, har røktarstarvsfólk eisini er knýtt at alt samdøgrið. Málbólkurin vildi eisini verið borgarar, sum í dag vera visiteraðir til ellisheim/sambýli.

  Røktaríbúðir kunnu við tí størsta fyrimuni byggjast saman við einum røktarheimi, har borgarin fær ágóða av øllum felagsfasilitetunum eitt nú venjingarumstøðum og trivnaðartilboðum annars. Eru røktaríbúðir knýttar at røktarheimi, verða tað starvsfólk á røktarheiminum, sum veita ta heimatænastu, ið borgarin annars vildi fingið sum heimabúgvandi. Hetta lættir sostatt um hjá heimatænastuni, men krevur ávísa tillaging av røktarnormeringini á heiminum.

  Kommunan hevur heimild byggja og reka røktaríbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónina um hendi. Til ber tó eisini, at aðrir partar byggja og reka røktarleiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu hevur visitatiónsrætt til allar røktaríbúðirnar.

- Eldravinarliga íbúð er íbúð, sum er innrættað hóskandi sum omanfyri lýst við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og bað o.s.fr. Onnur krøv eru sum so ikki, og íbúðin kann eins væl nýtast av øðrum yngri borgarum.

  Eldravinarlig íbúð kann tí byggjast sum einstakar íbúðir í størri íbúðarbygningi ella sum eldraíbúðardepil, tvs. nógvar eldravinarligar íbúðir í sama kompleksi. Alt eftir, hvussu nógvar eldravinarligar íbúðir vildi verið í slíkum kompleksi, har tað eisini mest sannlíkt er ávíst tal av borgarum, sum hava tørv á heimatænatuni, kundi hølisumstøður til heimatænastu verið knýttar at staðnum.

  Kommunan hevur heimild at byggja og reka eldravinarligar íbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónsrætt. Til ber tó eisini, at aðrir partar, t.d. Bústaðir ella íleggjarar, byggja og reka eldravinarliga leiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu eisini hevur visitatiónsrætt til nakrar ella allar teirra.

  Har tað í mun til røktaríbúðir vilja verða borgarar, sum frammanundan fáa heimatænastu og aðrar tænastur frá heilsu- og umsorganartænastuni, ið verða visiterað til røktaríbúð, so nýtist ikki sama at verða galdandi fyri eldravinarligu íbúðirnar. Talið av pensjónistum økist í stórum, og nógv av hesum eru vegna góða heilsustøðu als ikki í skipanini hjá heilsu- og umsorganartænastuni.

  Skal heilsu- og umsorganartænastan visiterað til eldravinarligar íbúðir, má gerast ein skipan, har ávís metingarkriteriu eru ásett, eisini fyri at ikki at hava fleiri bíðilistar til somu íbúðir (at fólk skriva seg upp bæði hjá kommununi og t.d. Bústøðum).

Út frá omanfyri standandi verður mett skilabest í mun til tey bútilboð, ið heilsu- og umsorganartænastan skal veita, at røktaríbúðir og røktarheim verða bygd í somu bygging ella beint upp at.

Røktaríbúðir er í føroyskum samanhangi nýtt konsept, ið skal mennast, eitt nú í mun til samstarv við aðrar áhugapartar – eitt nú Bústaðir, byggivinnuna, fíggjarstovnar v.m. Røktaríbúðirnar, hóast bygdar saman við ella upp at einum røktarheimi, eru leiguíbúðir, og kunnu tí byggjast og umsitast við støði í tí, men har kommunan tryggjar sær fullan visitatiónsrætt.

Júst hvussu hetta kann gerast ella hvørjir samstarvshættir eru møguligir, eigur henda verkætlanartilgongdin at koma til niðurstøðu um.

Í virkisætlanini er víst á ein endurnýggjanartørv, tvs. antin dagføra ella niðurleggja verandi ótíðarhóskandi pláss. Víst er eitt nú á Ellisheimið, sum krevur umfevnandi dagføringar, ið illa loysa seg fíggjarliga. Verkætlanartilgongdin eigur eisini at fyrihalda seg til henda spurning m.a. við atliti at, hvussu hesi 27 búplássini kunnu endurnýggjast møguliga sum eitt lutfall millum føst røktarbúpláss og røktaríbúðir aftrat tí tørvi, sum røktarheimið annars skal røkka.

Í sambandi við bygging av nýggjum røktarheimi skal vælferðartøkni og snildtøkni (samskiftisútgerð, trygdar- og ávaringarskipanir) integrerast.

Til tess at seta hol á bygging av nýtt røktarheim, verður mett skilabest at seta bygginevnd við støði í mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur tveir nevndarlimir og borgarstjórin tilnevndi eitt umboð fyri ávikavist teknisku fyrisiting, miðfyrisitingin og trivnaðarfyrisitingina.

Bygginevndin skal sum tað fyrsta útvega byggiskrá og definera bygingina nærri í mun til støddir, luftfall røktarbúpláss, harundir eisini demensbúpláss, og røktaríbúðir, eins og at bygginevndin saman við politisku skipanini annars mennir ein samstarvsshátt við aðrar áhugapartar í sambandi við bygging og umsiting av røktaríbúðum.

Til endamálið er neyðugt við játtan til fyrireikingar, ráðgeving v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at seta bygginevnd til sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi játta kr. 1 mió til fyrireikingar, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.

**Eldranevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Bjørghild Djurhuus og Bergunn Kass í bygginevndina.

**Ískoyti:**
26 okt. 2017 samtykti býráðið at seta bygginevnd sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi at játta kr. 1. mió til fyrireiking, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.
Bygginevnd bleiv sett fyrst í hesum árinum og hevur havt tveir fundir. Bygginevndin metir, at arbeiðssetningurin er ikki nóg neyvur og ynskir tí at fáa ein greiðari arbeiðssetning, áðrenn nevndin kann fara víðari við arbeiðinum. Serliga verður hugsað um at fáa nágreinað, hvussu nógv húsfólk røktarheimið skal byggjast til.

Sambært nýggjastu framrokningunum hjá Hagstovuni verður mett, at tað vera 1.124 fólk eldri enn 80+ ár í Tórshavnar kommunu í 2025. Í 2018 er hetta tal 811 fólk. Fyri at nøkta vaksandi tørvin á røktarheimsplássum til ta tíð, er neyðugt at økja um búplássini.

Umframt at byggja til vaksandi tørv á búplássum, er – sum lýst í virkisætlanini (j.nr. 17/00586) og málslýsingini frammanfyri- ætlanin, at nýggja røktarheimsbyggingin skal vera við til at endurnýggja verandi pláss, sum eru ótíðarhóskandi, fyrst og fremst Ellisheimið.

Sum kunnugt verður umbyggingin av Tjarnargarði í løtuni projekterað, har pláss verður fyri 7 nýggjum umlættingarplássum til fólk við demenssjúku – arbeiðið verður eftir ætlan boðið út um stutta tíð. Harafturat verður umlættingar- og rehabiliteringsdepil við 28 plássum fyrireikaður. Tá hesar ætlanir eru komnar á mál, verða 9 av verandi plássum umløgd til føst búpláss.

Umframt omanfyri nevndu átøk, so verður mett neyðugt, at nýggja røktarheimið hevur 48 búpláss, t.e. tríggjar deildir við 16 húsfólkum á hvørjari deild eins og Lágargarður, umframt 8 røktaríbúðir. Hetta gevur í alt 56 pláss. Av hesum 56 plássum er ætlanin, at 25 av hesum er endurnýggjan av plássunum á Ellisheiminum, ið soleiðis kann niðurleggjast sum ellisheim.

Hesar ætlarnir tilsamans geva í 2025 eitt dekningsstig á 26,5% , sí talvu niðanfyri, og sum er eitt vet hægri enn dekningsstigið í dag.

| TÓRSHAVNAR KOMMUNA | Ár 2000 | | Ár 2010 | | Ár 2019 | | Ár 2020 | | Ár 2025 | | Ár 2030 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal, 80+ ár | 457 | | 669 | | 850 | | 906 | | 1.124 | | 1.415 | |
| **Pláss/Fólkatal 80+ ár (dekningsstig)** | | | | | | | | | | | | |
| **Pláss/Dekningsstig** | 97 | 21,2% | 155 | 23,2% | 222 | 26,1% | 251 | 27,7% | 298 | 26,5% | 298 | 21,1% |
| *har av røktarbúpláss* | 87 | 19,0% | 145 | 21,7% | 204 | 24,0% | 213 | 23,5% | 252 | 22,4% | 252 | 17,8% |
| *har av stutttíðarpláss* | 10 | 2,2% | 10 | 1,5% | 18 | 2,1% | 38 | 4,2% | 38 | 3,4% | 38 | 2,7% |
| *har av røktaríbúðir* | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 8 | 0,7% | 8 | 0,6% |

**Fólkatalsframrokning 80+ ár pr. 06.06.2018, hagstovan.fo*

**íroknað nýggjum Umlættingar- og rehabiliteringsdepli og útbyggingini av Tjarnargarði til demensdepil*

*Nýtt røktarheimi + endurnýggja plássini á Ellis-heiminum.*
*(+) 48 (-) 25 = 23 nýggj*
*(+) røktaríbúðir = 8 stk.*
*(+) eina lon afturat á 16 stk.*

Eitt nýtt røktarheim við 48 búplássum og 8 røktaríbúðum verður mett at vera skilagóð stødd, eisini sum rakstrareind. Búeindir á 16, sum ofta verður koyrt í 2, tvs. 8 og 8 á somu eind er eisini skilagóð stødd í mun til at fólk búgva saman.

Mett verður harafturat skilabest, at staðseting og byggingin er soleiðis háttað, at til ber at byggja røktarheimið út seinni.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og eindarleiðararnir í H og U mæla til at samtykkja fylgjandi arbeiðssetning fyri ætlanina:

At fáa til vega byggiskrá fyri bygging av nýggjum røktarheimi við 48 búplássum og 8 atknýttum røktaríbúðum, at staðsetingin og byggingin kann skipast soleiðis at tað lættliga ber til at útbyggja røktarheimið við einari ella tveimum deildum eftir tørvi.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og staðsetingina í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at mæla býráðnum til at broyta byggiskránna fyri bygging av nýggjum røktarheimi til at fevna um 64 búpláss og 16 røktaríbúðir og at beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina viðvíkjandi staðseting.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggiverkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður mett, at tørvur er á einum bygningi samsvarandi 6600 m$^2$ í byggistigi. Her er sum heild talan um ein bygning í tveimum hæddum, sum tó verður tilevnaður eftir tørvi og ynskjum, sniðgeving, innrætting og ikki minst hvussu bygningurin verður staðsettur í landslagnum. Tørvur er tískil á einum øki á í minsta lagi 11.000 m$^2$. Og verður hugsað um møguligar framtíðar útbyggingar, er talan um eitt samsvarandi størri øki.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin um øki til eitt nýtt røktarheim við røktaríbúðum í tráð við býarplanleggingina, og vísir umsitingin á eitt øki úti í Marknagili í Tórshavn, sí kortskjalið “*Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort*”.

Um hugt verður eftir Marknagili sum býarparti, so er økið nógv broytt seinastu tíðina við stórum byggiverkætlanum, sum somuleiðis skapa nógv virksemi í økinum. Sambært kommunuætlanini er Marknagil ein býarpartsdepil, har býarvøkstur verður skipaður við at miðsavna ymiskt virksemi á einum

stað. Í býarpartsdeplinum skal fram um alt vera virksemi sum handlar við gerandisvørum, stovnar, skúlar, útbúgving, býlingshús og mentanarligt virksemi.

Økið, sum umsitingin vísir á, er partur av ávegis heildarætlanini fyri økið við og omanfyri býlingin undir Fjalli. Skipanaruppskotið í heildarætlanini fevnir um infrakervi, bústaðarbygging og almennar stovnar, og er økið millum Dánjalstrøð og íbúðarbyggingina MARK lagt út til stovnsbygging. Eitt ellisheim hóskar væl inn í býarskipanina í økinum, og hóast økið liggur upp at einum høvuðsvegi, so verður bygt burtur frá ferðsluni í sera náttúruvøkrum umhvørvi, har byggingin somuleiðis tekur atlit til verandi lendið.

Í sambandi við skipanaruppskotið skal infrakervið í økinum víðkast. Dánjalstrøð gerst høvuðsvegur til nýggja útstykking, og í sambandi við eitt nýtt ellisheim er neyðugt at gera fyrsta strekkið av vegnum, sum er áleið 220 metrar. Ein yvirskipaður kostnaður er kr. 25.000 + mvg pr./m.

Økið er partur av Húsahaga, matr. 1160a, umframt matriklunum 1172a og 1176. Eitt hóskandi øki skal frámatrikulerast til endamálið, og er neyðugt við eini marknaumskipan, sum verður send Umhvørvisstovuni til avgreiðslu.

Økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum eru øki ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál, umframt stórum almennum stovnum til umsiting, skúlaskap og heilsurøkt. Neyðugt er sostatt at broyta almennu byggisamtyktini til endamálið, umframt at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri nýggju útstykkingina.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Skipan av økinum oman fyri Marknagilsvegin og undir Fjalli, journal nr. 18/01811.

**Skjøl:**
Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort, journal nr. 17/03196-15

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til prinsipielt at góðkenna staðsetingina, at umsitingin arbeiðir víðari við staðsetingini og myndugleikaviðgerð, at beina málið í eldranevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bjørg Dam, mælir til at finna aðra staðseting nærri sjónum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Eldranevndin 14. februar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**

Í sambandi við ætlanina at staðseta nýtt røktarheim og gera nýggja vegaføring úti í Marknagili, hevur eigarafelagið á Dánjalstrøð sent kommununi mótmæli, har sjónarmiðini í høvuðsheitum eru:

- at neyðugt er at broyta byggisamtyktina til endamálið, tí økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi verður harðliga mælt ímóti, at býráðið ætlar at strika økið sum D1 øki, tí tey seinastu 30 árini hava tey innrættað seg eftir, at økið er lagt út til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál.
- at eigarafelagið í áravís hevur mótmælt, at ein av mest trafikeraðu vegum í landinum verður lagdur 2-3 metrar frá sethúsabyggingini á trøðni. At leggja ein somikið trafikeraðan veg á hetta D1 økið er so langt burtur frá hesum endamáli, sum til ber at hugsa sær, sí annars mótmælið.

Yvirskipaða ætlanin fyri økið undir Fjalli er samtykt, og verður mett, at staðsetingin til eitt nýtt røktarheim hóskar seg væl í hesum náttúruvakra økinum. Tá tosað verður um býarskipan, typologi og staðsetingar av hesum, verður í dag stórur dentur lagdur á at staðseta heim til eldri í einum nærumhvørvi við nógvum aktiviteti. Her verður serliga hugsað um dagstovnar, skúlar, handil við gerandisvørum eins og bústaðir. Ynski hevur verið frammi um at staðseta eitt røktarheim nærri sjónum, har dentur verður lagdur á eina hugsan um friðsælu. Í veruleikanum verður eitt heim nærri sjónum meiri avbyrgt, bæði í mun til ta fysisku planleggingina og nærveruna í sambandi við gerandislívið. Granskað hevur somuleiðis verið í einsemi hjá búfólki, og vísir granskingin, at nærveran við onnur menniskju hevur sera stóran týdning.

Talan er framvegis um eitt D1 øki, sum framhaldandi verður fríøki, fyri uttan tað økið, sum verður lagt av til sjálvt røktarheimið. Økið, har røktarheimið verður staðsett, verður í tilgongdini broytt til ásetingina D3, sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er lagt av til miðstaendamál, umframt skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

Arbeitt hevur verið við nýggju vegaføringini, sum er ein liður í eini størri ætlan fyri infrakervið kring Havnina. Leingi hevur ligið í kortunum og tað er somuleiðis av stórum týdningi og neyðugt, at eitt vegasamband millum komandi innkomuveg og Marknagil verður gjørt gjøgnum hetta grøna økið. Her er talan um ein kommunalan veg, og er ætlanin, at niðasti parturin av vegnum verður fyrsta stigið í ætlanini, sum somuleiðis verður atkomuvegur til nýggja røktarheimið. Vegurin verður í størst møguligan mun fluttur yvir ímóti grøna økinum fyri at skapa rúm ímillum veg og verandi bygging, og verða harumframt báðar áirnar varðveittar, sum tær eru í dag. Eftir ætlan leggur vegurin seg niður í lendið, og kemur hann soleiðis ikki at ávirka røktarheimið nakað serligt, umframt at tað verður møguligt at planta á økinum millum veg og útstykkingina, sum eigarafelagið umboðar.

Fyri røktarheims verkætlanina er tað av stórum týdningi, at staðsetingin fyri røktarheimið verður staðfest og samtykt, soleiðis at fyrireikingararbeiðið kann halda áfram. Somuleiðis skal kunnast um, at verður neyðugt at finna aðra staðseting og um hetta dregur út, so kemur hetta at ávirka upprunaligu tíðarætlanina fyri bygging av røktarheiminum. Mælt verður tískil til, at støða verður tikin til um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið.

**Skjøl:**
Eigarafelagið á Dánjalstrøð - mótmæli, journal nr. 17/03196-24.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at nevndin tekur støðu til, um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið, og um verandi staðseting verður samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at halda fast við verandi staðseting og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, beinir málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at viðgera staðseting og vegatkomu.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt nýtt uppskot til staðseting av byggingini, soleiðis at byggingin verður flutt út í D3 øki, sum í mun til byggisamtyktina er lagt út til almennar stovnar.
Staðsetingin er tillagað vegaprosjekt, sum fyriliggja sum fyribils ætlanir. Tillagingar kunnu koma fyri, og má roknast við at tað verða tillagingar í mun til endaliga verkætlan.
Byggjast skulu uml. 6600 fermetrar, og er tørvur á einum byggiøki á 11000 fermetrar.
Íbindingarvegurin verður umskipaður, og vegaprosjekt skal gerast ísv. fyrireikingar av Røktarheiminum, soleiðis at linjuføringin er so skynsom sum til ber.

**Skjøl:**
17-031196-29 uppskot til staðseting januar 2020

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at tikið verður undir við uppskotinum til staðseting í D3 økinum
- at skipanaruppskot verður gjørt fyri økið,við vegalinjum og byggiøkjum.
- at farið verður undir lýsa hvussu vit skulu byggja røktarheim í framtíðini.
- at ein byggiskrá til nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður gjørd.
- at upp til kr. 700.000 verða játtaðar til omanfyri nevnda arbeiði.

Umframt at beina málið í eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Eldranevndin 06. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Hugt hevur verið eftir nýggjum staðsetingum til at byggja nýtt røktarheim og røktaríbúðir í Tórshavn, Hoyvík og Argjum. Tørvur er á einum øki á uml. 20.000 $m^2$ til at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Harafturat skal øki leggjast av til møguliga víðkan/útbygging av røktarheiminum og møguliga fleiri røktaríbúðum. Enn er óvist hvussu stórur tørvurin er á til víðkan/útbygging, men skal hetta nágreinast nærri í tilgongdini.

Høvuðsstaðurin er vaksin nógv, og torført er at finna hóskandi stór økir til endamálið. Neyðugt er tí at hyggja eftir økjum í útjaðaranum á býnum, sum eru partur av býartættingini og býarvakstrarøkjum, umframt teimum møguleikum, sum liggja inni í býnum.

Økið við Stórutjørn er sambært Kommunuætlanini fyrsta býarvakstrarøki, sum skal skipast til ein nýggjan býling í Tórshavn. Hoyvíkin er vaksin nógv seinastu árini, og við mongu íbúgvunum hevði eisini verið hóskandi at bygt eitt nýtt røktarheim í Hoyvík, tí einki er í økinum í dag. Kirkjugarður er skipaður í økinum, og við teimum alsamt fleiri vaksandi hentleikunum, hevði eisini ligið væl fyri at skipað bústaðir til eldru borgararnar í økinum.

Arkitektakapping var í vár um skipan av Stórutjørn, og skal endaliga skipanin og projekteringin setast í verk so skjótt játtan er tøk til hetta. Tá arbeiðið verður raðfest, eigur eitt hóskandi øki at verða sett av til nýtt røktarheim við  røktaríbúðum.

Skjal nr. 17/03196-33 lýsir Stórutjørn og hvat krevst fyri at fara inn á økið við einum røktarheimi.

**Skjøl:**
Staðseting_Stóratjørn, journal nr. 17/03196-33

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum við Stórutjørn, at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum og møguligum tilhoyrandi útbyggingum, og beina málið í býráðið umvegis eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Eldranevndin 10. september 2020:** Útsett.

**Eldranevndin 15. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Eldranevndini og meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, mælir til at finna aðra hóskandi staðseting nærri miðøkinum.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið vaðr einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin at skipa økið á Stórutjørn er farin av bakkastokki, men er talan um ein longri tíðarkarm, áðrenn nøkur ítøkilig ætlan kann skipast á økinum. Fyri at koma í gongd við verkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum er neyðugt at finna endaligu staðsetingina, og tí hevur verið hugt eftir møguligum øðrum staðsetingum til verkætlanina.

Økið eystan fyri Dalin Langa í Hoyvík varð í kommunuætlanini frá 2014 lagt út sum møguligt býarvakstrarøki í Hoyvík. Økið, sum verður nevnt Stórabrekka, liggur á eini høvd oman fyri vinnuøkið við Vegin Langa í 100 m hædd við stórslignum útsýni móti norðuri, eystri og suðri. Økið er óslætt heyggjalendi og liggur somuleiðis út til Dalin Langa, sum er eitt rekreativt øki við gongu/súkklubreyt og uppihaldsøki við Myllutjørn. Henda staðsetingin hevur áður verið nevnd í sambandi við at byggja nýtt røktarheim, men gjørdist hetta ikki aktuelt, tí ynski var at byggja bústaðir á Stórubrekku. Henda ætlanin er nú slept, og verður tí mælt til at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á Stórubrekku.

Á Stórubrekku eru umleið 35.000 m$^2$ av lendi, sum byggjast kann á. Tørvur er á einum stórum øki til verkætlanina, umframt at øki skal leggjast av til møguliga víðkan. Stórabrekka liggur innan fyri Klingruna, og er tí longu ein partur av bygda økinum, mótsett Stórutjørn sum fer at liggja sum byggiøki í eitt tíðarskeið, meðan bygt verður. Økið er stórt, og eru góðir møguleikar at byggja lutvíst í einari hædd, sum ynski er um, og at víðka um byggingina seinni, um tørvur er á tí.

Økið liggur millum Dalin Langa og stóra vinnuøkið, sum hevur grivið seg inn undir landslagið. Hetta inntriv, sum er gjørt í lendið í vinnuøkinum, er sera ógvusligt og eirindaleyst sprongt burtur, fyri at fáa fleiri fermetrar til goymslur v.m. Ein trygdargeiri áljóðandi 30 metrar er lagdur parallelt við kantin, og kann ikki byggjast á hesum strekkinum, men kann hetta teljast við í byggistigið.

Vegasamband er frá Klingruni, og lætt er at skipa gøtur og fríøki í økinum, sum kunnu gerast partur av gøtukervinum til Dalin Langa og grøna nærumhvørvið. Góður sólargangur og gott útsýni er til allar síður frá Stórubrekku, tí økið liggur høgt og skránar til allar síður. Lívd er ikki nógv av í verandi støðu, men við

skilagóðari skipan av bygging, fríøki, vøkstri, parkering og atkomum við gøtusambondum, kann lívd fáast til uppihald og gróðursett øki.

Stórabrekka liggur sum framhald av rehabiliterings- og umlættingardeplinum URD, og kann eitt nýtt røktarheim samvirka við stovnin og uttanumøki, sum somuleiðis verður lýst í ritgerðini "Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD". Í stuttum fevnir uppskotið um sambandi millum endurvenjing og ágóðan av at vera í náttúruni sæð út frá einum sjónarmiði at menniskju liva alsamt longri.

Økið, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, er fevnt av umráðispartinum A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðarbygging. Eitt nýtt røktarheim rúmast ikki innanfyri ásetingarnar, og er neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina til umráðispart D3, sum verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt. Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt, og skal nýggj serstøk byggisamtykt tí gerast sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini. Økið á Stórubrekku er partur av matr. nr. 138a, og skal eitt hóskandi øki tí sundurbýtast til endamálið.

Skjøl:
- Stórabrekka - Staðseting (kortskjal), journal nr. 17/03196-34.
- Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD, journal nr. 17/03196-33.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til:
- at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum á Stórubrekku
- at broyta almennu byggisamtyktina og gera nýggja serstaka byggisamtykt
- at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum
- og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen og Ruth Vang, samtykti at taka undir við staðsetingini av røktarheiminum og røktaríbúðunum á Stórubrekku í Hoyvík og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Ískoyti**:
Framtíðar røktarheimsbygging – námsferð.

Býráðið hevur samtykt at byggja nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 atknýttum røktaríbúðum.

Fyrireikandi arbeiðið er farið í gongd. Hetta er stór verkætlan, og sum støðan er við vaksandi tali av eldri borgarum og minkandi arbeiðsmegi, er neyðugt at hugsa nýtt, tá bygt verður. Neyðugt er at tryggja, at eitt nýtt røktarheim er soleiðis bygt og útgjørt at tað í størst møguligan mun tekur atlit til hesa avbjóðing. Í hesum sambandi er neyðugt at eisini vælferðartøknin er hugsað inn í loysnirnar á heiminum.

Ráðstevna um fremtidens boligbyggeri verður í Keypmannahavn 17.-18. november 2021.

https://nohrcon.dk/produkt/temauge-om-byggeri-og-indretning-af-pleje-og-seniorboliger-2021/kobenhavn-2021-11-16/

Tað er Nohrcon www.nohrcon.dk sum skipar fyri ráðstevnuni. Skráin fyri dagarnar er viðfest. Prísur og avsláttur framgongur av heimasíðuni.

Ætlanin er at bygginevndin og eldranevndin saman við viðkomandi fólki frá umsitingini fara til hesa ráðstevnu at kunna seg um og fáa inspiratión til bygging av nýggjum røktarheimi og røktaríbúðum.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúi í heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla til at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og leggja málið fyri fíggjarnevndina til samtyktar.

**Heilsu- og eldranevndin 14. september 2021:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Kári Johansen og Birgir Nielsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini um staðseting.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

Nevndin tekur eisini undir við tilmælinum um at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og meirilutanum í Heilsu- og eldranevndini.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er byrjað at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum. Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu stendur fyri hesum arbeiðinum at gera byggiskránna.

Byggiskráin verður eftir ætlan liðug í medio 2022. Og verkætlanin skal eftir ætlan bjóðast út hareftir - ultimo 2022. Bygginevndin hevur tikið støðu til at bjóða arbeiðstøkuna út í høvuðsarbeiðstøku. Grundgevingin er í høvuðsheitum, at verkætlanin er sera stór í vavi. Tað er avbjóðandi at byggja bæði røktarheim og eisini íbúðir í einum samlaðum prosjekti. Ætlanin er at bjóða ráðgevaraarbeiðið út skjótast til ber. Bygginevndin metir, at tað er lættari og betri at tillaga prosjektið sum longst í eini tilgongd saman við vinnandi ráðgevaratoymi - til tess at fáa eina so góða verkætlan sum gjørligt.

Ynski er eisini at leggja dent á vælferðatøkni sum heild í røkt í Tórshavnar kommunu. Vælferðatøkni er nógv frammi í verkætlanum í Norðurlondum. Umsitingin er í gongd at gera fáa lýst krøv til vælferðatøkni í byggiskránni, soleiðis at hetta verður knýtt í hesa verkætlan.

Fígging:
Samanlagt eru 10 mió tøkar av løgukarmi konto 2775 eldrarøkt til uppstart, forkanningar, ráðgeving, fyrireiking til útbjóðing av verkætlanini.

- Játtaðar eru 4 mió. av karminum fyri 2021
- Játtaðar eru 6 mió. av karminum fyri 2022

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- At játta kr. 4 mió. av karminum fyri 2021, konto 2775, LK27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum

- At játta kr. 6 mió. av karminum fyri 2022, konto 2775, LK27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum
- Flyta peningin áljóðandi samanlagt 10 mió. á konto 2775 eldrarøkt(íløgur), L27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum.
- Geva umsitingini heimild at bjóða verkætlanina út eftir leisti og útbjóðingarhátti, sum bygginevndin mælir til.
- Geva umsitingini heimild at fara undir sáttmálasamráðingar við vinnandi ráðgevarafyritøku.

Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 08. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at støða verður tikin til leist og útbjóðingarhátt, tá ið byggiskráin er liðug.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er í gongd at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum. Neyðugt er at taka støðu til, hvør útbjóðingarháttur skal vera, tí m.a. skulu kappingartreytir og útbjóðingarháttur lýsast í byggiskránni.

Tilmælið er at bjóða arbeiðstøkuna út í høvuðsarbeiðstøku. Grundgevingin er í høvuðsheitum, at verkætlanin er sera stór í vavi. Tað er avbjóðandi at byggja bæði røktarheim og eisini íbúðir í einum samlaðum prosjekti. Ætlanin er at bjóða ráðgevaraarbeiðið út skjótast til ber. Mett er at tað er betri fyri verkætlanina at tillaga prosjektið sum longst í eini tilgongd saman við vinnandi ráðgevaratoymi - til tess at fáa eina so góða verkætlan sum gjørligt.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at bjóða verkætlanina út eftir leisti og útbjóðingarhátti sum lýst omanfyri.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Útsett við atliti til at lýsa ymisku útbjóðingarhættirnar.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Teldupostur sendur limunum í fíggjarnevndini 23. juni 2022: kann fíggjarnevndin taka undir við tilmælinum frá bygginevndini um at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu?

**Fíggjarnevndin samtykt við telduposti 27. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum er liðugt. Byggiskráin er endaliga granskað og er nú klár at bjóða út. Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu hevur staðið fyri hesum arbeiði at gera byggiskránna.

Verkætlanin varð boðin út til undangóðkenning tann 5. septembur 2022 fyri ráðgevaratoymi. 7 Ráðgevaratoymi hava boðið inn. Høvuðsráðgevararnir í hvør sínum toymi vóru hesir:

ARKITEKTAR 99 / BIG
EYA/CUBO
KONTRAST
MAP
OSBJØRN JACOBSEN / HENNING LARSEN
SNA
ZETA/BRIM

Út frá eini heildarmeting hevur bygginevndin valt at fara víðari við fýra ráðgevaratoymum, sum vóru útvald og grundað á meting av førleikunum hjá umsøkjarunum, hvussu viðkomandi framsendu tilvísingarnar vóru. Tey valdu ráðgevaratoymini eru:

EYA/CUBO
HENNING LARSEN NA
MAP
SNA

Eftir ætlan verður lidna byggiskrá og tilhoyrandi útbjóðingartilfar sent út í hugskots/prosjektkapping í desembur 2022 til omanfyristandandi fýra ráðgevaratoymi, sum skulu lata sítt tilboð inn eftir ætlan í marts 2023.
Fyri tey tilboð, sum lúka treytirnar (eru kondisjónsmessig), men sum ikki vinna útboðið, verður latin samsýning á 350.000,- kr. Peningur er tøkur til endamálið.
Vinnarin fær í boði at skriva sáttmála við Tórshavnar kommunu um uppgávuna. Uppgávan umfatar heildarráðgeving í sambandi við gerð av skipanaruppskoti, verkætlanaruppskoti, forprosjekti, høvuðsprosjekti, útboði í høvuðsarbeiðstøku, umframt uppfylging og eftirlit í sambandi við útinnan. Uppgávan umfatar eisini tilhoyrandi útiøki.

Heildarráðgevingaravtala kemur aftur í nevnd og væntast at verða klár í seinasta lagi í apríl 2023.

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:
- At góðkenna byggiskrá, sum fyriliggur.
- Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 15. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, við tí viðmerking at byggitíðin verður partur av kappingartreytunum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Byggiskrá og tilhoyrandi útbjóðingartilfar varð sent út í hugskots/prosjektkapping í desembur 2022 til niðanfyristandandi fýra ráðgevaratoymi:

EYA
HENNING LARSEN NA
MAP
SNA/SMJ/LBF

Tilboðini komu inn 14 mars 2023

Dómsnevndin hevur eftir gjølla gjøgnumgongd av innkomnu uppskotum, gjørt niðurstøðu útfrá teimum kriterium, sum vóru sett í útbjóðingartilfarinum.

Dómsnevndin hevur 27.03.2023 lagt úrskurðin fyri bygginevndina, sum hevur samtykt at taka undir við niðurstøðuni hjá dómsnevndini.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til:

- At góðkenna úrslitið og dómsnevndarálitið, sum dómsnevndin mælir til og bygginevndin hevur samtykt
- Geva umsitingini heimild at fara undir sáttmálasamráðingar um projektering og ráðgeving við vinnandi ráðgevarafyritøkuna og venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.
- Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 27. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í sáttmálasamráðingum við ráðgevarafyritøkuna EYA, sum vann kappingina um prosjektering og heildarráðgeving av Røktarheimi á Stórubrekku.

Nú fyriliggur uppskot á ráðgevarasáttmála millum Tòrshavnar.kommunu og ráðgevarafyritøkuna EYA.

Samlaði kostnaður á heildarráðgeving er 23.300.000 kr. u/mvg., sum svarar til ein samlaðan kostnað á 24.756.250kr í mvg(6,25%).

Verkætlanin verður eftir ætlan liðugt prosjekterað medio 2024.Vísandi til fylgiskjal 9 verða 16.077.000 u/mvg – sum svarar til 17.081.812,5 v/mvg – brúktar til prosjektering fram til medio 2024. Síðani skulu 7.223.000 – sum svarar

til 7.674.437,50 v/mvg – brúkast til eftirlit, prosjekt uppfylging og 1 ára gjøgnumgongd undir byggitíðini, sum er eftir ætlan umleið 3 ár.

Bygginevndin hevur á fundi 12.09.2023 gjøgnumgingið og góðkent sáttmálan, men hevur tað viðmerking til sáttmálan, at fylgiskjal 4, Tíðarætlanin, eigur at verða endurskoðað í mun til at hædd verður tikin fyri neyðugu nevndarviðgerðunum í avvarðandi nevndum. Hetta kemur helst at leingja projekteringstíðarskeiðið nakað.

Umsitingin hevur ætlanir at bjóða størstu byggifyritøkunum í Føroyum at geva tilboð at gera Røktarheimið á Stórubrekku. Hetta verður eftir ætlan klárt at bjóða út í høvuðsarbeiðstøku í august 2024.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingrstjórin, tekniski stjórin, býararkitekt-urin og leiðarin á bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til:

• at taka undir við fyriliggjandi uppskoti upp á ráðgevarasáttmála, tó við fyrivarni um at fylgiskjal 4, Tíðarætlanin, verður endurskoðað.
• at játta samlaða kostnað á heildarráðgeving á 24.756.250krv/mvg., fíggjað soleiðis:

 15 mio. kr. av karminum LK 27012 nýtt røktarheim við røktaríbúðum at flyta á L 27012 røktarheim við røktaríbúðum
 2.081.813 kr. er tøkar á L 27012 og verða somuleiðis brúktar til endamálið
 Restin av upphæddini sum ikki fellur fyrrenn í 2025, 7.674.437 kr. verður játta á FÆ 2025 til L 27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum.

• at geva umsitingini heimild at bjóða út í høvuðsarbeiðstøku til størstu byggifyritøkurnar í Føroyum í 2024, tá ið verkætlanin er liðug prosjekterað og klár at bjóða út.
• at geva umsitingini heimild at fara í sáttmálasamráðingar við vinnandi byggifyritøku, sum hevur besta tilboðið at byggja Røktarheimið á Stórubrekku.
• Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 12. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

## 214/23 Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux matr. nr. 1083r, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 35/21 | 21/00676-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 158/21 | 21/00676-7 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 193/21 | 21/00676-7 |
| 4 Tekniska nevnd | 10.01.2022 | 4/22 | 21/00676-7 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 15/22 | 21/00676-7 |
| 6 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 13/22 | 21/00676-7 |
| 7 Tekniska nevnd | 11.09.2023 | 39/23 | 21/00676-7 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 233/23 | 21/00676-7 |
| 9 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 214/23 | 21/00676-7 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá teknistovuni MAG, um at víðka um bygningin hjá Kemilux, niðan í móti vegnum.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við omanfyri nevndu umsókn, hevur spurningurin stungið seg upp, um tað ikki er skilagott at dagføra verandi veg/vegir (tveir vegir lið um lið) soleiðis at bert ein vegur verður.

Í hesum sambandi hevur hevur kommunan umbiðið eitt uppskot og kostnaðarmeting frá sama ráðgevara um eina nýggja vegaloysn á nevnda staði.
Kostnaðarmetingin fyri verkætlanina er 4,1 mió. kr. u/mvg.

Kostnaðurin fyri at gera eitt prosjekt klárt til útboð er 300.000 kr. u/mvg., ella 320.000 v/mvg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Uppskot til vegaloysn j.nr. 21/00676-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Blað nr.: 897<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um at játta pening til projektering av omanfyri nevndu verkætlan, klárt til útbjóðing.

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 320.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 320.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato august-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| **Upphædd íalt** | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað verkætlan** | **Eykajáttan** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | | |
| Dkk | 8175 | nýggj | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At tikið verður av tilboðnum uppá projektering av verkætlanini
- At játtaðar verða kr. 320.000 av konto 8175, Vegagerðir, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan “Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux”
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við tí ískoyti, at heimilað verður umsitingini at bjóða arbeiðið at gera verkætlanina út í innbodnari lisitatión. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión varð hildin 20.12.21, og komu 5 tilboð inn, har tað lægsta boðið var 5,73 mió. kr. uttan mvg. Óvæntaðar útreiðslur eru mettar til 15%, svarandi til 900 tkr.
Samlaði fíggjartørvurin verður 6.63 mió. kr. uttan mvg. Íroknað kommunalt MVG verður talan um 7,1 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- Tikið verður undir við, at nevnda verkætlan kann byrja.

- At játta kr. 7,1 mió. kr. av stovnsnummar 8175, LK81999, Vegaverkætlanir (karmur), á stovnsnummar 8175, L81044, Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux,
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. januar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at peningurin fyri søluna av lendi verður mótroknaður í játtanini.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

Elsa Berg boðaði frá, at hon var ógegni at luttaka í viðgerðini av málinum. Býráðið tók fráboðanina til eftirtektar.

**Ískoyti**
Arbeiðið er liðugt og avhenda til Tórshavnar kommunu við einum samlaðum avlopi á kr. 891.433,-
Kommunan hevur/skal fremja nakrar átrokandi verkætlanir nú í summar/heyst. Millum hesar verkætlanir teljast m.a. gerð av parkeringplássi við Karlamagnusarbreyt, miðoyggjar til frama fyri ferðslutrygdina á Marknagilsvegnum og á Vegnum langa, broytan av omankoyringini til útstykkingina á Hamrinum á Argjum og at betra um útsýnið, tá koyrt verður av Hoyvíksvegi, t.e. flytan av kantsteinum á parkeringsplássinum við bridgehúsið, so parkeraðir bilar ikki taka útsýnið.
Aðrar smærri átrokandi vegaverkætlanir eru í bíðistøðu, tí fígging ikki er tøk.
Omanfyri nevndu verkætlanir verða allar fíggjaðar av konto 8115, sum er vegir o.a. planlegging.

Kostnaður av ítøkiligum átrokandi verkætlanum, ið eru í gongd / skulu byrja, er kr. 950.000,- v. kom. mvg.

Konto 8115 er ovbyrjað og kann væntast at hava stórt hall við ársenda, um øll arbeiðini skulu fremjast.
Vísandi til omanfyrinevnda verður mælt til, at avlopið av omanfyri nevndu verkætlan á kr. 891.433,- verður flutt á konto 8115.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81044 | Vegagerð á ídnaðarøkinum við Kemilux | 8115 | | vegir o.a. planlegging | | 891.433,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og leiðarin á teknisku deild mæla til, at avlopið á kr. 891.433, verður flutt av løgukonto L81044 Vegagerð á íðnaðarøkinum við Kemilux á rakstrarkonto 8115 fyri vegir o.a. planlegging, og at verkætlanin Vegagerð á íðnaðarøkinum við Kemilux verður lokað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

# 215/23 Møguligt keyp av grundstykkið burtur av matr.nr. 43a, Velbastaður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 160/20 | 20/01519-2 |
| 2 Tekniska nevnd | 08.09.2020 | 34/20 | 20/01519-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 154/20 | 20/01519-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 210/20 | 20/01519-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 185/20 | 20/01519-2 |
| 6 Býráðsfundur | 26.11.2020 | 271/20 | 20/01519-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 01.12.2020 | 67/20 | 20/01519-2 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.12.2020 | 245/20 | 20/01519-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 323/20 | 20/01519-2 |
| 10 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 295/20 | 20/01519-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 04.10.2021 | 65/21 | 20/01519-2 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 240/21 | 20/01519-2 |
| 13 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 247/21 | 20/01519-2 |
| 14 Tekniska nevnd | 11.09.2023 | 38/23 | 20/01519-2 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 232/23 | 20/01519-2 |
| 16 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 215/23 | 20/01519-2 |

**Upprunin til málið:** Eigarin av grundstykkinum bjóðar kommununi grundstykkið til keyps.

Umleið 535m2, verða frámatrikuleraðir matr.nr. 43a, Velbastaður. Stykkið liggur beint hinumegin skúlan á Velbastað.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Parkeringsviðurskiftini við Skúlan á Velbastað eru sera trupul.

Verandi eigari av ognini matr. nr. 43a, hevur vent sær til kommununa. Hann bjóðar kommununi eitt grundstykki á uml. 535m2, til keyps fyri uml. 500.000,00
( Uml. 935 kr.m2 )

Longdin á grundstykkinum framvið vegnum verður uml. 20,25 metrar.

Um kommunan ognar sær lendið, ber til at gera parkeringsøkið á grundstykkinum.

Stykkið hevur staðið á sølulista hjá ognarmeklara, men er fyribils tikið av sølulista aftur, meðan frábýtismálið verður avgreitt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at beina málið í teknisku nevnd og í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at kommunan ognar sær økið til parkeringspláss til skúlan.

**Tekniska nevnd 08. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.** Verkætlanin verður fíggjað av konto 8175, Vegir Íløgur, L00002, framfluttur karmur.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til, at keypa ognina, sum nú er frámatrikulerað og hevur fingið matr.nr. 43i, Velbastaður. Vídd 477m2, fyri í mesta lagi 500.000,00 svarandi til 1.050 kr.fermeturin.

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 24. september 2020:** Jákup Dam legði fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at keypa uml. 535 fermetrar av matr. nr. 43a og 43i, Velbastaður, sambært upprunaliga tilmælinum til teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina og sambært kortskjali, j.nr. 20/01519/3.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Jákupi Dam, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Grundstykkið er matrikulerað, og er breiddin til vegin einans uml. 20 metrar, vísandi til at ein geiri á 4 metrar er matrikuleraður til økið omanfyri.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við eigaran av ognini, og eigarin er sinnaður til at selja kommununi lendi á uml. 310 fermetrar burtur av matr. nr. 43i og 43h, fyri kr. 400.000,00 Hetta verður gjørt við marknaumskipan.

Breiddin til vegin verður tá uml. 26 metrar, og ber tá til at gera 10 parkeringsbásar á økinum, sí kortskjal j. nr. 20/01519-9.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við omanfyri nevndu loysn, sí kortskjal j. nr. 20/01519-9 Kort yvir parkeringsøkið við skúlan á Velbastað.

**Býráðsfundur 26. november 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Nýtt tilfar er komið inn í málinum, sum verður viðgjørt í umsitingini og møguliga verður klárt til fundin.

**Tekniska nevnd 01. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, samstundis sum umsitingini verður heimilað at yvirtaka geilina matr. nr. 22a, sum kommunan hevur gjørt til gøtu, har fyrsti partur er trappa, tí talan er um brattlendi. Gøtan er føst farleið millum skúla og dagstovn og við eini yvirtøku kann gøtan eisini gerast atgongd til matr. nr. 43a og síðani við eini marknaumskipan kann kommunan fáa tvey eyka parkeringspláss fram við vegnum og at beina málið í býráðið umvegis figgjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipananevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Til verkætlanina at keyp lendið og gera parkeringspláss í Velbastað, eru 400 tkr. játtaðar á L81041. Sambært kostnaðarmeting frá umsitingini er samlaða kostnaðurin mettur til 1.100.000 kr. Sostatt íresta kr. 700.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kr. 700.000 verða játtaðar av konto 8175, LK81043, Parkeringstunnil, á konto 8175, L81041, Parkering við skúlan á Velbastað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Í samráðingartilgongdini ynskti eigarin at minka um søluna til kommununa við uml. 128 fermetrum netto, soleiðis at tað lendi hann hevur eftir til samans verður uml. 1.018 fermetrar.

Málsviðgeri á teknisku umsiting hevur viðgjørt verkætlanina um ger av parkeringsøkinum, og vísir til, at kommunan bert tørv á lendinum framvið vegnum ( gula markeraða økið j.nr. 20/01519-35 ) sum til samans er til víddar 184 m2. ( Harav uml. 128 m2 eru burtur av matr.nr. 43i og uml. 56 fermetrar av húsamatrikklinum matr.nr. 43 h.) Tískil letur tað seg gera at selja avlopsfermetrarnar netto uml. 128 fermetrar aftur til eigara av matr.nr. 43i og 43h.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin av stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at fylgja samtyktini frá teknisku nevnd, og eisini at selja umsøkjara uml. 128 fermetrar netto, ( Sí kortskjal j. nr. 20/01519-35 ) Søluprísur kr. 50.000,-

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælini frá teknisku nevnd 4. oktober 2021 og fíggjarnevndini 20. oktober 2021, ið vórðu einmælt samtykt.

**Ískoyti**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Blað nr.: 903<br><br>Formansins merki: |

Arbeiðið er liðugt og avhendað til Tórshavnar kommunu við einum samlaðum avlopi á kr. 390.575,-
Kommunan hevur/skal fremja nakrar átrokandi verkætlanir nú í summar/heyst. Millum hesar verkætlanir teljast m.a. gerð av parkeringplássi við Karlamagnusarbreyt, miðoyggjar til frama fyri ferðslutrygdina á Marknagilsvegnum og á Vegnum langa, broytan av omankoyringini til útstykkingina á Hamrinum á Argjum, og at betra um útsýnið, tá koyrt verður av Hoyvíksvegi t.e. flytan av kantsteinum á parkeringsplássinum við bridgehúsið, so parkeraðir bilar ikki taka útsýnið.
Aðrar smærri átrokandi vegaverkætlanir eru í bíðistøðu, tí fígging ikki er tøk.
Omanfyri nevndu verkætlanir verða allar fíggjaðar av konto 8115, sum er vegir o.a. planlegging.

Kostnaður av ítøkiligum átrokandi verkætlanum, ið eru í gongd / skulu byrja, er kr. 950.000,- v. kom. mvg.

Konto 8115 er ovbyrjað, og kann væntast at hava stórt hall við ársenda, um øll arbeiðini skulu fremjast.
Vísandi til omanfyrinevnda verður mælt til, at avlopið av omanfyri nevndu verkætlan á kr. 390.575,- verður flutt á konto 8115.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | L81041 | Parkering við skúlan á Velbastað | 8115 | | Vegir o.a. planlegging | | 390.575,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á teknisku deild mæla til, at avlopið á kr. 390.575, verður flutt av løgukonto L81044 Vegagerð á íðnaðarøkinum við Kemilux á rakstrarkonto 8115 fyri vegir o.a. planlegging, og at verkætlanin parkering við skúlan á Velbastað verður lokað, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

## 216/23 Umsókn um at leingja leigusáttmálan matr. nr. 230a, Kollafjørður, P/F Faroe Real Estate Ltd.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 12.09.2023 | 29/23 | 23/05194-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 240/23 | 23/05194-3 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 216/23 | 23/05194-3 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Advokatskrivstovuni, dagfest 4. September 2023.

**Lýsing av málinum**
Advokatskrivstovan v/Óla Jákup Kristoffersen, adv. søkir í skrivi dagfest 4. September 2023 vegna P/F Faroe Real Estate Ltd. (skrás.nr. 3173) um at fáa flutt leigumál við Tórshavnar havn viðv. matr. 230s í Kollafirði, til felagið P/F P.P. Faroe Pelagic (Skrás.nr. 3263).

P/F Faroe Real Estate Ltd. hevur nú ætlanir um at selja 100% dóttirfelag sítt P/F P.P. Faroe Pelagic, ið hevur rikið virksemi í bygninginum á matr. nr. 230s., til P/F Pelagos (skrás.nr. 5951).

Ætlanin frameftir verður, at at tað er P/F P.P. Faroe Pelagic, sum kemur at eiga bygningarnar, sum soleiðis verða fluttir frá P/F Faroe Real Estate Ltd. til P/F P.P. Faroe Pelagic.

Advokatskrivstovan søkir harumframt um, at verandi sáttmáli verður longdur í eitt nýtt 25 ára skeið og annars eftir somu uppsagnarreglum og treytum annars, men at nýggi leigarin av grundøkinum, sum jú eisini verður eigari av bygningunum, verður P/F P.P. Faroe Pelagic.

Verandi leigusáttmáli er galdandi í 25 ár frá 1.apríl 2001 at rokna, og kann tá uppsigast við eitt ára freist til ein av vanligu gjaldsføgunum, t.v.s. í fyrsta lagi til 1.juli 2027.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Leigusáttmáli millum Tórshavnar havn og P/F Faroe Real Estate Ltd., dagfestur 11/9-2001.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at ganga umsóknini á møti, soleiðis at leigumálið við P/F Faroe Real Estate Ltd. (skrás.nr. 3173) verður flutt til P/F P.P. Faroe Pelagic (Skrás.nr. 3263), og at verandi leigusáttmáli verður longdur í eitt nýtt 25 ára skeið.

**Havnanevndin 12. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina..

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Blað nr.: 906<br>Formansins merki: |

## 217/23 Bátadráttur í Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.09.2016 | 32/16 | 16/03305-2 |
| 2 Nólsoyarnevndin | 15.11.2016 | 11/16 | 16/03305-2 |
| 3 Vinnunevndin | 09.03.2020 | 29/20 | 16/03305-2 |
| 4 Nólsoyarnevndin | 28.04.2020 | 4/20 | 16/03305-2 |
| 5 Havnanevndin | 09.03.2021 | 12/21 | 16/03305-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 38/21 | 16/03305-2 |
| 7 Nólsoyarnevndin | 18.03.2021 | 3/21 | 16/03305-2 |
| 8 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 76/21 | 16/03305-2 |
| 9 Havnanevndin | 12.09.2023 | 22/23 | 16/03305-2 |
| 10 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 234/23 | 16/03305-2 |
| 11 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 217/23 | 16/03305-2 |

**Málslýsing:**

Á fleiri borgarafundum í Nólsoy, hevur verið víst á, at verandi dráttur í Nólsoy ikki kann brúkast til størri bátar.

Um nýggjur bátadráttur skal gerast, er helst rættast at gera hann úti á Klyvum.
Ein leyslig meting er, at ein hóskandi bátadráttur kostar umleið 800.000, kr.

**Vinnunevndin 06. september 2016:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum í sambandi við fíggjarætlanina í 2017 og at senda málið til nólsoyarnevndina til kunningar.

**Nólsoyarnevndin 15. november 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býráðið hevur avsett kr. 800.000 til ger av bátadrátti úti á Klyvum í Nólsoy.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at beina málið í Nóloyarnevndina til hoyringar, og at bjóða arbeiðið út.

**Vinnunevndin 09. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 28. apríl 2020:** Staðbundna nevndin tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Arbeiðið hevur verið boðið út.

Tvey tilboð eru upp á arbeiðið:

| | |
|---|---|
| West Trading | 835.250 kr. |
| Articon | 786.629 kr. |

Í tilboðnum er ikki roknað við veiting fyri el og vatn.

Arbeiðið varð mett at kosta kr. 800.000. Í kostnaðarmetingini vóru kr. 173.000 avsettar til el, vatn og ókent.

Fyri at fulføra arbeiðið, er neyðugt at játta tilsamans kr. 960.000

Býráðið hevur avsett kr. 800.000 til bátadrátt í Nólsoy.

Í játtanini til bátahyl við Sjógv, tá nýggjar brúgvar vóru lagdar út, og bátadrátturin bleiv gjørdur av nýggjum, standa kr. 271.000 eftir.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at taka av tilboðnum frá Articon, og at játta kr. 960.000.
At arbeiðið verður fíggjað við kr. 800.000, sum er avsett til bátahyl í Nólsoy, og við kr.160.000 frá konto 7476 smábátahavnir, L74007 Bátahylur við Sjógv.

**Havnanevndin 09. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Nólsoyarnevndin 18. mars 2021:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin L74012 «Bátadráttur í Nólsoy» er liðug og staðfest er eitt avlop á kr 40.000,-.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at lokað verkætlan L74012, og at avlopið á kr. 40.000,- verður flutt á løgukarmin LK74999 «Smábátahavnir», og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 12. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Tróndur Sigurðsson var ikki við til hetta málið.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

# 218/23 Róðararfelagið Knørrur : Rokning fyri umprojektering av neysti í Álakeri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 05.07.2023 | 216/23 | 22/07206-15 |
| 2 Havnanevndin | 12.09.2023 | 27/23 | 22/07206-15 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 236/23 | 22/07206-15 |
| 4 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 218/23 | 22/07206-15 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við verkætlanina at byggja bátahavn í Álakeri, varð samstundis arbeitt við at finna eina loysn fyri staðseting av nýggjum róðrarneysti til róðrafelagið Knørrur (RK), sum í 2017 hevði søkt Tórshavnar kommunu (TK) um høli ella grundstykki.

Í byggiprogramminum hjá Tórshavnar havn (TH) frá mai 2019 varð víst á økið sunnanfyri verandi neyst hjá Havnar Róðrarfelag (HR) sum grundøki til nýtt neyst hjá (RK).

Í 2020 og 2021 vóru samráðingar millum TK/TH og RK um møguligar staðsetingar av róðrarneysti í Álakeri. Endin av hesum varð, at RK fekk ávíst eitt øki á 750 m$^2$ í útsynningshorninum oman móti sjóvarmálanum í nýggja bátahhylinum.

Broytingin í verkætlanini varð samtykt í Havnanevndini, Fíggjarnevnd og Býráðnum 30. September 2021.

Leigusáttmáli um millum TH og RK um hetta økið varð samtyktur í býráðnum og undirskrivaður 28. Oktober 2021.

RK søkti tann 8. Mars 2022 um byggiloyvi til neyst, ið ByggiConsult hevði projekterað til grundøkið á 750m$^2$. Um hetta mundið setti HR fram ynski um eisini at fáa grundøki til neyst niðri við sjóvarmálan í nýggju bátahavnini í Álakeri. Samráðingar vóru millum TK, HR og RK um at HR eisini skuldi hava møguleika at byggja bátahøll niðri við sjóvarmálan í Álakeri. Hettar kundi lata seg gera, um bæði róðrarfeløgini fingu hvør sítt grundøki á áleið 600 m$^2$.

Á fundi hin 29. Juni 2022, ið RK hevur skrivað fundarfrásøgn frá, hevur m.a. spurningurin um kostnaðin fyri umprojektering verið viðgjørdur. RK hevur skrivað í fundarfrágreiðingina, at tað bleiv lovað, at TK skal gjalda fyri projektering til Arkitekt, El og VVS til nýggja neystið á grundøki á 600 m2.
Fyrrverandi havnarmeistarin, ið eisini luttók á fundinum, sigur hinvegin, at tað á hesum fundi ikki varð avtalað ella játtað, at TK skuldi gjalda fyri umprojektering, men at RK skuldi søkja kommununa um endurgjald/stuðul til umprojektering.

Endin av samráðingunum var, at havnanevndin hin 29. August 2022 tók undir við ískoyti til sáttmálan við RK um at minka grundøki hjá RK úr 750m$^2$ niður í 600 m$^2$. Ískoyti til sáttmálan var undirskrivað av TH og RK 14. Oktober 2022.

Á fundi hin 20. Desember 2022 í Ráðhúsinum hevur TK skrivað soleiðis í fundarfrágreiðinga frá fundinum (brot):

***"Til viðgerðar:***
*Jógvan Elias vísti á, at stykkið er minka frá 750 til 600 m2*

*Avtalað er:*
*- at drotturin verður fluttur*
*- at kommunan stoypir veggir 4 m upp*
*- at TK skal gjalda fyri umprojektering, tí nú er alt broytt*
*- at byggiloyvi skal útskrivast beinanvegin og at loysi skal verða til alt húsið.*
*(...) Knørrur vísir á fundarfrásøgn frá fundi 30. juni, har avtalað er:*
*- at kommununa skal gjalda fyri umprojektering ísv at stykkið nú er blivið minni, tað er kr. 500.000*
*- at Knørrur skal hava kr. 1,6 mió í stuðli frá kommununi, til dekkið og almenna túni. Avtalað er, at hetta verður sent til mentamálanevndina til at viðgera/avgreiða."*

ByggiConsult hevur vegna RK umprojektera neystið, og hevur sent rokning til Tórshavnar kommunu áljóðani kr. 563.750,- við MVG.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at rinda rokningina av konto 20910 Aðrar útreiðslur.

**Fíggjarnevndin 05. juli 2023:** Samtykt at hava fund við Róðrarfelagið Knørrur við atliti til at avgreiða málið.

Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Fundur hevur verið hin 23. august 2023 við Róðrarfelagið Knørr, sí fundarfrágreiðing, j.nr. 22/07206-20. Semja varð gjørd um, at Tórshavnar kommuna endurrindar Knørrafelagnum kr. 983.750,- sambært uppgerð fyri umprojektering og at gera dekk, treytað av góðkenning í viðkomandi nevndum.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og stjórin í Tórshavnar havn mæla til at endurrinda Róðrarfelagnum Knørri kr. 983.750 vegna umprojektering av neystinum og at gera dekkið, og at hetta verður fíggjað av verkætlanini L74010 «Bátahylur í Álakeri».

**Havnanevndin 12. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

# 219/23 Barðið : Umsókn um at leiga grundøki til frystugoymslu á Vestaru Bryggju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 13.06.2023 | 20/23 | 23/03342-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 203/23 | 23/03342-3 |
| 3 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 175/23 | 23/03342-3 |
| 4 Havnanevndin | 12.09.2023 | 24/23 | 23/03342-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 237/23 | 23/03342-3 |
| 6 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 219/23 | 23/03342-3 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá P/F Barðið dagfest 7/6-2023 um at leiga grundøki á Vestaru Bryggju til frystigoymslu.

**Lýsing av málinum**
P/F Barðið søkir um at leiga eitt grundøki til at byggja eina 900 m² frystigoymslu á Vestaru Bryggju.
P/F Barðið vísir í umsóknini á, at felagið hevur ætlanir um at víðka virksemið við at kunna veita tænastur í sambandi við frystan fisk, umframt tað verandi virksemi og tænastur, ið felagið í dag hevur innan feskan fisk.
Í hesum sambandi hevur P/F Barðið tørv á frystigoymslu fyri at kunna bjóða verandi og nýggjum kundum eina nøktandi og kappingarføra tænastu innan frystan fisk.

Virksemið við frystihøll, ið P/F Barðið ætlar sær undir, hevur fleiri ágóðar við sær fyri Tórshavnar havn og -kommunu. Tað verða væl fleiri landingar og umsetning yvir kajkantin, ið viðføra fleiri beinleiðis inntøkur frá havna- og vørugjøldum, umframt leiguinntøku frá grundøkinum.
Virksemið væntast eisini at kunna skapa fleiri nýggj ársverk, umframt ymiskt annað avleitt virksemi í kommununi.

Økið, sum søkt verður um til frystioymsluna, er uml. 30x30 m, umframt ein yvirbygning til rampur. Økið til frystigoymsluna gongur uml 10 inn í verandi bygning á matr. 970c (Bacalao), og 20 m út frá hesum sama bygningi.
Sostatt verður neyðugt at taka ein part á uml 10X30 m av Bacalao bygninginum á matr 970c niður.
P/F Barðið ynskir, at grundøkið til frystigoymsluna stendur byggiklárt og at Tórshavnar havn ger neyðugu broytingarnar á verandi bygning á matr. 970c.

P/F Barðið søkir um 25 ára leigumál.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í øðrum leigusáttmálum, har sum ein nýggjur leigari skal leiga eitt øki, sum annar leigari hevur leigað og har ið bygningar hava staðið, er ásett, at Tórshavnar havn tekur bygningar niður, men at leigarin annars yvirtekur økið soleiðis sum tað liggur.

Kostnaðurin av at taka nevnda part av bygninginum niður og gera økið byggiklárt er ikki endaliga kendur í løtuni.

Í hesum partinum av Bacalao, sum verður neyðugur at taka niður, hevur Sp/f Ís eitt leigumál, har ið ísframleiðsla er. Eisini nýtir RC felagið eitt høli í hesum partinum av Bacalao

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
23/03342-1 : P/F Barðið: Umsókn um at leiga grundøki til frystigoymslu á Vestaru Bryggju
23/03342-2 : Uppskot til leigusáttmála við P/F Barðið viðv. frystigoymslu á Vestaru Bryggju
23/03342-4 : Yvirlitsplanur frostgoymsla

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Virkandi havnarmeistari mælir til:

- at ganga umsóknini á møti og gera leigusáttmála við vanligum treytum sambært uppskot til 25 ára leigusáttmála, j.nr. 23/03342-2, ið tó er treytaður av, at niðurtøka av bygninginum verður samtykt og fígging játtað til hetta.
- at projektera og gera kostnaðarætlan av niðurtøku av parti av bygninginum at leggja fyri aftur havnanevndina.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 13. juni 2023:** Ein meiriluti, Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, samtykti at taka undir við tilmælinum, men treytað av at tilboð um niðurtøku fyriliggur, og fígging verður játtað.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til, at arbeitt verður við eini loysn, sum loyvir útbygging av virkseminum hjá p/f Barðið, umframt at rúma virkseminum hjá verandi leigarum. Minnilutin mælir harafturat til, at farið verður undir arbeiðið at gera heildarætlan fyri Bacalao, sum fyrr er samtykt.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í havnanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum og vísir á sína minnilutastøðu í havnanevndini.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg og Annika Olsen. Elsa Berg og Annika Olsen kravdu at fáa serstøðu sína í gerðabókin, og viðmerktu í hesum sambandi, at tær mæla til, at arbeitt verður við eini loysn, sum loyvir útbygging av virkseminum hjá p/f Barðið, umframt at rúma virkseminum hjá verandi leigarum. Minnilutin mælir harafturat til, at farið verður undir arbeiðið at gera heildarætlan fyri Bacalao, sum fyrr er samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at niðurtaka part av Bacalao hevur verið boðið út undirhonds til tveir arbeiðstakarar. Sp/f MTV hevði lægsta tilboðið áljóðandi kr. 1.304.137,- u/mvg. Ráðgevi hevur eftirkanna tilboðið og mælt til at taka av hesum tilboði.
Harumframt verður neyðugt við ymsum el- og stál/rørarbeiði, sum er mett at kosta ávíkavist kr. 280.000 u/mvg og kr. 55.000 u/mvg.
Samlaði fíggjartørvurin, íroknað handverkaraútreiðslur, ráðgeving, projektering og eftirlit, upprudding, all-risk trygging og ókendar útreiðslur (uml 30 %), verður sostatt mettur til 2,5 mió.

Á íløguætlanini hjá Tórshavnar havn eru avsettar kr. 8.146.000,- á P39 «Niðurtøka av pakkhúsum», ið serliga eru ætlaðar til niðurtøku av pakkhúsi/um á eystaru Bryggju í samband við bygging av nýggjum ferðafólkaterminali.

**Tilmæli**
Havnarmeistarin mælir til:
- at taka av tilboðnum frá Sp/f MTV uppá niðurtøku av parti av Bacalao áljóðandi kr. 1.304.137 kr, treytað av, at øll neyðug loyvir v.m. í verkætlanini koma uppá pláss
- at játtaðar verða kr 2.500.000 av íløgum hjá Tórshavnar havn, P39 «Niðurtøka av pakkhúsum» til verkætlanina.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 12. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>28. september 2023 | Blað nr.: 914 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 220/23 Víðkan av sølutorginum í Vágsbotni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 09.03.2021 | 13/21 | 21/00927-1 |
| 2 Havnanevndin | 27.04.2021 | 20/21 | 21/00927-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.04.2021 | 98/21 | 21/00927-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 109/21 | 21/00927-1 |
| 5 Havnanevndin | 16.09.2021 | 32/21 | 21/00927-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.10.2021 | 190/21 | 21/00927-1 |
| 7 Havnanevndin | 19.10.2021 | 38/21 | 21/00927-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 271/21 | 21/00927-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 278/21 | 21/00927-1 |
| 10 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 306/21 | 21/00927-1 |
| 11 Havnanevndin | 12.09.2023 | 23/23 | 21/00927-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 235/23 | 21/00927-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 220/23 | 21/00927-1 |

**Upprunin til málið**
Havnarnevndarformaðurin hevur reist málið.

**Lýsing av málinum**
Ynski er um, at bryggjukanturin framman fyri sølutorginum í Vágsbotni verður breiðkaður 2,5 metur við einari longd upp á umleið 35 metur. Hetta skal bøta um atkomuna til sølutorgið.
Eisini er ynski um, at breiðka gongubreytina frá Vágsbotni og 35 metur vestureftir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið fram við sølutorginum í Vágsbotni hoyrir undir byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Vágsbotnur er seinnu árini meira og meira blivin ein partur av miðbýnum, við matstovum, sølutorgi og øðrum líknandi virksemi.
Í 2020 varð skipað fyri einari arkitekta kapping fyri økið í Vágsbotni.

Ásannandi, at bátabrúgvar, bátahavnir, økið á Kongabrúnni og í Vágsbotni, er eitt trivnaðar øki, hevur býráðið í 2005 samtykt, at íløgur á hesum økinum, verða fíggjaðar av Tórshavnar kommunu. J.nr 21/00927-2.

Fyri at koma til eina góða loysn við Vágsbotni og økinum har, eigur eitt uppskot um broyting av økinum at viðgerast í býarskipanarnevndini.

Um bryggjukanturin og gongubreytin skulu flytast longur út, er neyðugt at gera botnkanningar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Arkitekta kapping í 2020 hevur verið um skipan av økinum á Skálatrøð og Vágsbotni

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at beina málið um víðkan av sølutorginum í Vágsbotni í byggi- og býarskipanarnevndina.
Eisini verður mælt til at gera botnkanningar, at fíggja av konto 7476 smábátahavnir L74007 Bátahylur við Sjógv

**Havnanevndin 09. mars 2021:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum og bjóða bryggjukantin út sum heildarloysn millum tríggjar arbeiðstakarar.

**Ískoyti:**
Arbeiðið varð bjóðað út millum J&K Petersen, Articon og West-Trading.

Biðið var um tilboð upp á eina loysn við stuðlamúri og eina loysn við L-elementum.

Lisitatión varð hildin 19.04.2021.
.
Inn komu tilboð frá J&K Petersen og Articon.
Tilboðini upp á stuðlamúr vóru: frá J&K Petersen 2.151.608,- kr. og frá Articon 2.167.322,- kr.

Harumframt hevði Articon tilboð upp á L-element loysn fyri 1.876.000,- kr.

Fyrimunurin við eini elementloysn er, at minni arbeiði er á staðnum.
Viðv. uppgrevstri og planering verður bert arbeitt frá sjósíðuni. Leysa tilfarið á botni kann gravast upp frá krókinum, og ein vegbreyt verður leypandi planerað omanfyri sjóvarmálan fram við bryggjukantinum.
Tá botnurin er planeraður, verða elementini sett niður. Tá er neyðugt, at krani stendur á økinum við sølubásarnar umleið ein dag.
Fylt verður aftanfyri elementini og liðugtgerð av hamara, leiðingum og lendinum kann gerast.

Mælt verður til at taka av tilboðnum frá Articon upp á L-element loysn, og at játta 2.076.000,- kr. til arbeiðið.

Um arbeiðið verður sett í verk 1. mai 2021 verður rokna við, at tað kann verða liðugt í fyrru helvt av juli.

Um arbeiðið verður sett í verk 1. september 2021, verður roknað við, at tað verður liðugt mánaðarskiftið oktober/november.

Vágsbotnur verður nógv vitjaður nú várið og summarið kemur. Hóast arbeiðið í stóran mun verður gjørt frá sjósíðuni, verður mælt til ikki at byrja arbeiðið fyrr enn 1. september 2021. Hetta eigur eisini at geva eitt betri úrslit, tá arbeiðið kann fyrireikast í góðari tíð.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til:
- at taka av tilboðnum frá Articon, at gera bryggjuna av L-elementum fyri kr.1.876.000.
- at arbeiðið byrjar 1. september 2021
- at nevndin tekur støðu til hvussu íløgan skal fíggjast.

**Havnanevndin 27. apríl 2021:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein samtykti at taka av tilboðnum frá Articon, at gera bryggjuna av L-elementum fyri kr.1.876.000. Og at fíggja arbeiðið av játtan til bátahyl í Álakeri konto 7460,L 00001íløgukarmar fyri árið. Arbeiðið byrjar beinanvegin.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum tí hon vil hava at arbeiðið skal gerast í samsvar við ætlanina skipan av Vágsbotn.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í Havnanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, atkvøður ímóti.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um uppskot frá Gunvør Balle um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið fall við fýra atkvøðum fyri, níggju ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, trimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle, ið viðmerkja i gerðabókina, at tey atkvøða ímóti, tí tey vilja hava, at arbeiðið skal gerast í samsvari við ætlanina skipan av Vágsbotni.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um uppskot frá Gunvør Balle um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið fall við fýra atkvøðum fyri, níggju ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, trimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle, ið viðmerkja i gerðabókina, at tey atkvøða ímóti, tí tey vilja hava, at arbeiðið skal gerast í samsvari við ætlanina skipan av Vágsbotni.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at breiðka bryggjukantin 35 m frá Vágsbotni og suðureftir, er liðugt.

Alt strekkið, frá krókinum og út á endan á tí gamla bryggjukantinum, er tilsamans 94 m, sum merkir, at um allur bryggjukanturin skal breiðkast, mangla tað 59 m í.

Dýpið á tí innara strekkinum er 2½ m. Á tí uttara strekkinum er tørvur á at leggja størri bátar, tí eigur dýpið ikki at fara undir 3 m, sum er dýpið á verandi bryggju.
Best hevði verið, um dýpið kundi komið niður á 3,5 m.

Miðskeiðis í økinum liggur ein flótandi eind, sum verður brúkt til vitjandi bátar og uppihaldsøki annars. Um bryggjan skal breiðkast, verður neyðugt at stytta tað flótandi eindina.

At breiðka teir eftirverandi 59 m, líkist nógv tí fyrra arbeiðinum, tí eigur tað at bera til at samráðast við tann sama arbeiðstakaran.
Partur av fyrireikingini eigur at vera, at gera neyvar botnkanningar saman við arbeiðstakaranum, so tær óvantaðu útreiðslurnar verða avmarkaðar.

Økið er partur av Vágsbotni, og eigur eisini at verða viðgjørt av býarskipanarnevndini.

**Havnarmeistarin mælir til:**
At samráðast við sama arbeiðstakara, fyri at koma við einari ætlan og einum samlaðum kostnaði, við grundarlagi í botnkanningum, sum eru gjørdar av arbeiðstakara og -ánara í felag.

At fíggjarnevndin vísir á fígging

At beina málið í býarskipanarnevndina.

**Havnanevndin 16. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina. Og taka sølutorgið við sum ein part av málinum.

**Ískoyti:**
Býarskipanarliga verður mett best, um bryggjukanturin verður longdur heilt út til verandi træbrúgvar longur suðuri, soleiðis at teinurin kann upplivast sum ein heild. Talan er helst um eitt 60 metra langt strekki, sum bryggjukanturin skal leingjast.

Víst verður á omanfyri standandi tilmælir, har mælt verður til, at fara í samráðingar við fyrrverandi arbeiðstakaran á økinum og saman við honum at gera neyðugu botnkanningarnar, soleiðis at óvæntaðu útreiðslurnar verða avmarkaðar.

Viðv. Sølutorginum, so er helst neyðugt at fara undir at viðlíkahalda søluplintarnar við nøktandi ljósi o.s.fr., umframt at teir eru nakað illa farnir, grundað á lítið og einki viðlíkahald. Mett verður hóskandi, at fáa søluplintarnar settar í stand, soleiðis at økið kemur at virka á fullgóðan hátt fram til at Vágsbotn-torgið í síni heild verður raðfest.

Fyri at fara undir hetta arbeiðið, so eigur sølutorgið at verða eftirhugt, soleiðis at ábøturnar, sum skulu gerast, verða nágreinaðar. Mett verður, at talan er ikki um eina stóra íløgu, men fyrr enn neyðugu tiltøkini eru skrásett, er trupult at meta um fíggjartørvin.

Um farið verður undir at gera bryggjukantin, og ein arbeiðstakari kemur á økið at arbeiða, so verður mett hóskandi, at sami arbeiðstakari ger neyðuga viðlíkahaldið av sølutorginum, hetta fyri at loysa uppgávuna so skynsamt sum gjørligt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- At Havnaskrivstovan fer undir samráðingar við arbeiðstakaran, fyri at koma við eini ætlan og einum samlaðum kostnaði, við grundarlagi í botnkanningum, umframt staðfesting av ábótum á søluplintunum, sum eru gjørdar av arbeiðstakara og -ánara í felag.
  At fíggjarnevndin vísir á fígging, og at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í havnanevndina.

**Ískoyti**
Samskift hevur verið við entreprenørin, P/F Articon, sum gjørdi tann fyrra partin av bryggjukantinum frá Vágsbotni og suðureftir, sum vóru lidnir áðrenn ólavsøku.
Arbeiðið umfatar:

- Dýpdarmáting, botnkanning og projektering av betongelementum til leinging av bryggjuni við 60 m.
- Bryggjan verður dimentionerað fyri flatulast upp á 5 kN/m2 og punktlast 45 kN.
- Treytað av, at uppmáting og botnkanningin vísa, at tað er møguligt, so er roknað við dýpi upp á 3,0 m á fyrstu 30 m av leingingini og dýpi upp á 3,5 m á eystasta partinum á leingingini.
- Samanbygging verður gjørd í eystara horni við bryggjuna sum varð gjørd í 2011.
- 7 stk pullartar 10 tons verða settir í bryggjuhamaran og 5 stk gøtuljóssteyar.
- Arbeiðishátturin verður sum við arbeiðinum, sum var gjørt í summar.

Um sáttmáli kann gerast innan 1. nov. 2021 verður arbeiðið liðugt í seinasta lagi 1. apríl 2021, kostnaður kr. 5.175.363,-

Søluplintar:
Ábøtur skulu gerast á søluplintarnar. Hetta arbeiðið er mett til kr.1.000.000

Kafe brúgvin:
Neyðugt verður at stytta brúna, hetta arbeiðið er mett til kr. 100.000

Projekt, eftirlit og óvantað:
Tað eru altíð óvissur bundnar við at arbeiða undir vatnskorpuni, har tað er trupult at skráseta botnviðurskiftini neyvt, saman við eftirlitinum er hetta mett til 12% ella kr. 753.000.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at gera avtalu við Articon um at gera arbeiðið, og at játta tilsamans kr. 7.028.363,-
At fíggjarnevndin finnur fígging, og at málið verður beint í býráðið.

**Havnanevndin 19. oktober 2021:**

Ein meiriluti: Kári Johansen og Annfinn Brekkstein samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við havnanevndini og játtar kr. 7.028.363 av meirinntøkum og beinir málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við tilmælinum, tí aðrar raðfestingar innan tekniska økið eiga at raðfestast fremri, t.d. kloakkir í økinum og orkuskiftið. Tá arbeitt verður við menning av Vágsbotni og nærumhvørvinum eigur arbeiðið at verða gjørt samsvarandi vinnandi arkitektauppskotinum fyri økið.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, trimum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Jón Kragesteen.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg, ið ynskti at fáa viðmerkt í gerðabókina, at hon ikki tekur undir við málinum, tí aðrar raðfestingar innan tekniska økið eiga at raðfestast fremri, t.d. kloakkir í økinum og orkuskiftið. Tá arbeitt verður við menning av Vágsbotni og nærumhvørvinum eigur arbeiðið at verða gjørt samsvarandi vinnandi arkitektauppskotinum fyri økið.

**Ískoyti:**
Verkætlanin L74014 «Víðkan av sølutorginum í Vágsbotni» er liðug og staðfest er eitt avlop á kr 1.429.000,-.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at lokað verkætlan L74014, og at kr. 984.000,- verða fluttar á verkætlan L74010 «Bátahylur í Álakeri» og kr. 445.000,- verða fluttar aftur á løgukarmin LK74999 «Smábátahavnir», og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 12. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Tróndur Sigurðsson var ikki við til hetta málið.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

# 221/23 Umsókn frá NAX um leigu av øki á Sundi til bygging av høll til útgerð til ferðavinnu á sjónum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 05.05.2017 | 28/17 | 17/01437-1 |
| 2 Vinnunevndin | 06.11.2017 | 60/17 | 17/01437-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 258/17 | 17/01437-1 |
| 4 Kaldbaksnevndin | 04.12.2017 | 11/17 | 17/01437-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 261/17 | 17/01437-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.05.2018 | 112/18 | 17/01437-1 |
| 7 Vinnunevndin | 12.09.2018 | 32/18 | 17/01437-1 |
| 8 Vinnunevndin | 05.11.2018 | 44/18 | 17/01437-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.12.2018 | 279/18 | 17/01437-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.01.2020 | 11/20 | 17/01437-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 22.01.2020 | 2/20 | 17/01437-1 |
| 12 Býráðsfundur | 30.01.2020 | 4/20 | 17/01437-1 |
| 13 Havnanevndin | 12.09.2023 | 25/23 | 17/01437-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 28.09.2023 | 258/23 | 17/01437-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 221/23 | 17/01437-1 |

**Málslýsing:**
Í umsókn frá NAX, frá 24. apríl 2017, verður sókt um leigu av øki á Sundi til bygging av høll til goymslu av útgerð til tiltøk, sum felagið serliga hevur á sjónum.

Sókt verður um øki til ein 16 – ferðir 30 metur stóran bygning, sum skal standa í vestara enda á økinum framman fyri bóndahúsini á Sundi.

Økið talan er um, verður oftani brúkt til upp- og avskiping av bulkvørum, sum liggja á økinum í eitt styttri tíðarskeið, tí eigur tað ikki at verða bygt meira á hesum økinum enn hægst neyðugt.

Umsóknin vísir eitt hús við einum tilbygningi eystur- og norðeftir, og fleiri portur eystursíðuni. Hetta ger, at óneyðuga nógv av økinum, sum annars verður brúkt til bulkvørur, ikki kann brúkast.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at loyva bygging til nevnda virksemi, men at samráðast við umsøkjaran um endaliga stødd, skap og staðseting.

**Vinnunevndin 05. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Støddin av bygninginum verður 16 ferðir 30 metur.
Fyri at økið eystan fyri bygningin kann verða brúkt til bulkvørur, er onki portur ella hurð á eystur síðuni.
Staðsetingin er sambært tekning j.nr. 17/01437-5 soleiðis at bygingurin er so vestaliga sum til ber.
Uppskot er gjørt til ein 25 ára leigusáttmála, har sagt verður at grundøkið skal brúkast til bygging av høll til goymslu av útgerð til tiltøk, sum leigarin hevur á sjónum.

Áðrenn umsøkjarin kann byggja, skal hann fáa byggiloyvi frá Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við leigusáttmálanum, at staðsetingin verður sambært tekning j.nr 17/01437-5, og at onki portur ella hurð er á eystur síðuni.

**Vinnunevndin 06. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið til kunningar.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Anniku Olsen, um at beina málið í Byggi- og býarskipanarnevndina og Kaldbaksnevndina.

**Kaldbaksnevndin 04. desember 2017:** Nevndin heldur at verkætlanin er áhugaverd. Nevndin skjýtur upp at bóndin verður hoyrdur og tað sum hevur týdning fyri málið er hæddin á bygningum.

**Ískoyti:**
Økið liggur í umráðispartinum B1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Umráðisparturin verður sum heild lagdur til endamál, ið hava beinleiðis við havnarakstur at gera, fyrst og fremst skrivstovur og goymslur í sambandi við skipaferðslu og vøruflutning og tílíkt virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t.

Virkini í umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4-6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Mest loyvda byggistig er 0,5

Mest loyvda hædd er 12 m (undantøk til kranar og einstakar bygningslutir t.d. trapputorn o.s.v.) og hæddin skal verða sett í hvørjum einstøkum føri út frá eini heildarmeting av nýtslu og skapi.

Bygging má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 12 m.

Í økinum er í dag ein elorkustøð hjá SEV, asfaltvirki og ymiskt av- og áskipanarvirksemi. Nevnast skal tó, at elorkustøðin tó liggur uttan fyri umráðispartin B1.

Umráðisparturin er ikki lagdur til ferðavinnudeplar og tað, sum har til hoyrir.

Vandin við at geva langtíðarloyvi til virksemi, sum ikki hoyrir til umráðispartin er, at tað í framtíðini kann steðga menningini av tí virksemi, som umráðsparturin upprunaliga er ætlaður til.

Niðurstøðan er tískil, at umsitingin metir ikki, at ætlaða virksemið hoyrir heima í umráðispartinum B1. Harafturat verður mælt til at finna aðra staðseting til virksemið í samráð við Tórshavnar Havn. Eyðsætt kundi verið at savnað maritimt frítíðarvirksemi á einum stað, sum t.d. úti í Álakeri ella á Argjum.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at finna aðra staðseting til virksemið, grundað á, at umráðisparturin B1 ikki er ætlaður til frítíðarvirksemi, og at beina málið aftur í vinnunevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 12. september 2018:** Samtykt at senda málið til hoyringar hjá bóndanum.
Helena Dam á Neystabø var ikki við til hetta málið.

**Ískoyti:**
Ongin viðmerking komin frá bóndanum.

**Vinnunevndin 05. november 2018:** Mælt verður til at geva loyvi at byggja og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Býarskipanarliga hóskar virksemið hjá NAX, sum tað verður lýst í umsóknini, ikki til økisásetingarnar í byggisamtyktini. Sum eisini lýst í omanfyri standandi ískoyti, sum varð samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini 09.05.2018, so er umráðisparturin sum heild lagdur til endamál, ið hava beinleiðis við havnarakstur at gera, fyrst og fremst skrivstovur og goymslur í sambandi við skipaferðslu og vøruflutning og tílíkt virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t. Virkini í umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4-6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Umsitingin er vitandi um, at NAX í longri tíð hevur leitað sær eftir einum øki til sítt virksemið, og ynskiligt hevði verið, um ein meiri høglig staðseting varð funnin, so sum í Álakeri ella á Argjum.

Við at kommunan í dag ikki hevur aðra staðseting at vísa á, so metir umsitingin, at um byggingin og ætlaða ferðavinnu-virksemið verður skipað soleiðis, at ætlaða virksemið fyri umráðið ikki verður tarnað, og soleiðis at ferðafólk, sum eru partur av virkseminum hjá NAX ikki verða í vanda, við at virksemið verður staðsett á umrødda øki, so kann staðsetingin loyvast, sum ein fyribils loysn inntil nøktandi økið verður lagt av til ferðavinnu og líknandi virksemið í kommununi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa á tilmælið til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini tann 9. mai 2018.

Um nevndin er sinnað at geva loyvi, verður mælt til:

- at hetta verður ein fyribils loysn í eitt áramál, inntil nøktandi øki verður lagt av til tílíkt virksemi.
- at virksemið verður skipað soleiðis, at ferðafólk ikki verða í vanda og soleiðis at verandi virksemið í økinum ikki verður tarnað
  at ein heildarætlan fyri verkætlanin, sum lýsir omanfyri nevndu fyrivarnir, verður løgd aftur fyri nevndina til góðkenningar, áðrenn endaligt loyvi verður givið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2018**: Samtykt at geva loyvi, treytað av:

- at hetta verður ein fyribils loysn í eitt áramál, inntil nøktandi øki verður lagt av til tílíkt virksemi.
- at virksemið verður skipað soleiðis, at ferðafólk ikki verða í vanda og soleiðis at verandi virksemið í økinum ikki verður tarnað.
- at umsøkjarin sendir inn eina ætlan, sum lýsir omanfyri nevndu fyrivarnir, áðrenn loyvi verður givið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur havt fund við Nax. Ætlanin hjá Nax er at byggja ein bygning uppá uml. 500 $m^2$, sum kann rúma útgerð og virkseminum hjá teimum annars. Fyri at fáa fígging og raksturin at hanga saman, er neyðugt við eini loysn, sum í minsta lagi er 20-25 ár fram í tíðina og tí ynskja teir at loyvi ikki verður tíðaravmarkað.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 12. desember 2018.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. januar 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at gera eina leiguavtalu uppá 15 ár við møguleika at leingja, treytað av at kommunan í 15 ára leigutíðini kann uppsiga sáttmálan við 2 ára freist við at keypa bygningin fyri avtalaða upphædd og at beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við avgerðini hjá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini 15. januar 2020, og vísa á tilmælið til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 12. des. 2019.

**Býráðsfundur 30. januar 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 6 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Jan Christiansen, Jákup Dam, Turid Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samulsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Eyðun Berg søkir í skrivi dagfest 13. juli 2023 vegna Sp/F Sund 2 (Sp/F Nax) um at fáa longt og broytt leigusáttmálan um øki á Sundi til vinnuferðavinnu.

Søkt verður um at fáa longt sáttmálan frá núverandi 15 árum til 25 ár frá 2020 at rokna.
Orsøkin til umsóknina er fyri at kunna fáa bankafígging við rímiligum treytum til at gera bygningin lidnan og menna Nax víðari innan vinnuferðavinnu. Felagið hevur brúk fyri fígging sum kann røkka longur enn verandi sáttmáli.

Haumframt søkir felagið um at fáa broytt § 4, fyrsta petti, í sáttmálanum soleiðis:
Frá núverandi orðing: "Økið verður at nýta sum grundøki til bygging av høll til goymslu av útgerð til tiltøk, sum leigarin hevur á sjónum".
Til nýggja orðing: "Økið verður at nyta sum grundøki til bygging av høll til virksemi hjá leigaranum, sum leigarin hevur á sjónum og landi".

Viðmerking frá havnarmeistaranum:
Tá ið hetta málið upprunaliga varð viðgjørt í 2017, mælti havnarmeistarin vinnunevndini til at gera ein 25 ára leigusáttmála, sum vanligt er fyri leigumál, har ið leigarin skal byggja ein bygning. Býráðið samtykti tó sambært tilmæli frá byggi- og býarskipanarnevndini tó at leigusáttmálin skuldi vera galdandi í 15 ár.

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at umsóknin um at leingja leigusáttmálan við 10 árum til 25 ár frá 2020 at rokna, verður gingin á møti, men at umsóknin um at broyta § 4, 1. petti, ikki verður gingin á møti, og at málið verður beint í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 12. september 2023:** Samtykt at taka undir við verandi sáttmálan við 10 árum frá 2020 at rokna og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Blað nr.: 925 |
| | Formansins merki: |

## 222/23 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 64/23 | 23/00151-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 55/23 | 23/00151-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 91/23 | 23/00151-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.03.2023 | 97/23 | 23/00151-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 85/23 | 23/00151-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.04.2023 | 129/23 | 23/00151-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 116/23 | 23/00151-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 154/23 | 23/00151-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.05.2023 | 132/23 | 23/00151-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 186/23 | 23/00151-1 |
| 11 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 178/23 | 23/00151-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 255/23 | 23/00151-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 222/23 | 23/00151-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Framlagt og góðkent.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Tikið av skrá.
**Fíggjarnevndin 22. mars 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 23. mars 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 19. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Framlagt og góðkent.
**Býráðsfundur 25. mai 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Framlagt og góðkent.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. september 2023 | Blað nr.: 927<br><br>Formansins merki: |

# 223/23 Fíggjarætlan 2024, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2023 | 259/23 | 23/05027-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 223/23 | 23/05027-2 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 26. oktober og aðru viðgerð 23. november.

**Lýsing av málinum**
**Fortreytir fyri fíggjarætlan 2024**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2024 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 9.000 kr.
Fortreytirnar í uppskotinum eru, at rakstrarútreiðslur kunnu bert hækka, um talan er um:

- lógarkrøv
- býráðssamtyktir íroknað virksemisbroytingar sum fylgja av nýggjum íløgum
- sáttmálabroytingar og líknandi.

Mælt verður til eitt rakstrarútreiðsluhámark, so at rakstrarútreiðslurnar ikki økjast meira enn inntøkurnar. Hettar merkir nøkur átøk fyri at betra um úrslitið.

Í talvuni niðan fyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| | | Roknskapur | Ætlan | Ætlan | Broyting 2023/2024 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1.000 kr. | | 2022 | 2023 | 2024 | pct. | kr. |
| | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 949.946 | 951.000 | 1.003.305 | 5,5% | *52.305* |
| 20601 | Felagsskattur | 68.221 | 60.000 | 60.000 | 0,0% | *0* |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 740 | 1.000 | 1.000 | 0,0% | *0* |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 182.831 | 191.862 | 209.773 | 9,3% | *17.911* |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 35.659 | 36.421 | 35.954 | -1,3% | *-467* |
| | **Inntøkur íalt** | **1.237.398** | **1.240.283** | **1.310.032** | **5,6%** | ***69.749*** |
| | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 99.884 | 100.179 | 105.461 | 5,3% | *5.282* |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 298.882 | 313.190 | 325.337 | 3,9% | *12.147* |
| §3 | Børn og ung | 224.266 | 225.921 | 238.923 | 5,8% | *13.001* |
| §4 | Undirvísing | 47.450 | 51.617 | 56.414 | 9,3% | *4.797* |
| §5 | Mentan og frítíð | 65.195 | 64.636 | 71.124 | 10,0% | *6.488* |
| §6 | Teknisk mál | 157.998 | 152.110 | 159.134 | 4,6% | *7.024* |
| §7 | Kommunal virkir TK | 88.240 | 85.699 | 92.172 | 7,6% | *6.473* |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **981.916** | **993.353** | **1.048.564** | **5,6%** | ***55.212*** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -41.702 | -40.070 | -35.939 | -10,3% | *4.131* |
| | **Rakstur íalt** | **940.214** | **953.283** | **1.012.625** | **6,23%** | ***59.343*** |
| | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 19.926 | 18.000 | 30.000 | 66,7% | *12.000* |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 2.107 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | *0* |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **22.033** | **20.000** | **32.000** | **60,0%** | ***12.000*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **275.151** | **267.001** | **265.407** | **-0,6%** | ***-1.594*** |
| | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 5.183 | 651 | 10.378 | 1494,2% | *9.727* |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 4.482 | 5.043 | 12,5% | *561* |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | -3.682 | 0 | 0 | 0,0% | *0* |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | -500 | 0 | 0,0% | |
| | **Rentur íalt** | **8.865** | **5.633** | **15.421** | **173,8%** | ***9.788*** |
| | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **266.286** | **261.368** | **249.986** | **-4,4%** | **-11.382** |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **21.574** | 1648,3% | *20.340* |
| | **Avdráttir TH** | | **15.873** | **15.873** | 0,0% | *0* |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **265.052** | **244.261** | **212.539** | **-13,0%** | **-31.722** |
| | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **223.350** | **225.046** | **197.516** | **-12,2%** | **-27.530** |
| | | | | | | |

**Búskaparútlit**
Vøkstur er framvegis í føroyska búskapinum. Búskaparráðið hevur nýliga lagt heystfrágreiðingina fram, har ráðið hevur endurskoðað vøksturin í bruttotjóðarúrtøkuni fyri árini 2022 – 2024. Vøksturin í BTÚ í leypandi prísum verður mettur til at verða ávikavist 8,1% í 2022, 5,9% í 2023 og 1,4% í 2024. Í ársins prísum vaks BTÚ sambært metingum uml. 10% í 2022, og roknar Fíggjarmálaráðið við, at hækkingin er eini 4-5% í 2023 og 2024. Nevnast kann, at arbeiðsloysið hevur verið søguliga lágt, og í juli mánaði í ár var arbeiðsloysið einans 0,7%.

Brúkaraprístalið var rættiliga støðugt í tíðarskeiðnum frá 2009 til 2021, men seinna hálvár 2021 vóru stórar hækkingar í prístalinum, og helt stóri prísvøksturin fram í 2022. Prísirnir vaksa framvegis, men spakuligari, enn teir hava tað seinasta árið. Seinasta meting frá Hagstovuni í 2023, vísur ein vøkstur í

brúkaraprístalinum á 4,4%. Meðan oljuprísirnir høvdu størstu ávirkanina á brúkaraprístalið í 2022, hevur tað síðani verið øktir matvøruprísir og rentuútreiðslur, sum hava gjørt seg galdandi.

Húsarhaldini hava sostatt upplivað stórar prís- og rentuhækkingar, men eru kortini bjartskygd sambært brúkarakanning hjá Hagstovuni. Sama støðan er ikki hjá vinnuni, har treystitalið er lækkað úr 17 í januar 2023 til 6 í juni 2023 og liggur undir langtíðarmiðalið.

**Inntøkurnar**
Inntøkurnar hjá kommununi hava verið á einum jøvnum stigi, og sær inntøkumetingin fyri 2023 út til at halda. Mett verður tó ráðiligt at hava eina varna meting av vøkstrinum í kommunuskatti millum annað við hækkingunum í vøruprísum og rentuni í huga. Av somu orsøk verður eisini felagsskatturin, skatturin frá partafeløgum, mettur til at vera á sama støðið næsta ár.

Størsta inntøkukeldan hjá kommununi er kommunuskatturin. Mett verður at kommunuskatturin hækkar 5,5% sammett við fíggjarætlanina 2023. Inntøkurnar vaksa soleiðis við 52 mió. kr. frá 951 mió. kr. til 1.003 mió. kr.

Inntøkurnar av skatti av eftirlønarinngjøldum fyri 2024 eru mettar til 210 mió. kr, sum er 18 mió. kr. ella 9,3% hægri enn metta talið fyri 2023.

Inntøkan frá felagsskattinum er fyri 2024 mett at verða 60 mió. kr, ið er á sama støði, sum metingin fyri 2023. Felagsskatturin kann vera torførur at meta um, staðfesti felagsskatturin fyri 2022 var 68 mió. kr.

Samlaðu inntøkurnar í fíggjarætlanini fyri 2024 vaksa 69,7 mió. kr. ella 5,6% upp í 1.310 mió. kr. í mun til metingina fyri 2023 upp á 1.240 mió. kr.

**Rakstrarútreiðslurnar**
Virksemið í høvuðsstaðarkommununi er enn í stórum vøkstri.

Fólkatalið í Føroyum veksur støðugt. Størsti vøkstur í tali er í Tórshavnar kommunu. Nú búgva yvir 23.300 fólk í kommununi svarandi til 43% av samlaða fólkatalinum í landinum.

Talið av borgarum í kommununi vaks frá august 2022 til august 2023 við 1,3% ella 303 borgarum úr 23.013 upp í 23.315. Vøksturin er nakað lægri enn í fjør. Fólkatalið í øllum landinum vaks sama tíðarskeið 1,2%.

Stóri fólkavøksturin seinastu árini hevur ført við sær eina munandi øking í virkseminum, tænastunum og harvið eisini rakstrarútreiðslunum. Fólkavøkstur og broytt fólkasamanseting hevur við sær, at neyðugt er at taka hædd fyri hesum í framskrivingunum av ávísum játtanum, um verandi virksemi skal varðveitast.

Samanløgdu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununi vaksa í fíggjarætlanini fyri 2024 netto 55 mió. kr. upp í 1.049 mió.kr úr 993 mió. kr. Hetta er ein vøkstur upp á 5,6%, fyri Tórshavnar kommunu í mun til fíggjarætlanina fyri 2023. Við Tórshavnar havn, sum er inntøkufíggjað er vøksturin 6,2%

**Lønir eru størsti partur av rakstrarkostnaðinum**
Av samlaða bruttokostnaðinum eru lønirnar 60% og 74% av nettokostnaðinum. Framskrivað er fyri kendar lønarhækkingar í 2024. Lønarhækkanin er mett til 3,8% í 2023 og 4,1% í 2024. Óvissa er um fíggjarætlanina 2024 í sambandi við lønarútreiðslurnar, í hesum uppskotinum er hædd ikki tikið fyri einum lønarlyfti og styttari arbeiðsviku.

Til komandi ár eru lønirnar mettar at vaksa 32,8 mió. kr. ella 4,6% í mun til fíggjarætlan fyri 2023. Av vøkstrinum fyri 2024 eru 21 mió. kr. lønarhækkingar í sambandi við sáttmálar.

**Prísvøkstur**
Meginreglan er, at prísvøkstur ikki er framskrivaður, men hetta er tó gjørt fyri ávísar játtanir. Fyri dagstovnaøkið er tikið hædd fyri einum prístalsvøkstri á 4%.

Ein partur av inntøkunum hjá kommununi koma frá brúkaragjøldum. Gjøldini fyri barnaansingina verða dagførd árliga í sambandi við fíggjarætlanina. Gjøld á eldraøkinum eru dagførd sambært uppskotinum hjá kommunufelagnum. Í uppskotinum eru flest onnur gjøld prístalsjavnaði við 4,4%

**Høvuðsútreiðslutøl á greinunum**
**Á §1 Kommunal fyrisiting økjast nettoútreiðslurnar 5,3% ella 5,2 mió.**
Størsti parturin av vøkstrinum er orsakað av lønarhækkanum og prístalsjavningar í sáttmálum og lisensum. Kommunuval verður í 2024 og eru 1,2 mió. kr. settar av til endamálið.

**Nettoútreiðslurnar á §2 Almanna- og heilsumál økjast við 3,93% ella 12,1 mió. kr.**
Játtanin til hvíldarheimið Naina lækkar við 397 t.kr. Játtanin tekur støðið í verandi útreiðslu.

Játtanin til kommunulæknatænastur hækkar við 880 t.kr. Talan er í høvuðsheitum um øktar leigukostnaðir og setan av einum kommunulækna afturat.

Integratión hækkar við 700 t.kr. játtanin er til flóttafólkasamskipara og tulk umframt rakstur.

Á sosiala økinum er ein framroknað nýtsla samsvarandi mettari nýtslu í inniverandi ári. Harumframt er ein játtan á 500 t.kr. til fyribyrgingarverkaætlan sum byrjaði á vári 2023 og endar einast í 2024. Samlaðu rakstrarútreiðslurnar á sosiala økinum økjast við 2,5 mió. kr.

Eldraøkið stendur fyri eini hækking í játtanini á 7,3 mió. kr. netto. Gjøld fyri búpláss, heimahjálp og umlætting eru dagførd sambært uppskotinum frá Kommunufelagnum um felags leist fyri áseting av gjøldum fyri árini 2023, 2024 og 2025.

**Nettoútreiðslurnar á §3 Børn og ung fylgja í høvuðsheitum barnatalinum og økjast 5,8% ella 13,0 mió. kr.**
Játtanin til børn við serligum tørvi er økt við 2. mió. kr.
Foreldragjaldið er óbroytt 27%. Útreiðslurnar til systkinaavsláttur hækka 500 t.kr. ella 3,1% mett út frá útreiðslum í 2023.

**Á §4 Undirvísing økjast nettoútreiðslurnar 9,3% ella 4,8 mió. kr.**
Játtanin fylgir metta næmingatalinum og er mett út frá framskrivingum. Eisini er peningur settur av til Skúlanet.

**Nettoútreiðslurnar á §5 Mentan og frítíð økjast við 10,0% ella 6,5 mió. kr.**
Hædd er tikin fyri øktum virksemi og hægri stuðulsjáttan. Stuðul til ítrótt og stuðul annars hækkar við tilsamans 2,35 mió. kr.

Langhylurin verður væntandi tikin í nýtslu í 2024, lagt er upp fyri hesum í rakstrinum. Játtanin til svimjihøllina hækkar í hesum sambandi við 1,9 mió. kr. Eisini hækkar játtanin til ítróttarannlegg við 1 mió. kr.

**Nettoútreiðslurnar á §6 Teknisk mál økjast við 4,6% ella 7,0 mió. kr.**
Størsta játtanin á tekniska økinum er til umsiting og røkt av bygningum. Játtanin økist við 3 mió. kr. svarandi til 5,1% frá 60,5 mió. kr til 63,6 mió. kr.
Í uppskotinum er harumframt sett meira peningur av til Umhvørvistiltøk 905 t.kr. Vatnveiting 822 t.kr. og gøtuljós 720 t.kr.
9,5 mió. kr. eru settar av til vegir, hetta er ein øking á 1,3 mió. kr. Kontan kavarudding er dagførd soleiðis, at játtanin svarar til nýtsluna, játtanin økist við 1,3 mió. kr.

**Á § 7 Kommunal virki, frároknað Tórshavnar havn økjast nettoútreiðslurnar 7,63% ella 6,5 mió. kr.**
Renovatiónin hevur ein lítlan vøkstur í netto játtanini 1,7% ella 471 t.kr. Orsøkin er, at brúkargjøldini eru prístalsjavnaði í framskrivingini. Nettojáttanin til Sløkkiliðsstøðina økist við góðum 800 t.kr.

Bussleiðin hækkar við 1,9 mió. kr. samsvarandi sáttmála.

Samtykt er at veita 1 mió. kr. í stuðli til filmsverkætlanir, og hækkar játtanin til vinnuverkætlanir við hesi upphædd.

Játtanin til ferðavinnuna hækkar við 1,7 mió. kr. harav er 1 mió. kr. til MICE.

**Aðrar útreiðslur**
Stuðul til rentuútreiðslur hækkar úr 18 mió. kr. í 2023 til 30 mió. kr. í 2024. Orsøkin er, at rentan er hækkað seinasta árið og væntandi fer at hækka nakað aftrat í ár.

**Fíggjarstøðan**
Lániskuldin hjá kommununi er í alt 375 mió. kr. Av hesum eru 157 mió. kr. knýttar at Tórshavnar kommunu og 218 mió. kr. at Tórshavnar havn.

Innkomuvegurin verður fíggjaður við lántøku. Í juni tók kommunan eitt lán á 150 mió. kr. og roknað verður við at 130 mió. kr. verða tiknar aftrat í ár.

Rentuútreiðslurnar verða mettar til 15,4 mió. kr. í 2024. Afturgjald av skuld verður mett til 37,4 mió. kr. harav 21,6 mió. kr. í Tórshavnar kommunu og 15,9 mió. kr. í Tórshavnar havn.

Tøkur peningur hjá kommununi var seinast í august 196 mió. kr., 120 mió. kr. hjá Tórshavar kommunu og 76 mió. kr. hjá Tórshavnar havn. Samtykt er eitt minsta gjaldføri á 79 mió. kr. í Tórshavnar kommunu.

Í fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við nevndu fortreytum og virksemisbroytingum verður
úrslit áðrenn rentur 265.4 mió. kr. Úrslit áðrenn avdráttir og íløgur verður 250 mió. kr.
Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar kommunu verður 197,5 mió. kr. Er avlopið til skattafíggjaðar íløgur lægri enn samlaðu íløgurnar, má munurin fíggjast við meiri inntøku og/ella lægri útreiðslum og/ella lántøku.

Býráðið ásetir kommunuskattaprosentið og barnafrádráttin og kann umvegis hesi bæði broyta fortreytirnar fyri fíggjarætlanina. Eitt skattaprosent verður mett til vera áleið. 55 mió.kr.

**Skjøl**
Yvirlit yvir sáttmálabundnar íløgur.
Yvirlit yvir gjøld

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið er**
23/05149 Fíggjarætlan Tórshavnar havn 2024

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri
býráðið innan 1. oktober.

**Fíggjarnevndin 28. september 2023:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Framlagt.

# 224/23 Val av 5 limum og tiltakslimum til fíggjarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.11.2020 | 255/20 | 20/04130-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 224/23 | 20/04130-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 28 og § 38 í kommunustýrislógini er ásett:

§ 28 Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt

§ 28 stk 2 ásetir:

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

§ 38 Fíggjarnevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av málum, ið víðvíkja kassa- og roknskaparverki og lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar. Borgarstjórin er nevndarformaður.

*Stk. 2*. Fíggjarnevndin samskipar og fylgir við fíggjarligu og fyrisitingarligu viðurskiftunum innan tað kommunala fyrisitingarøkið.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 4 limir til fíggjarnevndina, borgarstjórin er føddur formaður í nevndini. Harumframt, at býráðið velur 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 12. november 2020: Vald vórðu:**

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Heðin Mortensen | Kristianna Winther Poulsen |
| Annfinn Brekkstein | Kári Johansen |
| Tróndur Sigurðsson | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Gunvør Balle |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen |

**Ískoyti:**
Tjóðveldi biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Heðin Mortensen | Kristianna Winther Poulsen |
| Annfinn Brekkstein | Kári Johansen |

Tróndur Sigurðsson
Jákup Dam
Annika Olsen
Bjørg Dam
Gunvør Balle
Birgir Nielsen

# 225/23 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í byggi- og býarskipanarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.11.2020 | 256/20 | 20/04131-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 3/23 | 20/04131-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 225/23 | 20/04131-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 25 í kommunustýrisskipanini er ásett:

1. petti. Byggi og býarskipanarnevndin hevur 5 limir.
2. petti. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Býarskipan og byggisamtyktir
2. Útstykkingar
3. Byggimál
4. Lendismál
5. Kirkjugarðar
6. Bygningsrakstur og -viðlíkahald av øllum kommunalum bygningum og anleggum eftir ásettari mannagongd
7. Fríðkan (viðarlundir, spælipláss, gøtur)
8. Áir, veitir og jarðarognir, tað veri seg traðarognir, urtagarðs- og onnur jarðarstykki.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 12. november 2020:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Tróndur Sigurðsson | Bjørg Dam |
| Annfinn Brekkstein | Súna Mørk |

| | |
|---|---|
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen |
| Ruth Vang | Birgir Nielsen |
| Jákup Dam | Elsa Berg |

**Ískoyti:**
Ruth Vang hevur biðið um at fáa málið á skrá.

Býráðsfundur 26. januar 2023: Vald vóru:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Tróndur Sigurðsson | Bjørg Dam |
| Annfinn Brekkstein | Súna Mørk |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen |
| Súsanna Olsen | Birgir Nielsen |
| Jákup Dam | Elsa Berg |

**Ískoyti:**
Tjóðveldi biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Vald vóru:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Tróndur Sigurðsson | Bjørg Dam |
| Annfinn Brekkstein | Súna Mørk |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen |
| Súsanna Olsen | Birgir Nielsen |
| Jákup Dam | Turið Horn |

# 226/23 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í trivnaðarnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.11.2020 | 260/20 | 20/04133-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 30/23 | 20/04133-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 226/23 | 20/04133-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

**§ 27** í kommunustýrisskipanini ásetur:

***1. petti.*** Trivnaðarnevndin hevur 5 limir.

Nevndin tekur avgerð í málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið ella eina sosiala nevnd, í tann mun fyriskipaninar í lóggávuni ikki eru til hindurs fyri hesum.

***2. petti.*** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Barnatannrøkt
2. Barnavernd
3. Familjupolitikkur
4. Heilsu og umsorganartænasta
5. Fólkaheilsa

***3. petti.*** Nevndin fyrisitur teir stovnar hjá kommununi, ið ætlaðir eru til sosial- og heilsulig endamál og kommunalar íbúðir og skipar fyri at útvega innbúgv, amboð og tílíkt til hesar.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 5 limir í Trivnaðarnevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 12. november 2020:** Vald vórðu:

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Varalimir |
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |
| Kristianna Winther Poulsen | Tróndur Sigurðsson |
| Jákup Dam | Elsa Berg |
| Gunvør Balle | Ruth Vang |

Býráðsfundur 23. februar 2023: Vald vóru:

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Varalimir |
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |
| Kristianna Winther Poulsen | Tróndur Sigurðsson |
| Jákup Dam | Elsa Berg |
| Gunvør Balle | Súsanna Olsen |

**Ískoyti:**
Tjóðveldi biður um at fáa málið á skrá.

Býráðsfundur 28. september 2023: Vald vóru:

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Varalimir |
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |
| Kristianna Winther Poulsen | Tróndur Sigurðsson |
| Turið Horn | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Súsanna Olsen |

## 227/23 Val av 5 limum og tiltakslimum í náttúru- og umhvørvisnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.11.2020 | 258/20 | 20/04136-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 31/23 | 20/04136-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 227/23 | 20/04136-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29**. Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 26 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** Umhvørvisnevndin hevur 5 limir.
**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Brennistøðin,
2. Ruskinnsavnanin
3. Jarnmóttøku kemikaliur, spilloljuslamsúgving,rottangatøming, tyrving o.a.
4. Náttúru og umhvørvi
5. Frílendi
6. Framtíðar orka
7. Umhvørvismál
8. Umhvørvisátøk so sum umhvørvisvika v.m.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 12. november 2020:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Súna Mørk | Tróndur Sigurðsson |

| | |
|---|---|
| Annfinn Brekkstein | Kári Johansen |
| Elsa Berg | Ruth Vang |
| Gunvør Balle | Jákup Dam |

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Súna Mørk | Tróndur Sigurðsson |
| Annfinn Brekkstein | Kári Johansen |
| Elsa Berg | Súsanna Olsen |
| Gunvør Balle | Jákup Dam |

**Ískoyti:**
Tjóðveldi biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Vald vórðu:

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Súna Mørk | Tróndur Sigurðsson |
| Annfinn Brekkstein | Kári Johansen |
| Turið Horn | Súsanna Olsen |
| Gunvør Balle | Jákup Dam |

## 228/23 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í eldranevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.11.2020 | 261/20 | 20/04322-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 228/23 | 20/04322-1 |

Málslýsing:
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29**. Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.
Stk. 2. Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 28 í kommunustýrisskipanini er ásett um eldranevnd:

**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Heilsu- og umsorganartænasta

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir

**Býráðsfundur 12. november 2020: Vald vórðu:**

| Fastir limir | varalimir |
|---|---|
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Súna Mørk | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Annfinn Brekkstein |
| Annika Olsen | Elsa Berg |
| Birgir Nielsen | Jákup Dam |

**Ískoyti:**
Tjóðveldi biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Vald vórðu:

| Fastir limir | varalimir |
|---|---|
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Súna Mørk | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Annfinn Brekkstein |

Annika Olsen
Birgir Nielsen
Turið Horn
Jákup Dam

# 229/23 Val av 5 limum og 5 varalimum í vinnunevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2021 | 43/21 | 21/00354-1 |
| 2 Vinnunevndin | 11.02.2021 | 7/21 | 21/00354-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 229/23 | 21/00354-1 |

**Málslýsing:**

**§31**

**1. petti**. Undir fíggjarnevndini verður sett ein vinnunevnd við 5 kommunustýrislimum, ið skal viðgera vinnumál.

**2. petti.** Nevndin viðgerð og leggur fyri fíggjarnevndina mál, ið viðvíkja hesum málsøkjum:

1. Vinnuvirksemi og vinnubygningar, tó ikki á havnaøkinum
2. Vinnupolitikkur og vinnumál
3. Ferðavinna/cruisevinna
4. Handils- og tænastuvinnu
5. Vinnunýskipan
6. Vinnustrategi
7. Hýruvognsloyvi
8. Hugskotið
9. Stuðulsjáttanir á ferðavinnuøkinum

**3. petti.** Nevndin leggur síni tilmæli fyri fíggjarnevndina at bera víðari í skipanini.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 28. januar 2021: Vald vórðu:**

| **Fastir limir** | **Tiltakslimir** |
|---|---|
| Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Kári Johansen | Tróndur Sigurðsson |
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |
| Elsa Berg | Gunvør Balle |
| Birgir Nielsen | Annika Olsen |

**Ìskoyti:**
Á fundi skipar nevndin seg við formanni og næstformanni.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at velja formann og næstformann.

**Vinnunevndin 11. februar 2021:** Samtykt at velja Kristionnu Winther Poulsen til forkvinnu og Kára Johansen til næstformann.

**Ískoyti:**
Tjóðveldi biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 28. september 2023: Vald vórðu:**

| **Fastir limir** | **Tiltakslimir** |
|---|---|
| Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Kári Johansen | Tróndur Sigurðsson |
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |
| Turið Horn | Gunvør Balle |
| Birgir Nielsen | Annika Olsen |

# 230/23 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í vinnunevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 12.11.2020 | 262/20 | 20/04134-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.01.2021 | 44/21 | 20/04134-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 230/23 | 20/04134-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2*. Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 29 í kommunustýrisskipanini er ásett:

***2. petti.*** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Tórshavnar havn
2. Smábátahavn
3. Vinnubygningar og vinnuøki
4. Oljuvinnu
5. Fiskivinnu
6. Ferðavinnu
7. Cruisevinnu
8. Handils- og tænastuvinnu
9. Vinnunýskapan
10. Vinnustrategi
11. Hýruvognsloyvi

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 12. november 2020:** Vald vórðu:

Fastir limir varalimir

| | |
|---|---|
| Kári Johansen | Súna Mørk |
| Tróndur Sigurðsson | Annfinn Brekkstein |
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Birgir Nielsen | Annika Olsen |
| Elsa Berg | Gunvør Balle |

**Býráðsfundur 28. januar 2021:** Vald vórðu:

| **Fastir limir** | **varalimir** |
|---|---|
| Kári Johansen | Súna Mørk |
| Tróndur Sigurðsson | Bjørg Dam |
| Annfinn Brekkstein | Kristianna Winther Poulsen |
| Birgir Nielsen | Annika Olsen |
| Elsa Berg | Gunvør Balle |

**Ískoyti:**

**Havnanevndin**
**§ 30**

**1. petti.** Havnanevndin hevur 5 limir
**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Tórshavnar havn
2. Smábátahavnir
3. Vinnuvirksemið og vinnubygningar á havnaøkinum
4. Fiskivinna
5. Oljuvinna
6. Cruise/ferðamannaskip

**3. petti.** Nevndin fyrisitur bíðilistar til pláss í smábátahavnum og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**4. petti.** Nevndin fyrisitur býráðsins vegna peningaviðurskiftum og roknskaparhaldi hjá vinnuhavnum og smábátahavnum samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi roknskaparreglum og reglum viðvíkjandi fyrisiting av havnum o.ø.

Roknskaparhaldið hjá vinnuhavnum og smábátahavnum skal haldast hvørt sær.

Loyvt er ikki at rinda møguligt hall av rakstri av smábátahavnum v.m. av inntøkum hjá vinnuhavnum.

**Tilmæli:**
Tjóveldi biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Vald vórðu:

| **Fastir limir** | **varalimir** |
|---|---|
| Kári Johansen | Súna Mørk |
| Tróndur Sigurðsson | Bjørg Dam |
| Annfinn Brekkstein | Kristianna Winther Poulsen |
| Birgir Nielsen | Annika Olsen |

Turið Horn

Gunvør Balle

## 231/23 Val av limi í hvítanesnevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.01.2021 | 2/21 | 20/04138-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 231/23 | 20/04138-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 37 í kommunustýrislógini er ásett:

Kommunustýrið kann seta staðbundnar, ráðgevandi nevndir til tess at tryggja fólki á staðnum ummælisrætt í málum, sum viðvíkja staðbundnum viðurskiftum.

*Stk. 2.* Staðbundnar nevndir skulu verða mannaðar bæði við umboðum úr kommunustýrinum og við staðbundnum umboðum, tó soleiðis, at staðbundnu umboðini altíð eiga meirilutan.

Sambært § 32 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum á Hvítanesi verður vald ein nevnd við 5 limum. Tríggir valdir av og millum borgararnar á Hvítanesi eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið. Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

Á kommunuvalinum 10. november 2020 vóru vald: Aage Nybo, Ejler Johannesen og Rannvá Lamhauge Beder.

"Luttalsval smb. § 28 stk. 3 í kommunustýrislógini, ið er soljóðandi:
Stk. 3. Hevur borgarstjórin ella annar nevndarformaður fastan sess í eini nevnd, verður hesin sessur taldur við upp í sessatalið, sum bólkur teirra hevur rætt at ogna sær."

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja ein lim millum limir tess.

**Býráðsfundur 14. januar 2021:** Vald varð Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Tjóðveldi biður um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Vald varð: Turið Horn.

# 232/23 Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.01.2021 | 23/21 | 20/04145-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 70/21 | 20/04145-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 6/23 | 20/04145-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 232/23 | 20/04145-1 |

**Býráðsfundur 14. januar 2021:** Vald vórðu:

**Skúlin á Fløtum**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Súna Mørk | Bjørg Dam |
| Birgir Nielsen | Ruth Vang |

**Eysturskúlin**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Kári Johansen | Súna Mørk |
| Annika Olsen | Gunvør Balle |

**Sankta Frans skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kári Johansen |
| Birgir Nielsen | Ruth Vang |

**Skúlin á Argjahamri**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Annfinn Brekkstein | Súna Mørk |
| Ruth Vang | Birgir Nielsen |

**Hoyvíkar skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Gunvør Balle | Annika Olsen |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam |

**Kollfjarðarskúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| | |
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Elsa Berg | Jákup Dam |

**Kaldbaks skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| | |
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Jákup Dam | Elsa Berg |

**Velbastaðar skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| | |
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Ruth Vang | Birgir Nielsen |

Eisini mælir kommunustjórin býráðnum til at velja 1 umboð fyri ávikavist skúlan í Nólsoy, Lítlaskúla og Frískúlan í Havn, umframt ein tiltakslim fyri hvørt skúlastýrið.

**Nólsoyar skúli**

| | |
|---|---|
| Fastur limur | Tiltakslimur |
| | |
| Súna Mørk | Kári Johansen |

**Lítli skúli**

| | |
|---|---|
| Fastur limur | Tiltakslimur |
| Kári Johansen | Súna Mørk |

**Frískúlin í Havn**

| | |
|---|---|
| Fastur limur | Tiltakslimur |
| | |
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |

Býráðsfundur 25. februar 2021: Vald vórðu:

**Skúlin á Fløtum**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Bjørg Dam | Kári Johansen |
| Ruth Vang | Elsa Berg |

**Eysturskúlin**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Súna Mørk | Bjørg Dam |
| Annika Olsen | Gunvør Balle |

**Sankta Frans skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Bjørg Dam | Kári Johansen |
| Birgir Nielsen | Ruth Vang |

**Skúlin á Argjahamri**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Annfinn Brekkstein | Súna Mørk |
| Birgir Nielsen | Ruth Vang |

**Hoyvíkar skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Kristianna Winther Poulsen | Kári Johansen |
| Gunnvør Balle | Annika Olsen |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam |

**Kollfjarðarskúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Elsa Berg | Gunvør Balle |

**Kaldbaks skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Jákup Dam | Elsa Berg |

**Velbastaðar skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Kári Johansen | Bjørg Dam |
| Ruth Vang | Birgir Nielsen |

Eisini mælir kommunustjórin býráðnum til at velja 1 umboð fyri ávikavist skúlan í Nólsoy, Lítlaskúla og Frískúlan í Havn, umframt ein tiltakslim fyri hvørt skúlastýrið.

**Nólsoyar skúli**

| | |
|---|---|
| Fastur limur | Tiltakslimur |
| Súna Mørk | Kári Johansen |

**Lítli skúli**

| | |
|---|---|
| Fastur limur | Tiltakslimur |
| Kári Johansen | Súna Mørk |

**Fríksúlin í Havn**

| | |
|---|---|
| Fastur limur | Tiltakslimur |
| Bjørg Dam | Annfinn Brekkstein |

**Ískoyti:**
Ruth Vang hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Vald vórðu:

**Skúlin á Fløtum**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |

| | |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kári Johansen |
| Súsanna Olsen | Elsa Berg |

**Eysturskúlin**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Súna Mørk | Bjørg Dam |
| Annika Olsen | Gunvør Balle |

**Sankta Frans skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Bjørg Dam | Kári Johansen |
| Birgir Nielsen | Súsanna Olsen |

**Skúlin á Argjahamri**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Annfinn Brekkstein | Súna Mørk |
| Birgir Nielsen | Súsanna Olsen |

**Hoyvíkar skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Kristianna Winther Poulsen | Kári Johansen |
| Gunnvør Balle | Annika Olsen |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam |

**Kollfjarðarskúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Elsa Berg | Gunvør Balle |

**Kaldbaks skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Jákup Dam | Elsa Berg |

**Velbastaðar skúli**

| | |
|---|---|
| Fastir limir | Tiltakslimir |
| Kári Johansen | Bjørg Dam |
| Súsanna Olsen | Birgir Nielsen |

Eisini mælir kommunustjórin býráðnum til at velja 1 umboð fyri ávikavist skúlan í Nólsoy, Lítlaskúla og FRískúlan í Havn, umframt ein tiltakslim fyri hvørt skúlastýrið.

**Nólsoyar skúli**

| | |
|---|---|
| Fastur limur | Tiltakslimur |
| Súna Mørk | Kári Johansen |

**Lítli skúli**

| | |
|---|---|
| Fastur limur | Tiltakslimur |
| Kári Johansen | Súna Mørk |

**Fríkúlin í Havn**

Fastur limur	Tiltakslimur
Bjørg Dam	Annfinn Brekkstein

**Ískoyti:**
Tjóðveldi biður um at fáa málið á skrá.

Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Vald vórðu:

**Skúlin á Fløtum**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kári Johansen |
| Súsanna Olsen | Turið Horn |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Turið Horn | Jákup Dam |

**Kollfjarðarskúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Bjørg Dam | Kristianna Winther Poulsen |
| Turið Horn | Gunvør Balle |

**Kaldbaks skúli**

| Fastir limir | Tiltakslimir |
|---|---|
| Súna Mørk | Kári Johansen |
| Jákup Dam | Turið Horn |

## 233/23 Eykajáttan til 8114 kavarudding

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.03.2023 | 12/23 | 22/04631-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 81/23 | 22/04631-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 08.05.2023 | 26/23 | 22/04631-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 05.06.2023 | 30/23 | 22/04631-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 172/23 | 22/04631-1 |
| 6 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 162/23 | 22/04631-1 |
| 7 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 190/23 | 22/04631-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.09.2023 | 260/23 | 22/04631-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 233/23 | 22/04631-1 |

**Upprunin til málið**
Seinastu vetrarnir hava verið merktir av nógvum frost- og kavadøgum. Kavarudding og salting í sambandi við hetta veðurlagið hevur verið tilsvarandi umfatandi hesar vetrarnar. Tað varð gjørt vart við hetta í september 2022, tá veturin aftur stóð fyri durum. Víst var á, at tað var alneyðugt, at eykajáttan varð veitt hesi konto til tess at tryggja framhaldandi virksemi innan økið. Málið kom ikki til politiska viðgerð, men krav var um framhaldandi virksemi við tí úrsliti, at roknskapurin fyri 2022 vísti eitt samlað hall á kr. 7.509.000. Talan er um eitt systematiskt framflutt hall síðani 2018, sum fellur saman við einum hørðum vetri, har uml. tkr 830 meira enn miðal fyri seinastu 5 árini verður brúkt til lønir, tkr. 730 meira enn miðal til salt o.l., og salttunnilin verður tryggjaður til framhaldandi góðkenning fyri uml. tkr. 1.100.

**Lýsing av málinum**
Kavaruddingin verður fíggjað av konto 8114 Kavarudding, sum er ein konto, ið verður umsitin av rakstrarstovninum sambært endamálinum fyri kontuni. Hetta umfatar í høvuðsheitum at salta vegirnar, tá frostur er, og at rudda vegir og gongubreytir, tá kavi er. Konta 8114 Kavarudding fíggjar allar lønir í sambandi við hesi arbeiði, allar útreiðslur til maskinur, og alt tilfar íroknað salt.

Í viðfesta skjali 22/04631-3 (8114 Nýtsla 2010-2022_endaligt) ber til at síggja søguligu gongdina fyri játtan og nýtslu á hesi konto og tal av frostdøgum fyri árini 2010 til 2022. Út frá hesum tølum sæst, at hvør frostdagur hevur hesi árini kosta í miðal tkr. 111. Her skal roknast við, at tað vanliga eru fleiri kavadagar enn frostdagar, og at tað vanliga tekur meira enn ein dag at rudda allar kommunalar vegir fyri kava, tá talan hevur verið um størri kava. Samstundis sæst í skjalinum, at umrøddu árini hevur vanliga verið játtað uml. kr. 88.000 til hvønn frostdag.

Í 2020 var hall á kontuni á uml. 1.160 tkr. og hallið á tkr. 1.010 framflutt til 2021. Í 2021 gjørdist hallið samlað tkr. 2.852, íroknað framlutta hallið frá árinum frammanundan. Játtanin í 2022 var tkr. 3.259 umframt eitt framflutt hall á tkr. 2.852 frá árunum frammanundan so netto játtanin fyri 2022 var kr. 407.000.

Vanliga hava avlop og hall verið framflutt millum ár á kontuni, og tá tørvur hevur verið á tí, er eykajáttan veitt til at tryggja virksemið á økinum. Sum tað er víst á í gjøgnumgongdini av søguligu gongdini á kontuni í viðfesta skjalinum og omanfyri, so er tað kortini soleiðis, at kontan flestu ár hevur verið undirfíggjað.

Mett varð, at fyri at virksemi innan kavaruddingarøkið kundi halda fram í seinnu helvt av 2022, var neyðugt, at eykajáttan varð veitt, sum vigaði upp samlaða hallið pr. august 2022 og væntaða nýtslu fyri 11 frostdagar í seinnu helvt av 2022, sum svarar til miðal frostdagatalið í seinnu helvt av árinum seinastu 12 árini.

Mett varð ikki, at tað var ráðiligt, at halda fram við at framflyta hall á hesi konto til komandi ár, tí tað ikki er gjørligt at meta um tørvin á kontuni, tá hesin er so tætt tengdur at veðrinum. Heldur eiga møgulig avlop at verða framflutt til verri ár. Henda meting er enn óbroytt.

Nú 2022 er farið aftur um bak vísir tað seg, at eisini veturin í seinnu helvt av 2022 hevur verið harðari enn miðal, og hevur konta 8114 tí eitt endaligt hall á tkr. 7.509.

Íroknað í hetta er, at kostnaðurin av salti í 2022 hevur verið um 45% hægri enn vanligt (uml. 730 tkr.). Hetta vegna støðuna á heimsmarknaðinum. Eisini eru í 2022 goldnar tkr. 1.078 fyri at tryggja, at saltgoymslan í tunlinum við Oyggjarvegin lýkur treytirnar fyri arbeiðstrygd sambært krøvum hjá Arbeiðseftirlitinum. Um hetta arbeiði ikki varð gjørt, var eingin saltgoymsla.

Í 2022 hava tað sambært Veðurstovu Føroya verið 70 dagar har døggpunktið hevur verið undir 0 stig celsius, og 56 dagar, har hitin hevur verið undir 3 stig celsius.

Fyri 2023 er játtanin kr. 4.947.000. Væntast kann at hetta er nøktandi játtan.

Mett verður ikki at aðrar rakstrarkontur undir grein 6 kunnu fíggja hetta hallið, uttan at hetta fær avleiðingar, sum fara at merkjast á tænastustøðinum innan hesar deildir.

**Skjøl**
J.nr. 22/04631-3: 8114 nýtsla 2010-2022_endaligt
J.nr. 22/04631-4: 8114 Kavarudding Lønir 2018-2022
J.nr. 22/04631-5: 8114 Kavarudding Vørukeyp annars 2018-2022

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| 8114 | | Kavarudding | |

| Upphædd |
|---|
| 7.509.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 7.509.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við,
- at eykajáttan á kr. 7.509.000 skal veitast konto 8114 Kavarudding til tess at tryggja, at kavarudding og salting framhaldandi kann verða veitt í 2023.
- at samtyktin hjá nevndini í málinum verður beind víðari í býraðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. mars 2023:** Samtykt at heita á umsitingina um at koma við einum uppskoti um, hvussu partur av hesum kann fíggjast av rakstrinum og at leggja fyri nevndina aftur á komandi fundi.
**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin í teknisku fyrisiting hevur umrøtt, hvussu partur av hallinum á kr. 7.509.000 kann fíggjast av rakstrinum.

Í skjali nr. 22/04631-8 «8114 Kavarudding dekningur av halli 2022 TF» er víst, hvussu kr. 2.215.960 kunnu finnast á rakstrarkontum fyri 2023. Her er talan um 1,6% av samlaðu játtanini á umrøddu kontunum og 4,7% av tí játtanini, sum ikki er bundin í lønum og føstum leigu- og viðlíkahaldsútreiðslum. Hesin parturin svarar til 29,5% av hallinum á konto 8114 fyri 2022.

Í fleiri førum er talan um kontur, sum longu eru i ferð við at heinta inn hall yvir avtalað tíðarskeið, og tí kann hesin eyka niðurskurður í játtanini koma at hava merkbarar fylgjur fyri virksemið undir hesum kontum.

Síðani eru eftir kr. 5.293.040,- at dekka inn írestandi hallið á konto 8114 Kavarudding fyri 2022.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☒

Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 2.215.960 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 2.215.960 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við,

- at kr. 2.215.960,- verða fluttar av rakstrarkontum undir teknisku fyrisiting, sum lýst í málinum á konto 8114 Kavarudding.
- at eykajáttan á kr. 5.293.040,- skal veitast konto 8114 Kavarudding til tess at dekka inn írestandi hallið á hesi konto.

at samtyktin hjá nevndini í málinum verður beind víðari í býraðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina

**Tekniska nevnd 08. mai 2023:** Samtykt at heita á umsitinga um at finna eina størri upphædd á rakstrinum til næsta fund.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur kannað, um til ber at finna fleiri sparingar í rakstrinum, serliga við at skera í lønarkostnaðum í fyrisitingini og á rakstrarstovnunum. Hesar kanningar vísa sera smáar eyka sparingar í 2023, um natúrliga fráfarin størv ikki verða endursett. Somuleiðis kann vísast á, at beinleiðis uppsagnir ikki koma at hava munandi sparingar við sær í 2023, tí hesar uppsagnir kunnu taka langa tíð at gjøgnumføra. Eisini skal í hesum sambandi vísast á, at tað ikki verður mett forsvarligt, at minka um arbeiðsorkuna, um virksemið skal haldast á nøktandi støði. Tað eru deildir undir rakstrarstovninum, sum vegna truplar rekruteringsumstøður, ikki eru mannaðar, svarandi til normeringarnar. Á hesum deildum hevur verið neyðugt, at virksemið tá er framt av eksternum veitarum, sum vísa seg ikki at veita bíligari tænastu, enn um normeraðu størvini vóru sett.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla tí framhaldandi til:

- at kr. 2.215.960,- verða fluttar av rakstrarkontum undir teknisku fyrisiting, eins og lýst í málinum, á konto 8114 Kavarudding.
- at eykajáttan á kr. 5.293.040,- skal veitast konto 8114 Kavarudding til tess at dekka inn írestandi hallið á hesi konto.

at samtyktin hjá nevndini í málinum verður beind víðari í býraðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 05. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at restin av fíggingini kemur í sambandi við fíggjarætlanararbeiði í heyst.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið krevur tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Inntøkurnar fyri árið hava verið nakað hægri enn mett í fíggjarætlanini fyri 2023. Í mánaðarroknskapinum í august mánaði eru inntøkurnar 6 mió. kr. hægri enn mett. Framskrivingar vísa, at hettar tali helst verður nakað hægri við ársenda.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og tekniski stjóri mæla til at írestandi hallið á 8114 Kavarudding á 5.3 mió. kr. verður játta av meirinntøkum í árinum.

**Fíggjarnevndin 28. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

## 234/23 Nýggj Atlagøta

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.09.2023 | 43/23 | 23/05081-1 |
| 2 Gøtunavnanevndin | | | 23/05081-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2023 | 173/23 | 23/05081-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 234/23 | 23/05081-1 |

**Upprunin til málið**
Politiskt er ynski um Atlagøta verður strikað sum gøtunavn á verandi gøtu við hesum navni millum Løgmannabreyt og Karlamagnusarbreyt.

**Lýsing av málinum**
Atlagøta er í dag partur av gøtunum, sum liggja upp at Løgmannabreyt. Allar hesar gøturnar hava fingið navn eftir fyrrverandi løgmonnum.

Sambindingarvegurin millum Løgmannabreyt og Karlamagnusarbreyt miðskeiðis á hesum vegum hevur fingið navnið Atlagøta, eftir Atla P. Dam, sum var løgmaður í tíðarskeiðunum 1970-1981, 1985-1989 og aftur 1991-1993. Hetta er tilsamans 16 ár, og er hann tí tann løgmaður, sum hevur sitið longst undir heimastýrisskipanini.

Tað verður hildið at vera óheppið, at vegurin, sum er nevndur eftir Atla P. Dam er einasti vegur, har eingin bústaður/adressa er knýtt at vegnum. Skotið verður tí upp, at komandi høvuðsvegurin a á økinum við nýggju stórhøllina á økinum við Stórutjørn fer at fáa navnið Atlagøta, meðan núverandi Atlagøta broytir navn.

Eftir ætlan fer økið við stórhøllina at standa liðugt við árslok í 2024. Tí má navnaskiftið henda áðrenn hetta. Tí eigur tað at verða lagt fyri gøtunavnanevndina í Tórshavnar kommunu at finna nýtt navn til verandi Atlagøtu, áðrenn navnaskifti kann fremjast.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at høvuðsvegurin við komandi Stórhøllina við Stórutjørn fær navnið Atlagøta, at gøtunavnanevndin finnur nýtt navn til núverandi Atlagøtu, og at málið verður beint í býráðið umvegis gøtunavnanevndin og mentamálanevndina.

**Tekniska nevnd 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 18:30</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
| --- | --- | --- |
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Jákup Dam | Gunvør Balle |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen | Súsanna Olsen |
| | Jón Kragesteen | |